# LANDSGRANNSKOÐANIN

## Fíggjarárið 2017

Frágreiðing

til løgtingsgrannskoðararnar
um frávik millum játtan og nýtslu

August 2018

# Innihaldsyvirlit


0 INNGANGUR 3

1 LØGMANSFYRISITINGIN 5

2 FÍGGJARMÁL 7

3 FISKIVINNUMÁL 19

4 MENTAMÁL 23

5 HEILSU- OG INNLENDISMÁL 35

6 ALMANNAMÁL 43

7 UTTANRÍKIS- OG VINNUMÁL 49

8 SAMFERÐSLUMÁL 55

9 FLUTTAR LØGUJÁTTANIR 63

# 0 Inngangur

Yvirskipaðu reglurnar um grannskoðan av landsroknskapinum eru ásettar í § 45 í stýrisskipanarlógini. Neyvari reglur eru í Ll. nr. 25 frá 21. apríl 1999 “um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.” (grannskoðanarlógin).

Sambært § 11, stk. 3, í grannskoðanarlógini skal hvør landsstýrismaður, í seinasta lagi 5 mánaðir eftir fíggjarárslok, greiða løgtingsgrannskoðarunum og Landsgrannskoðanini frá um frávik millum játtanartøl og roknskapartøl.

Landsgrannskoðanin hevur gjøgnumgingið tilfarið fyri 2017, og hevur havt samskifti við avvarðandi landsstýrismenn og aðalráð um ymiskar spurningar. Í hesari frágreiðing hevur Landsgrannskoðanin fyri hvørt málsøki sær greitt frá um frávik millum játtanartøl og roknskapartøl í fíggjarárinum 2017. Í frágreiðingini eru eisini viðmerkingar og frágreiðingar frá avvarðandi landsstýrismonnum um, hvørjar atvoldirnar eru til frávikini.

Í kapittul 9 er eitt yvirlit yvir óbrúktar løgujáttanir.

Við hesum letur Landsgrannskoðanin løgtingsgrannskoðarunum frágreiðingina um frávik í fíggjarárinum 2017.

Argir, 8. august 2018

Beinta Dam,
landsgrannskoðari

# 1 Løgmansfyrisitingin

Yvirlitið niðanfyri vísir meir-/minninýtslu á høvuðskontum undir Løgmansfyrisitingini.

*t.kr.*

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Meir-nýtsla | Minni-nýtsla |
|---|---|---|---|---|
| Løgmansskrivstovan (Rakstrarj.) | 14.534 | 14.275 | | 259 |
| Umbygging í Tinganesi (Løguj.) | 4.100 | 3.992 | | 108 |
| Løgmaður og landsstýrið (Rakstrarj.) | 7.730 | 7.724 | | 6 |
| Norðurbryggjan í Keypmannahavn (Stuðulsj.) | 300 | 300 | | 0 |
| Ymsar útreiðslur (Rakstrarj.) | 340 | 340 | | 0 |
| Studn. til pol. virks. og upplýsing (Stuðulsj.) | 4.800 | 4.800 | | 0 |
| Føroya kærustovnur (Rakstrarj.) | 6.805 | 6.388 | | 417 |
| Endurgjald til brotsverksoffur (Lógarb. j.) | 0 | 10 | 10 | |
| Dátueftirlitið (Rakstrarj.) | 2.000 | 1.764 | | 236 |

## 1.1 Frávik

### 1.1.1 Løgmansskrivstovan (rakstrarjáttan) 2.11.1.02

Í fíggjarlógini eru játtaðar 14,5 mió.kr. Minninýtslan er 259 t.kr. Talan er um høvuðskontu við tveimum undirkontum.

*t.kr.*

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Vanligt virksemi | 13.009 | 12.221 | 788 |
| 35. Felagsfyrisitingin í Tinganesi | 1.525 | 2.055 | -530 |
| **Tilsamans** | **14.534** | **14.275** | **259** |

### 1.1.2 Umbygging í Tinganesi (løgujáttan) 2.11.1.21

Játtaðar eru 4,1 mió.kr. Minninýtslan er 108 t.kr. Upprunaliga var játtanin 1,8 mió.kr. Í eykajáttanarlógini fyri august 2017-5 varð játtanin hækkað 2,3 mió.kr.

### 1.1.3 Løgmaður og landsstýrið (rakstrarjáttan) 2.12.3.01

Í fíggjarlógini eru játtaðar 7,7 mió.kr. Minninýtslan er 6 t.kr.

### 1.1.4 Norðurbryggjan í Keypmannahavn (stuðulsjáttan) 2.13.1.04

Í fíggjarlógini eru játtaðar 300 t.kr. til at stuðla virksemi at menna og breiða út kunnleikan til mentan og virkislív í útnorðri. Samsvarandi játtanini eru 300 t.kr. fluttar Norðurbryggjuni.

### 1.1.5 Ymsar útreiðslur (rakstrarjáttan) 2.14.1.01

Í fíggjarlógini eru játtaðar 340 t.kr. Talan er um høvuðskontu við fleiri undirkontum.

*t.kr.*

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Kunngerðarsavn og -blað | 100 | 105 | -5 |
| 21. Lógarsavn | 100 | 118 | -8 |
| 22. Dóms- og løgreglumál | 90 | 67 | 23 |
| 26. Rættarhjálp Føroya | 50 | 50 | 0 |
| **Tilsamans** | **340** | **340** | **0** |

### 1.1.6 Studningur til politiskt virksemi og upplýsing (stuðulsjáttan) 2.14.1.02

Í fíggjarlógini eru játtaðar 4,8 mió.kr. Studningurin til politiskt virksemi og upplýsing verður goldin sambært Ll. nr. 31/2003" um fíggjarligan stuðul til politiskt virksemi og politiska upplýsing", og játtanin verður býtt millum flokkar/uttanflokkafólk eftir atkvøðutali seinasta løgtingsval.

### 1.1.7 Føroya Kærustovnur (rakstrarjáttan) 2.14.1.04

Í fíggjarlógini eru játtaðar 6,8 mió.kr. Minninýtslan er 417 t.kr. Sambært Løgmansskrivstovuni er ein orsøk til minninýtsluna, at starvsfólk var í farloyvi uttan løn part av árinum, og harafturat hevur stovnurin útreiðslur, sum sveiggja nógv frá ári til árs, sum stovnurin ikki hevur ávirkan á.

### 1.1.8 Endurgjald til brotsverksoffur (lógarbundin játtan) 2.14.1.07

Í fíggjarlógini er nettojáttanin 0 kr. Meirnýtslan er 10 t.kr. Talan er um eina nettojáttan, og sum meginregla eigur nýtslan at vera 0 kr., eisini hóast útgjøldini eru størri enn væntað, tí endurgjaldið verður kravt inn aftur frá brotsmonnunum.

Talan er um høvuðskontu við tveimum undirkontum.

*t.kr.*

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 01. Endurgjald til brotsverksoffur | 300 | 189 | 110 |
| 02. Innkrevjing av endurgjaldi frá brotsverksmonnum | 300 | 179 | -120 |
| **Tilsamans** | **0** | **10** | **-10** |

### 1.1.9 Dátueftirlitið (rakstrarjáttan) 2.14.2.02

Í fíggjarlógini eru játtaðar 2 mió.kr. Minninýtslan er 236 t.kr.

# 2 Fíggjarmál

## 2.1 § 3 Fíggjarmál

Yvirlitið niðanfyri vísir meir-/minninýtslu á høvuðskontum undir fíggjarmálum.

*t.kr.*

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Meir-nýtsla | Minni-nýtsla |
|---|---|---|---|---|
| Fíggjarmálaráðið (Rakstrarj.) | 11.505 | 11.457 | | 48 |
| Sáttmálaviðurskifti (Rakstrarj.) | 400 | 701 | 301 | |
| Talgildu Føroyar (Rakstrarj.) | 20.000 | 18.627 | | 1.373 |
| Endurgj. av skatti og avgjøldum (Stuðulsj.) | 300 | 300 | | 0 |
| TAKS (Rakstrarj.) | 64.858 | 65.354 | 496 | |
| Føroya gjaldstova (Rakstrarj.) | 27.954 | 27.882 | | 72 |
| Búskaparráðið (Rakstrarj.) | 2.450 | 2.433 | | 17 |
| Landsbanki Føroya (Rakstrarj.) | 0 | 0 | | 0 |
| Hagstova Føroya (Rakstrarj.) | 10.925 | 10.921 | | 4 |
| Tænastumannaeftirlønir (Lógarb. j.) | 29.300 | 30.263 | 963 | |
| Læraraeftirlønir (Lógarb. j.) | 55.000 | 55.336 | 336 | |
| Eftirlønir innan heilsuverkið (Lógarb. j.) | 14.100 | 14.301 | 201 | |
| Postverk Føroya, eftirlønir (Lógarb. j.) | 8.650 | 8.375 | | 275 |
| Eftirlønir (Lógarb. j.) | 500 | 506 | 6 | |
| Danskar eftirlønir (Lógarb. j.) | 1.850 | 1.550 | | 300 |
| Eftirløn landsstýrismanna (Lógarb. j.) | 3.150 | 3.253 | 103 | |
| Lønarforskot (Stuðulsj.) | 0 | 0 | | 0 |
| Stuðul til flut. og dupult húsarhald (Lógarb. j.) | 22.100 | 21.977 | | 123 |
| Útgjald úr Trygdargrunninum (Lógarb. j.) | 0 | 0 | | 0 |
| Stuðul til rentuútreiðslur (Lógarb. j.) | 44.000 | 43.703 | | 297 |
| Saltsilo, rakstrarstuðul (Stuðulsj.) | 2.100 | 2.100 | | 0 |
| KT Landsins (Rakstrarj.) | 4.300 | 4.296 | | 4 |

## 2.2 Meirnýtsla/frávik

### 2.2.1 Sáttmálaviðurskifti (rakstrarjáttan) 3.11.1.36

Í fíggjarlógini eru játtaðar 400 t.kr. Meirnýtslan er 301 t.kr. Sambært Fíggjarmálaráðnum er orsøkin serliga verkføllini og avleidd skundmál í Fasta Gerðarrætti, sum høvdu við sær høgar og óvæntaðar útreiðslur. Tað hendi so seint út á árið, at ikki var gjørligt at biðja um eykajáttan.

### 2.2.2 TAKS (rakstrarjáttan) 3.15.1.04

Í fíggjarlógini eru játtaðar 64,9 mió.kr. Meirnýtslan er 496 t.kr. Sambært landsstýrismanninum er orsøkin serliga, at ávísar KT-verkætlanir gingu ikki sum ætlað, og at útreiðslurnar til KT menning vórðu 2,1 mió.kr. hægri enn mett.

Talan er um høvuðskontu við tveimum undirkontum.

*t.kr.*

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Vanligt virksemi | 53.658 | 52.048 | 1.610 |
| 24. EDV-skipanir hjá TAKS | 11.200 | 13.306 | -2.106 |
| **Tilsamans** | **64.858** | **65.354** | **-496** |

Sambært landsstýrismanninum var orsøkin til meirnýtsluna fyrst og fremst, at ein verkætlan, sum Fíggjarmálaráðið hevur valt at Føroyar skuldu vera partur av, kostaði meira enn væntað. Verkætlanin var um útveksling av skattaupplýsingum ímillum lond hjá OECD. KT-menning av verkætlanini var upprunaliga mett at kosta um 0,8 mió.kr. TAKS søkti um eykajáttan til verkætlanina, men umbøn um eykajáttan varð ikki løgd fyri Løgtingið. Tá ið árið var av, vísti tað seg, at verkætlanin higartil hevur kostað um 1,5 mió.kr.

Landsstýrismaðurin vísir á, at TAKS royndi at spara í øðrum rakstri fyri at dekka sum mest av meirútreiðslunum í KT, og 1,6 mió.kr. minninýtsla er í vanliga virkseminum, soleiðis at netto verður samlaða meirnýtslan hjá TAKS 0,5 mió.kr.

### 2.2.3 Landsbanki Føroya (rakstrarjáttan) 3.15.1.20

Í fíggjarlógini er nettojáttanin 0 kr.; 8,9 mió.kr. í inntøkum og sama í útreiðslum. Landsbankin verður fíggjaður við gjaldi upp til 4 ‰ av minstagjaldføri landsins, sum bankin fær fyri at røkja gjaldføri og skuld landsins. Bankin fær eisini inntøkur fyri at gera tænastur fyri aðrar stovnar.

Býtt á høvuðsslag, vísir landsroknskapurin:

*t.kr.*

| Høvuðsslag | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| Rakstrarútreiðslur | 8.900 | 7.326 | 1.574 |
| Rakstrarinntøkur | -1.000 | -1.265 | 265 |
| Skattir og flytinntøkur | -7.900 | 0 | -7.900 |
| Flytingar millum almennar myndugleikar | 0 | -6.061 | 6.061 |
| **Tilsamans** | **0** | **0** | **0** |

### 2.2.4 Tænastumannaeftirlønir (lógarbundin játtan) 3.18.1.01

Í fíggjarlógini eru játtaðar 29,3 mió.kr. Meirnýtslan er 963 t.kr. Sambært landsstýrismanninum fóru fleiri persónar frá við eftirløn, enn mett í fíggjarlógini.

### 2.2.5 Læraraeftirlønir (lógarbundin játtan) 3.18.1.04

Í fíggjarlógini eru játtaðar 55 mió.kr. Meirnýtslan er 336 t.kr. Sambært landsstýrismanninum fóru fleiri persónar frá við eftirløn, enn mett í fíggjarlógini.

### 2.2.6 Eftirlønir innan heilsuverkið (lógarbundin játtan) 3.18.1.07

Í fíggjarlógini eru játtaðar 14,1 mió.kr. Meirnýtslan er 201 t.kr. Sambært landsstýrismanninum eru fleiri persónar farnir frá við eftirløn, enn mett í fíggjarlógini.

### 2.2.7 Eftirlønir (lógarbundin játtan) 3.18.2.01

Í fíggjarlógini eru játtaðar 500 t.kr. Meirnýtslan er 6 t.kr.

### 2.2.8 Eftirløn landsstýrismanna (lógarbundin játtan) 3.18.2.07

Í fíggjarlógini eru játtaðar 3,2 mió.kr. Meirnýtslan er 103 t.kr.

## 2.3 Minninýtsla/frávik

### 2.3.1 Talgildu Føroyar (rakstrarjáttan) 3.11.1.61
Í fíggjarlógini eru játtaðar 20 mió.kr. Minninýtslan er 1,4 mió.kr.

### 2.3.2 Føroya gjaldstova (rakstrarjáttan) 3.15.1.07
Játtaðar eru 28 mió.kr. Minninýtslan er 72 t.kr. Upprunaliga var játtanin 28,2 mió.kr. Í eykajáttanarlógini fyri august 2017-5 varð játtanin lækkað 200 t.kr. Býtt á undirkontu vísir landsroknskapurin:

*t.kr.*

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Vanligt virksemi | 16.299 | 16.091 | 208 |
| 24. Búskaparskipan landsins | 7.735 | 7.938 | -203 |
| 25. Vaktætlanarskipan | 825 | 833 | -8 |
| 28. Felagsfyrisiting hjá Fíggjarmálaráðnum | 3.095 | 3.107 | -12 |
| 40. Inntøkufíggjað virksemi | 0 | -87 | 87 |
| **Tilsamans** | **27.954** | **27.882** | **72** |

### 2.3.3 Hagstova Føroya (rakstrarjáttan) 3.15.2.01
Játtaðar eru 10,9 mió.kr. Minninýtslan er 4 t.kr. Upprunaliga var játtanin 10,3 mió.kr. Í eykajáttanarlógini fyri august 2017-5 varð játtanin hækkað 600 t.kr.

### 2.3.4 Postverk Føroya, eftirlønir (lógarbundin játtan) 3.18.1.10
Í fíggjarlógini eru játtaðar 8,7 mió.kr. Minninýtslan er 275 t.kr.

### 2.3.5 Danskar eftirlønir (lógarbundin játtan) 3.18.2.04
Í fíggjarlógini eru játtaðar 1,9 mió.kr. Minninýtslan er 300 t.kr.

### 2.3.6 Lønarforskot (stuðulsjáttan) 3.18.3.04
Í fíggjarlógini eru játtaðar 50 t.kr. í inntøkum og 50 t.kr. í útreiðslum. Talan er um játtan til lønarforskot, sum tænastumenn kunnu fáa sambært tænastumannalógini. Onki lønarforskot er veitt í nógv ár.

### 2.3.7 Stuðul til flutning og dupult húsarhald (lógarbundin játtan) 3.21.2.01
Játtaðar eru 22,1 mió.kr. Minninýtslan er 123 t.kr. Upprunaliga var játtanin í fíggjarlógini 19,6 mió.kr. Í eykajáttanarlógini fyri august 2017-5 varð játtanin hækkað 2,5 mió.kr.

### 2.3.8 Útgjald úr Trygdargrunninum (lógarbundin játtan) 3.21.7.10
Í fíggjarlógini eru játtaðar 500 t.kr. í inntøkum og sama í útreiðslum. Býtt á standardkontu, vísir landsroknskapurin:

*t.kr.*

| Standardkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 52. Tilskot til einstaklingar | 500 | -45 | 455 |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovnar (innt.) | -500 | 45 | -455 |
| **Tilsamans** | **0** | **0** | **0** |

### 2.3.9 Stuðul til rentuútreiðslur (lógarbundin játtan) 3.22.4.01

Í fíggjarlógini eru játtaðar 44 mió.kr. Minninýtslan er 297 t.kr. Býtt á standardkontu, vísir landsroknskapurin:

*t.kr.*

| Standardkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 52. Tilskot til einstaklingar | 79.000 | 79.241 | -241 |
| 77. Flyting frá kommununum til landið | -35.000 | -35.538 | 538 |
| **Tilsamans** | **44.000** | **43.703** | **297** |

### 2.3.10 Saltsilo, rakstrarstuðul (stuðulsjáttan) 3.24.3.27

Játtaðar eru 2,1 mió.kr. Upprunaliga var játtanin 2,5 mió.kr. Í eykajáttanarlógini fyri august 2017-5 varð játtanin lækkað 400 t.kr. Samlaða játtanin, 2,1 mió.kr., er flutt Saltsilogrunninum í 2017.

### 2.3.11 KT landsins (rakstrarstuðul) 3.38.3.19

Í fíggjarlógini eru játtaðar 4,3 mió.kr. Minninýtslan er 4 t.kr. Býtt á standardkontu, vísir landsroknskapurin:

*t.kr.*

| Standardkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 11. Lønir v.m. | 4.300 | 3.253 | 1.047 |
| 14-16. Keyp av vørum, tænastum, útbúnaði o.a. | 17.000 | 17.841 | -841 |
| 21. Søla av vørum og tænastum | -17.000 | -17.573 | 573 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovnar (útr.) | 0 | 825 | -825 |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovnar (innt.) | 0 | -50 | 50 |
| **Tilsamans** | **4.300** | **4.296** | **4** |

## 2.4 § 20 Inntøkur

Yvirlitið niðanfyri vísir meir-/minniinntøkur á høvuðskontum undir § 20 Inntøkur.

*t.kr.*

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Meir-inntøka | Minni-inntøka |
|---|---|---|---|---|
| Rentur at gjalda | 20.000 | 20.000 | 0 | |
| Rentuinntøkur av innistandandi | -17.900 | -19.641 | 1.741 | |
| Aðrar rentur | -1.000 | -387 | | 613 |
| Útgoldið yvirskot frá Dk. Nationalbank | -6.000 | -5.188 | | 812 |
| Vanligur landsskattur | -1.380.000 | -1.406.537 | 26.537 | |
| FAS-skipanin | 0 | -27.320 | 27.320 | |
| Kirkjuskattur | 0 | 0 | 0 | |
| Kolvetnisskattur, persónar | 0 | 24 | | 24 |
| Felagsskattur | -275.000 | -395.702 | 120.702 | |
| Kapitalvinningsskattur | -215.000 | -290.422 | 75.422 | |
| Avgjald av kapitaleftirlønum | -58.000 | -43.166 | | 14.834 |
| Skattur av pensjónsinngjøldum | 0 | 127 | | 127 |
| Arvaavgjald | -8.000 | -10.386 | 2.386 | |
| Gjald til Vinnusjúkugrunnin | 0 | 0 | 0 | |
| Gjald til Heilsutrygd | -143.000 | -144.433 | 1.433 | |
| Gjald til barsilsskipan | 0 | 0 | 0 | |
| Gjald til Búnaðarstovuna | -2.940 | -2.940 | 0 | |
| Meirvirðisgjald | -1.470.000 | -1.496.550 | 26.550 | |
| Tollavgjøld | -42.000 | -47.749 | 5.749 | |
| Punktgjøld | -185.000 | -193.001 | 8.001 | |
| Lønhæddaravgjald | -37.000 | -37.457 | 457 | |
| Brennioljugjald | -68.000 | -67.798 | | 202 |
| Loyvisgjald á alivinnu | -138.000 | -158.108 | 20.108 | |
| Avgjald á fiskatilfeingi | -210.000 | -296.430 | 86.430 | |
| Framleiðsluavgjøld | -25.000 | -23.556 | | 1.444 |
| Skrásetingargjald | -160.000 | -168.904 | 8.904 | |
| Vegskattur (Vektgjald) | -113.000 | -118.187 | 5.187 | |
| Ferðaavgjald | -10.000 | -11.443 | 1.443 | |
| Umhvørvisavgjald á smyrjiolju | -3.750 | -3.253 | | 497 |
| Tinglýsingargjald | -40.000 | -40.360 | 360 | |
| Útluting frá Fíggingargrunninum frá 1992 | -100.000 | -100.000 | 0 | |
| Útluting frá partafeløgum og grunnum | -30.000 | -23.282 | | 6.718 |
| Aðrar inntøkur | -2.500 | -3.167 | 667 | |
| Endurrindan av keyps-MVG | 210.000 | 199.195 | 10.805 | |
| Endurr. fyri DIS/FAS inntøkur | 116.000 | 115.259 | 741 | |
| Heildarveiting o.t. | -641.800 | -641.800 | 0 | |

## 2.5 Meirinntøkur/frávik

Sambært landsstýrismanninum er meginreglan, at biðið verður ikki um eykajáttan fyri væntað frávik fyri játtanirnar á § 20 Inntøkur, heldur ikki útreiðslujáttanirnar. Talan er sostatt í høvuðsheitum um játtanir, sum eru heimildir at hava inntøkur, bygdar á metingar, sum skulu vera so neyvar og veruleikakendar, sum gjørligt. Metingarnar verða grundaðar á søguliga gongd, kend viðurskifti og metingar um búskapargongdina og gongdina í vinnugreinum.

Løgtingið varð kunnað um dagførdu metingarnar fyri 2017 í játtanareftirlitinum í Búskaparfrágreiðing II, ið varð hjáløgd uppskotinum til fíggjarlóg fyri 2018.

Ásannandi, at Landsgrannskoðanin ikki hevur somu fatan av gildinum av meginregluni um inntøkujáttanir, hevur Fíggjarmálaráðið tikið tað við í arbeiðið at gera dagføringar av játtanarskipanini.

### 2.5.1 Vanligur landsskattur (ógreinað játtan) 20.52.1.01

Í fíggjarlógini eru játtaðar 1.380 mió.kr. í inntøkum. Meirinntøkan er 26,5 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum er orsøkin til meirinntøkuna størri vøkstur í búskapinum enn mett í fíggjarlógini, sum eisini sást aftur í størri lønargjaldingum, hægri løntakaratali og lægri arbeiðsloysi.

Talan er um eina játtan, sum hevur fleiri undirkontur:

*t.kr.*

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 01. Vanligur landsskattur | -3.197.000 | -3.247.803 | 50.803 |
| 07. Húsaleiguskattur | -6.000 | -6.089 | 89 |
| 09. Flutt til kommunur | 1.820.000 | 1.844.622 | -24.622 |
| 13. Skattur av húsaleigu flutt til kommunur | 3.000 | 2.733 | 267 |
| **Tilsamans** | **-1.380.000** | **-1.406.537** | **26.537** |

### 2.5.2 FAS-skipanin (ógreinað játtan) 20.52.1.04

Í fíggjarlógini eru játtaðar 250 mió.kr. í inntøkum og sama í útreiðslum. Meirinntøkan er 27,3 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum er orsøkin, at TAKS hevur inntøkuført eitt krav, tí TAKS ikki metti, at tað eina felagið hevði rætt til afturbering í FAS-skipanini.

Býtt á undirkontu vísir landsroknskapurin:

*t.kr.*

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 01. FAS-endurgjald | 250.000 | 209.875 | 40.125 |
| 02. Skattainntøka frá FAS-skipanini | -250.000 | -237.195 | -12.805 |
| **Tilsamans** | **0** | **-27.320** | **27.320** |

### 2.5.3 Kirkjuskattur (ógreinað játtan) 20.52.1.05

Í fíggjarlógini er nettojáttanin 0 kr. Játtaðar eru 54 mió.kr. í inntøkum og sama í útreiðslum. Meirinntøkan er 1,3 mió.kr. og 55,3 mió.kr. eru fluttar til kirkjur.

### 2.5.4 Felagsskattur (ógreinað játtan) 20.52.1.07

Í fíggjarlógini er inntøkujáttanin 275 mió.kr. Meirinntøkan er 120,7 mió.kr.

Býtt á undirkontu, vísir landsroknskapurin:

*t.kr.*

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 01. Felagsskattur | -393.000 | -571.015 | 178.015 |
| 02. Flutt til kommunur | 118.000 | 175.313 | -57.313 |
| **Tilsamans** | **-275.000** | **-395.702** | **120.702** |

Sambært landsstýrismanninum er orsøkin størri vøkstur í búskapinum og vinnuni, enn mett í fíggjarlógini, serstakliga hjá alivinnuni og uppisjóvarflotanum.

### 2.5.5 Kapitalvinningsskattur (ógreinað játtan) 20.52.1.11

Í fíggjarlógini eru játtaðar 215 mió.kr. í inntøkum. Meirinntøkan er 75,4 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum er orsøkin til meirinntøkuna størri vøkstur í búskapinum og vinnuni, enn mett í fíggjarlógini, og serstakliga vegna nakrar stórar útlutingar av vinningsbýti.

### 2.5.6 Arvaavgjald (ógreinað játtan) 20.52.1.25

Í fíggjarlógini eru játtaðar 8 mió.kr. Meirinntøkan er 2,4 mió.kr.

### 2.5.7 Gjald til Vinnusjúkugrunnin (ógreinað játtan) 20.52.1.26

Í fíggjarlógini er nettojáttanin 0 kr.; 9 mió.kr. í inntøkum og sama í útreiðslum. Í landsroknskapinum eru inntøkurnar 9,2 mió.kr., og 9,2 mió.kr. eru fluttar Vinnusjúkugrunninum.

### 2.5.8 Gjald til Heilsutrygd (ógreinað játtan) 20.52.1.27
Í fíggjarlógini er inntøkujáttanin 143 mió.kr. Í landsroknskapinum eru inntøkurnar 144,4 mió.kr. Meirinntøkan er 1,4 mió.kr.

### 2.5.9 Gjald til barsilsskipan (ógreinað játtan) 20.52.1.28
Í fíggjarlógini eru játtaðar eru 122 mió.kr. í inntøkum og sama í útreiðslum. Bókaða gjaldið í landsroknskapinum er 127,3 mió.kr. Arbeiðsgevarar og arbeiðstakarar rinda 0,71% av A-inntøkuni til at fíggja barsilsskipanina. Goldnu upphæddirnar verða fluttar í Barsilsgrunnin, sum fíggjar virksemið á høvuðskontu 17.39.4.01 "Barsilsskipan" og á høvuðskontu 17.39.4.04 "Umsiting av barsilsskipan". 127,3 mió.kr. eru fluttar Barsilsgrunninum.

### 2.5.10 Gjald til Búnaðarstovuna (ógreinað játtan) 20.52.1.30
Í fíggjarlógini er inntøkujáttanin 2,9 mió.kr. Meirinntøkan er 0 kr. Talan er um gjald frá Búnaðargrunninum, og er fyri jarðarumsiting, sum verður framd við játtanini á høvuðskontu 5.33.2.03 "Búnaðarstovan".

### 2.5.11 Meirvirðisgjald (ógreinað játtan) 20.52.2.01
Í fíggjarlógini eru játtaðar 1.620 mió.kr. í inntøkum frá meirvirðisgjaldi og 150 mió.kr. í útreiðslum fyri endurrindan av keyps-MVG til kommunur. Meirinntøkan er 26,6 mió.kr. Sambært landsstýrimanninum er orsøkin til meirinntøkuna størri vøkstur í búskapinum, størri lønargjaldingar og størri keypiorka í 2017 enn mett í fíggjarlógini.

Býtt á undirkontu vísir landsroknskapurin:

*t.kr.*

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 01. Meirvirðisgjald | -1.620.000 | -1.666.822 | 46.822 |
| 02. Flutt til kommunur | 150.000 | 170.272 | -20.272 |
| **Tilsamans** | **-1.470.000** | **-1.496.550** | **26.550** |

### 2.5.12 Tollavgjøld (ógreinað játtan) 20.52.2.04
Í fíggjarlógini eru játtaðar 42 mió.kr. í inntøkum. Meirinntøkan er 5,7 mió.kr.

### 2.5.13 Punktgjøld (ógreinað játtan) 20.52.2.07
Í fíggjarlógini eru játtaðar 185 mió.kr. í inntøkum. Meirinntøkan er 8 mió.kr.

### 2.5.14 Lønhæddaravgjald (ógreinað játtan) 20.52.2.10
Í fíggjarlógini eru játtaðar 37 mió.kr. í inntøkum. Meirinntøkan er 457 t.kr.

### 2.5.15 Loyvisgjald á alivinnu (ógreinað játtan) 20.52.2.14
Í fíggjarlógini eru játtaðar 138 mió.kr. í inntøkum. Meirinntøkan er 20,1 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum er orsøkin til meirinntøkuna størri tøka og hægri prísir á laksi í 2017 enn mett í fíggjarlógini.

### 2.5.16 Avgjald á fiskatilfeingi (ógreinað játtan) 20.52.2.15
Í fíggjarlógini eru játtaðar 210 mió.kr. í inntøkum. Meirinntøkan er 86,4 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum er orsøkin til meirinntøkuna í høvuðsheitum hægri kvotur og størri inntøkur frá avgjaldi og uppboðssølu enn mett.

### 2.5.17 Skrásetingargjald (ógreinað játtan) 20.52.2.19

Í fíggjarlógini eru játtaðar 160 mió.kr. í inntøkum. Meirinntøkan er 8,9 mió.kr.

Talan er um eina játtan, sum hevur fleiri undirkontur:

*t.kr.*

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 01. Skrásetingargjald | -154.000 | -163.334 | 9.334 |
| 02. Gjald fyri burturbeining av bili | 7.000 | 6.820 | 180 |
| 03. Inntøkur, burturbeiningargjøld | -13.000 | -12.390 | -610 |
| **Tilsamans** | **-160.000** | **-168.904** | **8.904** |

### 2.5.18 Vegskattur (Vektgjald) (ógreinað játtan) 20.52.2.22

Í fíggjarlógini eru játtaðar 113 mió.kr. í inntøkum. Meirinntøkan er 5,2 mió.kr.

### 2.5.19 Ferðaavgjald (ógreinað játtan) 20.52.2.25

Í fíggjarlógini eru játtaðar 10 mió.kr. í inntøkum. Meirinntøkan er 1,4 mió.kr.

### 2.5.20 Tinglýsingargjald (ógreinað játtan) 20.52.2.30

Í fíggjarlógini eru játtaðar 40 mió.kr. í inntøkum. Meirinntøkan er 360 t.kr.

### 2.5.21 Útluting frá Fíggingargr. frá 1992 (ógreinað játtan) 20.52.3.01

Játtaðar eru 100 mió.kr. í inntøkum. Meirinntøkan er 0 kr. Upprunaliga var játtanin í fíggjarlógini 7 mió.kr. Í eykajáttanarlógini fyri august 2017-5 varð játtanin hækkað 93 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum er meginreglan, at biðið verður ikki um eykajáttan fyri væntað frávik fyri játtanirnar í § 20. Tó varð í 2017 biðið um eykajáttan til meirinntøku á 93 mió.kr. á høvuðskontu 20.52.3.01., tí samsvarandi upphædd skuldi flytast í Búskapargrunnin.

### 2.5.22 Aðrar inntøkur (ógreinað játtan) 20.52.3.10

Í fíggjarlógini eru játtaðar 2,5 mió.kr. í inntøkum. Meirinntøkan er 667 t.kr. Játtanin hevur fleiri undirkontur:

*t.kr.*

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 02. Skeinkiloyvi, avgjøld | -150 | -260 | 110 |
| 04. Navnaprógv | -20 | -20 | 0 |
| 05. Bøtur | -1.000 | -380 | -620 |
| 07. Burturlutingargjøld | -670 | -1.018 | 348 |
| 09. Lóggilding av el-innleggjarum, avgjøld | -120 | -123 | 3 |
| 11. Víddargjøld oljuvinna | 0 | 0 | 0 |
| 12. Nýtslugjald, (royalties, oljufeløg) | 0 | 0 | 0 |
| 60. Óvanligar inntøkur | -540 | -1.366 | 826 |
| **Tilsamans** | **-2.500** | **-3.167** | **667** |

## 2.6 Minniinntøkur/frávik

### 2.6.1 Kolvetnisskattur, persónar (ógreinað játtan) 20.52.1.06

Í fíggjarlógini er ongin játtan. Minniinntøkan er 24 t.kr.

### 2.6.2 Avgjald av kapitaleftirlønum (ógreinað játtan) 20.52.1.13

Í fíggjarlógini eru játtaðar 58 mió.kr. Minniinntøkan er 14,8 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum er tað trupult at meta um gongdina í útgjaldinum av kapitaleftirlønum. Fíggjarmálaráðið hevur sett seg í samband við pensjónsfeløgini um at fáa til vega betri grundarlag til metingarnar frameftir.

### 2.6.3 Skattur av pensjónsinngjøldum (ógreinað játtan) 20.52.1.14
Í fíggjarlógini er nettojáttanin 0 kr. Minniinntøkan er 127 t.kr.

Talan er um játtan við tveimum undirkontum:

*t.kr.*

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 01. Skattur av pensjónsinngjøldum | -300.000 | -320.881 | 20.881 |
| 02. Flutt til kommunur (pensjónsskattur | 300.000 | 321.008 | -21.008 |
| **Tilsamans** | **0** | **127** | **-127** |

### 2.6.4 Brennioljugjald (ógreinað játtan) 20.52.2.13
Í fíggjarlógini eru játtaðar 68 mió.kr. Minniinntøkan er 202 t.kr.

### 2.6.5 Framleiðsluavgjøld (ógreinað játtan) 20.52.2.16
Í fíggjarlógini eru játtaðar 25 mió.kr. Minniinntøkan er 1,4 mió.kr.

### 2.6.6 Umhvørvisavgjald á smyrjiolju (ógreinað játtan) 20.52.2.28
Í fíggjarlógini eru játtaðar 3,8 mió.kr. Minniinntøkan er 497 t.kr.

### 2.6.7 Útluting frá partafeløgum og grunnum (ógreinað játtan) 20.52.3.04
Í fíggjarlógini eru játtaðar 30 mió.kr. Minniinntøkan er 6,7 mió.kr. Talan er um játtan við tveimum undirkontum:

*t.kr.*

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 01. Útluting frá almennum partafeløgum | -25.000 | -20.085 | -4.915 |
| 02. Útluting frá almennum grunnum | -5.000 | -3.197 | -1.803 |
| **Tilsamans** | **-30.000** | **-23.282** | **-6.718** |

Sambært landsstýrismanninum er orsøkin í høvuðsheitum lægri útluting frá Føroya Tele enn mett, og tí ongin útluting fekst frá Realinum.

## 2.7 Minniútreiðslur/frávik

### 2.7.1 Endurrindan av keyps-MVG (ógreinað játtan) 20.52.5.01
Í fíggjarlógini eru játtaðar 210 mió.kr. í útreiðslum. Minniútreiðslurnar eru 10,8 mió.kr. Høvuðskontan er til samla alt keyps-MVG hjá landinum.

Stovnar landsins rinda MVG. Áðrenn 2000 var skipanin soleiðis, at játtanir og roknskapir hjá stovnunum høvdu útreiðslur til MVG við. Í 2000 varð skipanin broytt soleiðis, at játtanirnar hjá stovnunum lækkaðu við væntaðu MVG-upphæddini, og samlaða MVG upphæddin varð játtað á høvuðskontu 20.52.5.01.

Stovnar, sum ikki eru MVG-skrásettir, skráseta sítt keyps-MVG á standardkontu 75 í egnum roknskapi (høvuðskontu). Mánaðarliga verður keyps-MVG'ið lyft av høvuðskontunum hjá stovnunum og flutt á felags játtanina undir § 20.

### 2.7.2 Endurrindan fyri DIS/FAS inntøkur (ógreinað játtan) 20.52.5.04
Í fíggjarlógini eru játtaðar 116 mió.kr. í útreiðslum. Minniútreiðslan er 741 t.kr.

## 2.8 Rentur

Í landsroknskapinum eru rentur o.a. bæði undir § 20 Inntøkur og § 80 Rentur. § 20 er partur av RLÚ I, sum kann sigast at vera tann vanligi raksturin hjá landskassanum. § 80 er partur av RLÚ II, sum í landsroknskapinum fevnir um óvanligar inntøkur og útreiðslur, frávik frá játtan til rentur og flyting í Búskapargrunnin.

Undir § 20 eru sostatt inntøkur og útreiðslur av rentum o.ø. sambært játtan, meðan frávikini í mun til játtan til rentur o.a. av brævalánum og játtan til avkast av plaseringum av gjaldførinum hjá landinum eru undir § 80.

Í høvuðstølunum til landsroknskapin er ein greining av øllum nettorentunum.

*t.kr.*

| Greining av nettorentum | Játtan | Roknskapur | | |
|---|---|---|---|---|
| | | *Bruttotøl* | *Javnað við játtan* | *Nettotøl* |
| **Høvuðskontur á grein 20 Inntøkur** | | | | |
| 50101 Rentur at gjalda | 20.000 | 79.524 | -59.524 | 20.000 |
| 50201 Rentuinntøkur av innistandandi *) | -25.800 | -79.724 | 53.924 | -25.800 |
| | ***-5.800*** | ***-200*** | ***-5.600*** | ***-5.800*** |
| 50201 Rentuinntøkur av innistandandi **) | 7.900 | - | - | 6.159 |
| 50204 Aðrar rentur | -1.000 | - | - | -387 |
| 50210 Yvirskot frá Danmarks Nationalbank | -6.000 | | | -5.188 |
| | **-4.900** | **-** | **-** | **-5.216** |
| **Høvuðskontur á grein 80 Rentur** | | | | |
| 50102 Frávik fyri rentuútreiðslur | - | - | 59.524 | 59.524 |
| 50202 Frávik fyri rentuinntøkur | - | - | -53.924 | -53.924 |
| | **-** | **-** | **5.600** | **5.600** |

*) Undirkonta 01. Rentur av innistandandi – **) Undirkonta 02. Samsýning til Landsbankan

### 2.8.1 Rentur at gjalda (ógreinað játtan) 20.50.1.01

Í fíggjarlógini eru játtaðar eru 20 mió.kr. Bókaðar eru 20 mió.kr. Útreiðslurnar á kontuni eru tó 79,5 mió.kr. Munurin á 59,5 mió.kr. er fluttur á kontu 80.50.1.02 “Frávik fyri rentuútreiðslur”, sum er bólkað undir RLÚ II.

### 2.8.2 Rentuinntøkur av innistandandi (ógreinað játtan) 20.50.2.01

Í fíggjarlógini eru játtaðar 17,9 mió.kr. í nettoinntøku; 25,8 mió.kr. í inntøkum og 7,9 mió.kr. í útreiðslum. Minninýtslan er 1,7 mió.kr.

Býtt á undirkontu, vísir landsroknskapurin:

*t.kr.*

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 01. Rentur av innistandandi | -25.800 | -25.800 | 0 |
| 02. Samsýning til Landsbankan | 7.900 | 6.159 | -1.741 |
| **Tilsamans** | **-17.900** | **-19.641** | **-1.741** |

Á kontu 01. “Rentur av innistandandi” eru inntøkurnar 79,7 mió.kr. Munurin á 53,9 mió.kr. er fluttur á kontu 80.50.2.02 “Frávik fyri rentuinntøkur”, sum er bólkað undir RLÚ II.

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at metingar av rentuútreiðslunum og rentuinntøkunum frá Fígging landsins, nú Landsbankin, vóru grundarlag bæði fyri játtan og roknskapi 2017. Frávikini í mun til játtan, serstakliga vegna órealiseraðar kursbroytingar, eru skásett sum óvanligar inntøkur ella útreiðslur á § 80 “Rentur” undir RLÚ 2 og ávirka sostatt ikki RLÚ 1.

### 2.8.3 Aðrar rentur (Ógreinað játtan) 20.50.2.04

Í fíggjarlógini er 1 mió.kr. játtað. Minniinntøkan er 613 t.kr. Játtanin er til rentuinntøkur frá pørtum av útlánum landskassans, t.d. stuðulslánum, serlánum og kurslánum.

### 2.8.4 Útgoldið yvirskot frá Danmarks Nationalbank (ógreinað játtan) 20.50.2.10

Í fíggjarlógini eru játtaðar 6 mió.kr. Minniinntøkan er 812 t.kr. Føroyski landskassin fær part av yvirskotsveitingini. Parturin verður roknaður sum lutfallið millum føroyska seðlaumfarið og alt seðlaumfarið í ríkinum við ársenda. Ringt er at meta um upphæddina í fíggjarlógini, tí rakstrarúrslit Nationalbankans verður broytt av, at lánsbrøv, gjaldoyra, gull o.a. verða kursjavnað við ársenda.

### 2.8.5 Frávik fyri rentuútreiðslur 80.50.1.02

Í fíggjarlógini er ongin játtan. Útreiðslurnar eru 59,5 mió.kr. Meirnýtslan er tí 59,5 mió.kr. Upphæddin er flutt frá kontu 20.50.1.01 "Rentur at gjalda".

### 2.8.6 Frávik fyri rentuinntøkur 80.50.2.02

Í fíggjarlógini er ongin játtan. Inntøkurnar eru 53,9 mió.kr. Meirinntøkan er tí 53,9 mió.kr. Upphæddin er flutt frá kontu 20.50.2.01 "Rentuinntøkur av innistandandi".

# 3 Fiskivinnumál

Yvirlitið niðanfyri vísir meir-/minninýtslu á høvuðskontum undir fiskivinnumálum.

*t.kr.*

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Meir-nýtsla | Minni-nýtsla |
|---|---|---|---|---|
| Fiskimálaráðið (Rakstrarj.) | 14.118 | 14.205 | 87 | |
| Tilbúgvingarætlan (Løguj.) | 1.500 | 1.431 | | 69 |
| Stuðul til bjargingarfeløg (Stuðulsj.) | 2.000 | 2.000 | | 0 |
| Tilbúgving á sjógvi (Rakstrarj.) | 11.900 | 11.685 | | 215 |
| Veðurtænastan (Rakstrarj.) | 4.400 | 4.257 | | 143 |
| Tyrlutænasta (Rakstrarj.) | 30.100 | 30.100 | | 0 |
| Landbúnaðarroyndir og -ráðgeving (Rakstrarj.) | 2.900 | 3.637 | 737 | |
| Búnaðarstovan (Rakstrarj.) | 3.000 | 3.222 | 222 | |
| Landbúnaðarstuðul (Stuðulsj.) | 16.300 | 16.238 | | 62 |
| Almenn jørð, søla (Løguj.) | 0 | 3.478 | 3.478 | |
| Fiskivinnuráð og nevndir (Rakstrarj.) | 440 | 377 | | 63 |
| Upplýsing um grind (Rakstrarj.) | 220 | 205 | | 15 |
| Hvalagransking og hvalateljing v.m. (Rakstrarj.) | 1.080 | 1.265 | 185 | |
| Fiskiveiðieftirlitið (Rakstrarj.) | 40.900 | 39.988 | | 912 |
| Havstovan (Rakstrarj.) | 14.350 | 14.375 | 25 | |
| Útgerð til Magnus Heinason (Rakstrarj.) | 600 | 600 | | 0 |
| Magnus Heinason (Rakstrarj.) | 10.800 | 10.799 | | 1 |
| Nýtt havrannsóknarskip (Løguj.) | 16.911 | 16.911 | | 0 |
| Fiskivinnuroyndir (Rakstrarj.) | 8.600 | 8.677 | 77 | |
| Flutningsstuðul (Lógarb. j.) | 2.900 | 2.217 | | 683 |
| Útlán (Stuðulsj.) | 0 | -21 | | 21 |
| Effektivar veðhaldsútreiðslur (Stuðulsj.) | -100 | -50 | 50 | |

## 3.1 Meirnýtsla/frávik

### 3.1.1 Fiskimálaráðið (rakstrarjáttan.) 5.11.1.05
Í fíggjarlógini eru játtaðar 14,1 mió.kr. Meirnýtslan er 87 t.kr.

### 3.1.2 Landbúnaðarroyndir og -ráðgeving (rakstrarjáttan) 5.33.2.01
Í fíggjarlógini eru játtaðar 2,9 mió.kr. Meirnýtslan er 737 t.kr. Høvuðskontan hevur tríggjar undirkontur.

*t.kr.*

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Vanligt virksemi | 2.900 | 3.248 | -348 |
| 40. Inntøkufíggjað virksemi | 0 | 246 | -246 |
| 45. Stuðulsfíggjað virksemi | 0 | 143 | -143 |
| **Tilsamans** | **2.900** | **3.637** | **-737** |

Sambært §§ 6b og 6c, stk. 2, í Ll. nr. 34/2013 “um Búnaðargrunn” kann Búnaðarstovan eftir umbøn fáa pening úr Búnaðargrunninum. Í 2017 eru 280 t.kr. goldnar úr Búnaðargrunninum,

og upphæddin er inntøkuførd á høvuðskontu 55.33.2.12 “Niðurlaging av Búnaðargrunninum”. Landsstýrismaðurin vísir á, at veruliga meirnýtslan á undirkontu 20 er tí 68 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum stavar hallið á undirkontunum 40 og 45 frá verkætlanum, har inntøkurnar koma í 2018 og 2019. Frameftir verða allar verkætlanir bókaðar á undirkontu 45.

### 3.1.3 **Búnaðarstovan** (rakstrarjáttan) 5.33.2.03

Í fíggjarlógini eru játtaðar 3 mió.kr. Meirnýtslan er 222 t.kr. Sambært landsstýrismanninum er orsøkin óvæntaðar útreiðslur, so sum av leka í vatnrøri og øðrum brádliga íkomnum brekum á bygninginum, umframt advokatútreiðslur til sakarmál.

### 3.1.4 **Almenn jørð, søla** (løgujáttan) 5.33.2.11

Í fíggjarlógini eru játtaðar 10 mió.kr. í inntøkum og 10 mió.kr. í útreiðslum. Meirnýtslan er 3,5 mió.kr. Býtt á standardkontu, vísir landsroknskapurin:

*t.kr.*

| Standardkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 0 | -59 | 59 |
| 29. Ymsar rakstrarinntøkur | 0 | -1.129 | 1.129 |
| 42. Søla av løgu o.ø. | -10.000 | -8.874 | -1.126 |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 10.000 | 13.540 | -3.540 |
| **Tilsamans** | **0** | **3.478** | **-3.478** |

Sambært landsstýrismanninum er orsøkin til meirnýtsluna tíðaravmarking tvørtur um ár. Peningur fyri sølu av landsjørð kemur inn á kontu í landskassanum. Síðani verður málið viðgjørt á Búnaðarstovuni, sum flytur peningin á festikontu í Búnaðargrunninum. Tí kann inntøkan verða skrásett ein mánað og útreiðslan í næsta mánað. Eitt nú vórðu 6,1 mió.kr. í inntøkum skrásettar í desember 2016 og útreiðslur 6,3 mió.kr. vórðu skrásettar í januar 2017.

### 3.1.5 **Hvalagransking og hvalateljing v.m.** (rakstrarjáttan) 5.34.1.05

Í fíggjarlógini er játtað 1,1 mió.kr. Meirnýtslan er 185 t.kr. Sambært landsstýrismanninum er játtanin til hvalagransking til virksemi á Tjóðsavninum. Stjórin á Tjóðsavninum metir, at tað krevst ein biologassistentur fulla tíð afturat granskaranum fyri at reka virksemið. Játtanin røkkur ikki til tvær lønir umframt útgerð. Harafturat hevur Tjóðsavnið tapt eitt sakarmál, og sakarmálsútreiðslurnar eru goldnar av kontuni.

### 3.1.6 **Havstovan** (rakstrarjáttan) 5.34.3.01

Í fíggjarlógini eru játtaðar 14,4 mió.kr. Meirnýtslan er 25 t.kr.

### 3.1.7 **Fiskivinnuroyndir** (rakstrarjáttan) 5.34.3.07

Í fíggjarlógini eru játtaðar 8,6 mió.kr. Meirnýtslan er 77 t.kr.

### 3.1.8 **Effektivar veðhaldsútreiðslur** (stuðulsjáttan) 5.34.5.07

Í fíggjarlógini eru játtaðar 100 t.kr. í inntøkum. Minninntøkurnar eru 50 t.kr. Býtt á standardkontu, vísir landsroknskapurin:

*t.kr.*

| Standardkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 53. Stuðul til vinnu | 0 | 18.407 | -18.407 |
| 86. Afturgjaldan av útlánum v.m. | -100 | -18.457 | 18.357 |
| **Tilsamans** | **-100** | **-50** | **-50** |

Sambært viðmerkingunum í fíggjarlógini fatar útreiðslujáttanin um tær veðhaldsskyldur, sum landskassin hevur í fiskiskipum. Inntøkujáttanin er afturgjald til landskassan fyri goldnar borganir.

Í veruleikanum er talan um, at tær 18,4 mió.kr. eru avskrivaðar í 2017. Við árslok 2017 var samlaða eftirstøðan 110 mió.kr., og sambært Gjaldstovuni er bert goldið inn á eitt lán seinastu fimm árini, tilsamans slakar 277 t.kr.

## 3.2 Minninýtsla/frávik

### 3.2.1 Stuðul til bjargingarfeløg (stuðulsjáttan) 5.31.1.05

Í fíggjarlógini eru játtaðar 2 mió.kr. Tær verkætlanir og tiltøk, sum eru stuðlað í 2017, eru:

*kr.*

| Goldið til: | |
|---|---|
| Landsfelag fyri bjargingarfeløg, viðlíkahald av bátum | 1.000.000 |
| Landsfelag fyri bjargingarfeløg, rakstrarstuðul 2017 | 270.000 |
| Landsfelag fyri bjargingarfeløg, til: | 263.768 |
| *- Suðuroyar Sunnara Bjargingarfelag, útgerð til bil 17.463 kr.* | |
| *- Suðuroyar Norðara Bjargingarfelag, garasjuportur í Agnavík, 35.410 kr.* | |
| *- Havnar Bjargingarfelag, umvæling av felagshúsinum, 210.895 kr* | |
| Landsfelag fyri bjargingarfeløg, Bjargingarbilur til Eiðis, stuðul | 149.000 |
| Landfelag fyri bjargingarfeløg, Høli til Suðuroyar Norð. Bjargingarfelag, stuðul | 120.000 |
| Norðoya Bjargingarfelag, stuðul keyp at arbeiðsbili | 100.000 |
| P/f Trygd, gjald fyri arbeiðsskaðatrygging | 67.232 |
| Norðoya Bjargingarfelag, rakstrarstuðul 2017 | 30.000 |

### 3.2.2 Tilbúgving á sjógvi (rakstrarjáttan) 5.31.1.06

Í fíggjarlógini eru játtaðar 11,9 mió.kr. Minninýtslan er 215 t.kr. Høvuðskontan hevur tvær undirkontur.

*t.kr.*

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Neyð- og Trygdartænasta (Tórshavn Radio) | 5.912 | 5.977 | -65 |
| 21. Sjóbjargingarstøðin (MRCC) | 5.988 | 5.708 | 280 |
| **Tilsamans** | **11.900** | **11.685** | **215** |

### 3.2.3 Veðurtænastan (rakstrarjáttan.) 5.31.1.07

Í fíggjarlógini eru játtaðar 4,4 mió.kr. Minninýtslan er 143 t.kr.

### 3.2.4 Tyrlutænasta (rakstrarjáttan) 5.31.1.08

Í fíggjarlógini eru játtaðar 30,1 mió.kr. Játtanin er til partin, sum Fiskimálaráðið skal gjalda Atlantsflogi fyri ta tyrlutænastu, sum verður veitt sambært sáttmála við felagið. Parturin hjá Samferðslumálaráðnum (Strandfaraskip Landsins), 14,3 mió.kr., verður goldin av høvuðskontu 17.38.2.04. Samlaða gjaldið fyri sáttmálan er 44,4 mió.kr. um árið.

### 3.2.5 Landbúnaðarstuðul (stuðulsjáttan) 5.33.2.10

Í fíggjarlógini eru játtaðar 16,3 mió.kr. Minninýtslan er 62 t.kr. Játtanin er greinað í fleiri undirkontur:

*t.kr.*

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 01. Mjólk | 7.220 | 7.221 | -1 |
| 02. Neytakjøt | 500 | 525 | -25 |
| 03. Seyðakjøt | 1.700 | 1.692 | 8 |
| 04. Stráfóður | 5.080 | 5.080 | 0 |
| 07. Húsdýralógin | 70 | 49 | 21 |
| 08. Avloysaraskipan | 480 | 480 | 0 |
| 10. Føroysk húsdjór | 250 | 250 | 0 |
| 11. Grønmetisframleiðsla | 400 | 400 | 0 |
| 12. Seyðakanningar | 600 | 541 | 59 |
| **Tilsamans** | **16.300** | **16.238** | **62** |

### 3.2.6 Fiskiveiðieftirlitið (rakstrarjáttan) 5.34.2.01

Í fíggjarlógini eru játtaðar 40,9 mió.kr. Minninýtslan er 912 t.kr. Sambært Fiskimálaráðnum er játtanin til Vørn lutfalsliga stór. Tískil metir stjórin á Vørn, at tað er neyðugt at halda aftur alla tíðina, um vandi ikki skal vera fyri meirnýtslu. Sambært stjóranum á Vørn stavar minninýtslan í 2017 mest av, at tað var trupult at meta um fíggjarligu avleiðingarnar av fiskivinnunýskipanini.

Stovnurin hevði gjørt seg út til at gera neyðugar broytingar í samsvari við nýggju lógina um fyrisiting av sjófeingi, men lógin varð samtykt so mikið seint, at tað ikki var møguligt at gera tillagingar í rakstrinum. Tíverri kemur hetta hinvegin at tyngja raksturin í 2018 óneyðugt.

### 3.2.7 Útgerð til Magnus Heinason (rakstrarjáttan) 5.34.3.03

Í fíggjarlógini eru játtaðar 600 t.kr. Øll upphæddin er flutt á høvuðskontu 5.34.3.04 “Magnus Heinason”, har útreiðslurnar til at reka Magnus Heinason verða skrásettar.

### 3.2.8 Magnus Heinason (rakstrarjáttan) 5.34.3.04

Í fíggjarlógini eru játtaðar 10,8 mió.kr. Minninýtslan er undir 1 t.kr.

### 3.2.9 Nýtt havrannsóknarskip (løgujáttan) 5.34.3.06

Í fíggjarlógini eru játtaðar 9,5 mió.kr., og 9,5 mió.kr. vórðu fluttar frá farna fíggjarári. Nýttar vórðu 16,9 mió.kr., og 2,1 mió.kr. eru við átekning fluttar til 2018.

### 3.2.10 Flutningsstuðul (lógarbundin játtan) 5.34.4.22

Játtaðar eru 2,9 mió.kr. Minninýtslan er 683 t.kr. Upprunaliga var játtanin 2,2 mió.kr. Í eykajáttanarlógini fyri august 2017-5 varð játtanin hækkað 700 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum hækkaðu útreiðslurnar til flutningsstuðulin í 2016, tá Høvdavirkið í Leirvík lat aftur. Høvdavirkið byrjaði tó aftur á heysti 2017, aftaná at Trygdargrunnurin hevði fingið eykjajáttan, og tí er frávik millum játtanina og nýtsluna á flutningsstuðlinum.

### 3.2.11 Niðurlaðing av Búnaðargrunninum (stuðulsjáttan) 55.33.2.12

Í fíggjarlógini eru játtaðar 4,8 mió.kr. í inntøkum. Roknskapurin vísir 4,6 mió.kr.

Sambært Ll. nr. 34/2013 skal Búnaðargrunnurin í 6 ár fram til 2017 flyta 4,1 mió.kr. um árið til Búnaðarstovuna at nýta til *“studning til egið framleitt stráfóður”*. Stuðulin verður umsitin av Búnaðarstovuni eftir reglunum í Ll. nr. 32/2003 “um landbúnaðarstuðul” og verður hildin av játtanini á høvuðskontu 5.33.2.10.

### 3.2.12 Flyting til Fiskivinnugrunn (stuðulsjáttan) 55.34.3.09

Í eykajáttanarlóg fyri august 2017-5 eru játtaðar 6 mió.kr. í inntøkum. Sambært Ll. nr. 71/2017 “um Fiskivinnugrunn” verða 6 mió.kr. settar í Fiskivinnugrunn, harav 3 mió.kr. sum stovnsfæ.

Landsroknskapurin vísir, at 6 mió.kr. eru fluttar í grunnin. Grunnurin er í landsroknskapinum skrásettur sum “eksternur grunnur”. (Fiskivinnugrunnurin, stovnsnummar 006065).

# 4 Mentamál

Yvirlitið niðanfyri vísir meir-/minninýtslu á høvuðskontum undir mentamálum.

*t.kr.*

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Meir-nýtsla | Minni-nýtsla |
|---|---|---|---|---|
| Mentamálaráðið (Rakstrarj.) | 20.167 | 20.055 | | 112 |
| Studni (Rakstrarj.) | 3.332 | 3.301 | | 31 |
| Skúlabókagerð (Rakstrarj.) | 512 | 490 | | 22 |
| Nám (Rakstrarj.) | 14.246 | 14.231 | | 15 |
| Barnabløð (Stuðulsj.) | 253 | 253 | | 0 |
| Barnabókaútgáva (Stuðulsj.) | 2.031 | 2.031 | | 0 |
| Próvtøkur (Rakstrarj.) | 13.744 | 12.466 | | 1.278 |
| Meginfelag føroyskra studenta (Stuðulsj.) | 181 | 181 | | 0 |
| Næmingaheim (Stuðulsj.) | 60 | 60 | | 0 |
| Fólkaskúlin (Rakstrarj.) | 311.670 | 312.116 | 446 | |
| Sernám (Rakstrarj.) | 72.867 | 72.976 | 109 | |
| Stuðul til fólkaskúlar (Stuðulsj.) | 8.280 | 7.587 | | 693 |
| Skúlatilboð til ung við breki (Rakstrarj.) | 3.856 | 3.897 | 41 | |
| Eftirskúlar (Stuðulsj.) | 200 | 0 | | 200 |
| Miðnámsútbúgvingar (Rakstrarj.) | 213.880 | 210.027 | | 3.853 |
| Tekniski skúli í Klaksvík (Løguj.) | 0 | 0 | | 0 |
| Skúladepil við Marknagil (Løguj.) | 117.620 | 117.620 | | 0 |
| Ferðavinnuútbúgving (Rakstrarj.) | 600 | 349 | | 251 |
| Fab Lab (Rakstrarj.) | 300 | 310 | 10 | |
| Fólkaháskúlar (Stuðulsj.) | 5.333 | 5.324 | | 9 |
| Húsarhaldsskúlar (Stuðulsj.) | 2.233 | 2.197 | | 36 |
| Húsarhaldssk.í Klaksv. løgustuðul (Stuðulsj.) | 400 | 400 | | 0 |
| Frítíðarundirvísing (Rakstrarj.) | 6.082 | 6.082 | | 0 |
| Musikkskúlar (Rakstrarj.) | 13.409 | 13.497 | 88 | |
| Felagið fyri lesi- og skriviveik (Stuðulsj.) | 1.700 | 1.700 | | 0 |
| Maritimir skúlar (Rakstrarj.) | 27.665 | 27.563 | | 102 |
| Fróðskaparsetur Føroya (Løguj.) | 8.000 | 8.003 | 3 | |
| Fróðskaparsetur Føroya (Rakstrarj.) | 88.086 | 88.108 | 22 | |
| Granskingarráð Føroya (Rakstrarj.) | 2.377 | 2.376 | | 1 |
| Granskingargrunnurin (Stuðulsj.) | 7.500 | 7.500 | | 0 |
| ES-granskingarskrá (Stuðulsj.) | 10.500 | 11.604 | 1.104 | |
| Lestrarstuðul (Lógarb. j.) | 127.511 | 124.239 | | 3.272 |
| Lestrarlán (Stuðulsj.) | -3.000 | -3.714 | | 714 |
| Føroyahús í Danmark (Stuðulsj.) | 2.741 | 2.741 | | 0 |
| Tiltøk fyri børn og ung (Stuðulsj.) | - | -23 | | 23 |
| Málráðið (Rakstrarj.) | 1.115 | 1.100 | | 15 |
| Orðabókagerð (Stuðulsj.) | 900 | 900 | | 0 |
| Ymiskir studningar (Stuðulsj.) | 2.800 | 2.754 | | 46 |
| LOA-grunnurin (Stuðulsj.) | 550 | 520 | | 30 |
| Tónl., sangur og før. dansur (Stuðulsj.) | 2.515 | 2.515 | | 0 |
| Filmur (Stuðulsj.) | 2.000 | 1.952 | | 48 |
| Mentanargrunnurin (Stuðulsj.) | 7.800 | 7.800 | | 0 |
| Umsiting av Mentanargrunninum (Rakstrarj.) | 479 | 510 | 31 | |
| Leiklist (Rakstrarj.) | 6.061 | 6.049 | | 12 |
| Tjóðleikhús (Løguj.) | 53 | 53 | | 0 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Norðurlandahúsið (Stuðulsj.) | 1.700 | 1.700 | | 0 |
| Heiðursgávur til mentafólk (Stuðulsj.) | 500 | 495 | | 5 |
| Søvn landsins (Rakstrarj.) | 29.803 | 29.266 | | 537 |
| Søvn landsins (Stuðulsj.) | 7.603 | 7.302 | | 301 |
| Hvalastøðin við Áir (Løguj.) | 1.000 | 998 | | 2 |
| Krígssavn (Stuðulsj.) | 200 | 200 | | 0 |
| Listasøvn (Rakstrarj.) | 2.234 | 2.265 | 31 | |
| Kirkjubømúrurin (Løguj.) | 1.300 | 1.280 | | 20 |
| Kringvarp Føroya (Løguj.) | - | - | | 0 |
| Kringvarp Føroya (Rakstrarj.) | -1.600 | -1.719 | | 119 |
| Stuðul til framl. av før. loftmiðlatilfari (Stuðulsj.) | 585 | 540 | | 45 |
| Miðlastuðul (Stuðulsj.) | 2.000 | 2.000 | | 0 |
| Studningur til Kirkjugrunnin (Stuðulsj.) | 9.000 | 9.000 | | 0 |
| Føroyskt kirkjumál (Stuðulsj.) | 250 | 250 | | 0 |
| Ítróttasamband Føroya (Stuðulsj.) | 10.450 | 10.450 | | 0 |
| Hugasamband Føroya (Stuðulsj.) | 1.050 | 1.050 | | 0 |
| Ítróttarhøll á Sandoynni (Løguj.) | 485 | 496 | 11 | |
| Kringvarpssendistøðir (Rakstrarj.) | 5.270 | 5.270 | | 0 |

## 4.1 Meirnýtsla/frávik

Sambært landsstýrismanninum stavar meirnýtslan hjá Fólkaskúlanum, Sernámi, Skúlatilboði til ung við breki, Musikkskúlanum og helvtin av meirnýtsluni hjá Fróðskaparsetrinum frá lønarhækkingini, sum var 2,3% frá 1. oktober 2017. Ongin eykajáttan var latin til hesa hækking í 2017.

### 4.1.1 Fólkaskúlin (rakstrarjáttan) 7.23.2.01

Játtaðar eru 311,7 mió.kr. Meirnýtslan er 446 t.kr. Upprunaliga var játtanin 312,2 mió.kr. Í eykajáttanarlógini fyri august 2017-5 varð játtanin lækkað 500 t.kr.

### 4.1.2 Sernám (rakstrarjáttan) 7.23.2.02

Upprunaliga var játtanin 73,1 mió.kr. Meirnýtslan er 109 t.kr. Í eykajáttanarlógini fyri august 2017-5 varð játtanin lækkað 250 t.kr. Høvuðskontan hevur fýra undirkontur.

*t.kr.*

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Sernám | 13.342 | 14.153 | -811 |
| 21. Sernámsfrøðiligt virksemi í fólkaskúlanum | 39.983 | 39.603 | 380 |
| 22. Sernámsfrøðiliga skipanin | 4.754 | 4.547 | 207 |
| 23. Skúlin á Trøðni | 14.788 | 14.673 | 115 |
| **Tilsamans** | **72.867** | **72.976** | **-109** |

### 4.1.3 Skúlatilboð til ung við breki (rakstrarjáttan) 7.23.2.06

Í fíggjarlógini eru játtaðar 3,9 mió.kr. Meirnýtslan er 41 t.kr.

### 4.1.4 Tekniski skúli í Klaksvík (løgujáttan) 7.23.3.07

Ongin játtan er í 2017. Roknskapurin vísir 0 kr., tó at fleiri bókingar eru í árinum. Við árslok 2016 stóðu 1.651 t.kr. støðlaðar sum stuttfreistað skuld í fíggjarstøðuni. Í 2017 eru 1.410 t.kr. brúktar av støðlaðu upphæddini. Við árslok 2017 stóðu tí 241 t.kr. í fíggjarstøðuni.

### 4.1.5 Skúladepil við Marknagil (løgujáttan) 7.23.3.09

Í fíggjarlógini eru játtaðar 95 mió.kr., og 3,9 mió.kr. vórðu fluttar frá farnum fíggjarárum. Í eykajáttanarlógini fyri august 2017-5 varð játtanin hækkað 50 mió.kr. Nýttar vórðu 117,6 mió.kr., og 31,3 mió.kr. eru við átekning fluttar til 2018.

Verkætlanin er gjørd við heimild í verklagslóg, Ll. nr. 43/2008 "um at byggja skúladepil í Tórshavn". Sambært verklagslógini kunnu byggiútreiðslurnar í mesta lagi verða 636,5 mió.kr., íroknað innbúgv og útgerð, harav 86,6 mió.kr. eru avsettar til fíggjarligt útlegg hjá Landsverki. Verklagslógin fer úr gildi 31. desember 2018.

*t.kr.*

| Ár | Játtan | Nýtsla | Framflutt |
|---|---|---|---|
| 2008 | 2.000 | 1.114 | - |
| 2009 | 5.000 | 5.007 | - |
| 2010 | 23.000 | 20.317 | 2.680 |
| 2011 | 36.500 | 13.953 | 25.227 |
| 2012 | 55.000 | 4.352 | 75.875 |
| 2013 | 41.500 | 52.509 | 64.866 |
| 2014 | 85.000 | 136.013 | 13.853 |
| 2015 | 155.000 | 88.690 | 80.163 |
| 2016 | 24.000 | 100.273 | 3.890 |
| 2017 | 145.000 | 117.620 | 31.270 |
| 2018 | 63.500 | | |
| **Tilsamans** | **635.500** | **539.848** | **-** |

Í sambandi við verkætlanina hevur Landsverk fingið krav ímóti sær og hevur sett fram mótkrav. Ósemjan er løgd fyri ein gerðarrætt.

Spurdur, hvussu gongur við gerðarrættarmálinum, hevur landsstýrismaðurin greitt soleiðis frá: *"Til tað svarar Landsverk: Vit kunnu ikki vænta, at sýn og metingar frágreiðingin fyriliggja fyrr enn møguliga einaferð seinni í heyst. Roknast kann ikki við, at viðgerðin í gerðarrættinum byrjar fyrr enn einaferð í 2019. Tað ber ikki til at siga, hvussu langa tíð, gerðarrætturin skal brúka fyri at koma til eina niðurstøðu. Hetta er eitt stórt gerðarrættarmál, og tí skal ikki roknast við einari skjótari avgerð".*

### 4.1.6 Fab Lab (rakstrarjáttan) 7.23.3.13

Í fíggjarlógini eru játtaðar 300 t.kr. Meirnýtslan er 10 t.kr.

### 4.1.7 Musikkskúlar (rakstrarjáttan) 7.23.5.10

Í fíggjarlógini eru játtaðar 13,4 mió.kr. Meirnýtslan er 88 t.kr.

### 4.1.8 Fróðskaparsetur Føroya (løgujáttan) 7.23.6.15

Í fíggjarlógini eru játtaðar 8 mió.kr. Játtanin er til universitetskampus til Fróðskaparsetur Føroya. Í 2016 vórðu játtaðar 8 mió.kr. til, at Fróðskaparsetur Føroya skuldi yvirtaka Venjingarskúlan, soleiðis at Setrið kundi brúka allan bygningin. Játtanin var eisini ætlað til fyrireikingararbeiðið at skipa universitetskampus á Frælsinum. Í eykajáttanarlóg fyri september 2016 varð játtanin lækkað úr 8 mió.kr. í 1,5 mió.kr. Í fíggjarlógini 2018 eru játtaðar 5 mió.kr. til universitetskampus.

Hesi trý árini eru játtaðar tilsamans 14,5 mió.kr. til universitetskampus, uttan at nøkur verklags-lóg er løgd fyri Løgtingið.

Landsgrannskoðanin heldur, at játtanin er ikki í samsvari við reglurnar í § 4, stk. 1, í K.nr. 83/2011 "um løgujáttan", sum ásetir, at størri løguverkætlanir upp á 10 mió.kr. ella meira skulu gerast við grundarlagi í einari verklagslóg. Sambært viðmerkingunum til játtanarskipanina skulu størri løguverkætlanir, sum fata um fleiri ár, sum meginregla verða framdar, grundað á eina serstaka verklagslóg, fyri at tryggja, at so týdningarmikil øki fáa nøktandi viðgerð í Løgtinginum.

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at tá ið farið varð undir at innrætta Sjóvinnuhúsið í 2017, varð mett, at samlaði kostnaðurin av løguverkætlanini fór at verða minni enn 10 mió.kr. Uttan innbúgv, útgerð og tól er samlaði kostnaðurin 10.059 t.kr.

### 4.1.9 Fróðskaparsetur Føroya (rakstrarjáttan) 7.23.6.16

Játtaðar eru 88,1 mió.kr. Meirnýtslan, sambært landsroknskapinum, er 22 t.kr. Upprunaliga var játtanin 87,2 mió.kr. Í eykajáttanarlógini fyri august 2017 varð játtanin hækkað 900 t.kr.

Fróðskaparsetrið hevur skrásett húsaleigu fyri september, oktober, november og desember 2017 fyri Sjóvinnuhúsið, samanlagt 1.016 t.kr., á fíggjarárið 2018. Í veruleikanum er meirnýtslan tí góða 1 mió.kr. í 2017.

### 4.1.10 ES-granskingarskrá (stuðulsjáttan) 7.23.6.24

Í fíggjarlógini eru játtaðar 10,5 mió.kr. Meirnýtslan er 1,1 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum í mentamálum eru tær mest týðandi fortreytirnar fyri ES-limagjaldinum øðrumegin, hvør endaliga fíggjarætlanin fyri Horizon-verkætlanina er, og hinumegin lutfallið í bruttotjóðarúrtøkuni millum ES og Føroyar.

Landsstýrismaðurin hevur kunnað um, at tað øll árini hevur verið trupult at fáa ES at gera framskrivingar av limagjaldinum. Tí hevur fíggjarlógin verðið gjørd við støði í einari meting av roknskapartølunum undanfarnu árini og búskaparligu útlitunum fyri framman. Avbjóðingin hevur verið, at Mentamálaráðið fær ikki rokning fyri limagjaldið fyrr enn í januar, og kennir ráðið tástaðni møgulig frávik.

Sí eisini notat, sum Landsgrannskoðanin lat løgtingsgrannskoðarunum í mars 2018.[1]

### 4.1.11 Umsiting av Mentanargrunninum (rakstrarjáttan) 7.24.2.05

Í fíggjarlógini eru játtaðar 479 t.kr. Meirnýtslan er 31 t.kr.

### 4.1.12 Listasøvn (rakstrarjáttan) 7.24.3.22

Í fíggjarlógini eru játtaðar 2,2 mió.kr. Meirnýtslan er 31 t.kr. Sambært landsstýrismanninum kom meirnýtslan í høvuðsheitum av, at Listasavn Føroya hevur umvælt takið á savninum. Leggjast kann afturat, at Listasavnið hevur fingið 250 t.kr. í gávum úr útlandinum, sum ikki varð roknað við í fíggjarlógini.

### 4.1.13 Ítróttarhøll á Sandoynni (løgujáttan) 7.24.6.13

Í fíggjarlógini eru játtaðar 485 t.kr. Meirnýtslan er 11 t.kr.

### 4.1.14 Kringvarpssendistøðir (rakstrarjáttan) 7.38.3.07

Játtaðar eru 5,3 mió.kr. Ongin meirnýtsla var. Upprunaliga var játtanin 4,1 mió.kr. Við eykajáttanarlóg fyri august 2017 varð játtanin hækkað 1,2 mió.kr.

Upphæddin er goldin P/f FT Net til rakstur av sendinetinum.

## 4.2 Minninýtsla/frávik

### 4.2.1 Barnabløð (stuðulsjáttan) 7.23.1.22

Í fíggjarlógini eru játtaðar 253 t.kr. Øll játtanin er latin Bókadeild Føroya Lærarafelags fyri at geva út barnablað, soleiðis sum ásett er í viðmerkingunum í fíggjarlógini.

### 4.2.2 Barnabókaútgáva (stuðulsjáttan) 7.23.1.25

Í fíggjarlógini eru játtaðar 2 mió.kr. Øll játtanin er latin Bókadeild Føroya Lærarafelags, soleiðis sum ásett er í viðmerkingunum í fíggjarlógini.

[1] Frágreiðing um gjald av ES-granskingarpeningi fyri 2017.
http://logting.fo/files/casewrittenproposal/137/Vidm%20ES%20granskingarpengar%202017.pdf

### 4.2.3 Próvtøkur (rakstrarjáttan.) 7.23.1.31

Játtaðar eru 13,7 mió.kr. Minninýtslan er 1,3 mió.kr. Upprunaliga var játtanin 10,9 mió.kr. Í eykajáttanarlógini fyri august 2017-5 varð játtanin hækkað 2,9 mió.kr. Sambært landstýrismanninum er orsøkin til minninýtsluna í høvuðsheitum, at:

- nýggi sáttmálin hjá yrkisfelagnum Miðnám einans ávirkaði lønargjaldið til uppgávugerð og ikki til próvdøming av skrivligum uppgávum,
- færri sjúkrapróvtøkur vórðu, enn lagt var upp fyri, og at
- lægri útreiðslur vóru til aðrar hægri útbúgvingar enn upprunaliga mett; sambært landsstýrismanninum er trupult at meta um tað virksemið.

### 4.2.4 Meginfelag føroyskra studenta, MFS (stuðulsjáttan) 7.23.1.37

Í fíggjarlógini eru játtaðar 181 t.kr. Stuðulin er goldin Meginfelag føroyskra studenta.

### 4.2.5 Stuðul til fólkaskúlar (stuðulsjáttan) 7.23.2.03

Í fíggjarlógini eru játtaðar 8,3 mió.kr. Minninýtslan er 693 t.kr. Sambært landstýrismanninum er orsøkin til minninýtsluna, at minni virksemi var í privatu skúlunum enn upprunaliga mett, og færri umsóknir vóru um stuðul til føroyskar skúlar uttanlands.

Høvuðskontan hevur tríggjar undirkontur.

*t.kr.*

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 02. Skúlabarnaflutningur | 1.530 | 1.807 | -277 |
| 03. Privatir skúlar | 6.675 | 5.780 | 895 |
| 04. Føroyskir skúlar uttanlands | 75 | 0 | 75 |
| **Tilsamans** | **8.280** | **7.587** | **693** |

### 4.2.6 Eftirskúlar (stuðulsjáttan) 7.23.2.10

Játtaðar eru 200 t.kr. Minninýtslan er 200 t.kr. Upprunaliga var játtanin 400 t.kr. Í eykajáttanarlógini fyri august 2017 varð játtanin lækkað 200 t.kr.

### 4.2.7 Miðnámsútbúgvingar (rakstrarjáttan) 7.23.3.05

Í fíggjarlógini eru játtaðar 213,9 mió.kr. Minninýtslan er 3,9 mió.kr. Høvuðskontan hevur fleiri undirkontur.

*t.kr.*

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 22. Klaksvíkar HF-skeið | 4.100 | 4.097 | 3 |
| 23. Miðnámsskúlin í Suðuroy | 11.800 | 12.698 | -898 |
| 26. Tekniski skúli í Klaksvík | 22.500 | 22.498 | 2 |
| 27. Miðnám í Vestmanna | 6.000 | 5.923 | 77 |
| 28. Felags fyri miðnámsskúlar | 7.330 | 2.763 | 4.567 |
| 30. Heilsuskúli Føroya | 5.650 | 5.566 | 84 |
| 31. Glasir, Skúladepilin í Marknagili | 115.000 | 114.991 | 9 |
| 32. Miðnám á Kambsdali | 41.500 | 41.489 | 11 |
| 40. Miðnám í Vestmanna, inntøkufíggjað virksemi | 0 | 2 | -2 |
| **Tilsamans** | **213.880** | **210.027** | **3.853** |

Sambært landsstýrismanninum er orsøkin til minninýtsluna í høvuðsheitum minninýtsla á undirkontuni "Felags fyri miðnámsskúlar". Undirkontan er ætlað til ymiskar verkætlanir á miðnámsútbúgvingarøkinum, umframt annað royndar- og menningarvirksemi, og til m.a. vikarlønir í sambandi við langtíðarsjúku, sernámsfrøðiligan stuðul, pedagogikum og útbúgvingar innan serliga skipað miðnám, sum skúlarnir fáa endurgoldið. Samanumtikið hevur virksemið innan hesi øki verið minni enn ætlað.

### 4.2.8 Ferðavinnuútbúgving (rakstrarjáttan) 7.23.3.11

Játtaðar eru 600 t.kr. Minninýtslan er 251 t.kr. Upprunaliga var játtanin eina mió.kr. Í eykajáttanarlógini fyri august 2017 varð játtanin lækkað 400 t.kr. Sambært Mentamálaráðnum setti landsstýrismaðurin ein arbeiðsbólk at gera tilmæli um ferðavinnuútbúgving. Arbeiðsbólkurin handaði tilmælið í mai 2017. Undirvísingarvirksemið fór ikki í gongd fyrr enn í heysthálvuni, og er tað orsøkin til minninýtsluna.

### 4.2.9 Fólkaháskúlar (stuðulsjáttan) 7.23.5.01

Í fíggjarlógini eru játtaðar 5,3 mió.kr. Minninýtslan er 9 t.kr. Høvuðskontan hevur tvær undirkontur.

*t.kr.*

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Føroya Fólkaháskúli | 2.653 | 2.644 | 9 |
| 21. Ítróttaháskúlin í Suðuroy | 2.680 | 2.680 | 0 |
| **Tilsamans** | **5.333** | **5.324** | **9** |

### 4.2.10 Húsarhaldsskúlar (stuðulsjáttan) 7.23.5.04

Í fíggjarlógini eru játtaðar 2,2 mió.kr. Minninýtslan er 36 t.kr. Játtanin er til rakstrarstuðul til Húsarhaldsskúla Føroya í Klaksvík og til næmingstuðul.

### 4.2.11 Húsarhaldsskúlin í Klaksvík, løgustuðul (stuðulsjáttan) 7.23.5.05

Í fíggjarlógini eru játtaðar 400 t.kr. Upphæddin er goldin Húsarhaldsskúlanum í mars 2017 at fyrireika byggingina av nýggjum húsarhaldsskúla.

### 4.2.12 Felagið fyri lesi- og skriviveik (stuðulsjáttan) 7.23.5.13

Í fíggjarlógini eru játtaðar 1,7 mió.kr. Upphæddin er goldin felagnum fyri lesi- og skriviveik.

### 4.2.13 Maritimir skúlar (rakstrarjáttan) 7.23.6.05

Játtaðar eru 27,7 mió.kr. Minninýtslan er 102 t.kr. Upprunaliga var játtanin 27,9 mió.kr. Í eykajáttanarlógini fyri august 2017 varð játtanin lækkað 200 t.kr.

### 4.2.14 Lestrarstuðul (lógarbundin játtan) 7.23.7.04

Í fíggjarlógini eru játtaðar 128,4 mió.kr. í útreiðslum og 0,9 mió.kr. í inntøkum. Minninýtslan er tilsamans 3,3 mió.kr. Játtanin hevur fýra undirkontur:

*t.kr.*

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 01. Stuðulsveitingar | 113.781 | 111.857 | 1.924 |
| 03. Studningur til lærupláss | 13.586 | 12.180 | 1.406 |
| 04. Gjald fyri lærusáttmálar | -900 | -1.098 | 198 |
| 05. Ferðaendurgjald til læruplass | 1.044 | 1.300 | -256 |
| **Tilsamans** | **127.511** | **124.239** | **3.272** |

Sambært landsstýrismanninum er orsøkin til minninýtsluna, at talið av móttakarum av lestrarstuðli gjørdist minni, enn roknað var við.

### 4.2.15 Lestrarlán (stuðulsjáttan) 7.23.7.05

Í fíggjarlógini eru játtaðar 8,9 mió.kr. í útreiðslum og 11,9 mió.kr. í inntøkum. Meirinntøkurnar eru tilsamans 714 t.kr. Sambært landsstýrismanninum er orsøkin, at afturgjaldingin av lánum og rentuinntøkur gjørdust hægri enn mett, og at útlánini eru hægri enn mett.

Sambært landsroknskapinum 2017 sær roknskapurin soleiðis út, býttur á standardkontur:

*t.kr.*

| Standardkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 17. Avskrivingar o.a. | 230 | 0 | -230 |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 0 | 42 | 42 |
| 67. Rentuinntøkur o.a. | -1.600 | -2.132 | -532 |
| 82. Útlán v.m. | 8.670 | 9.557 | 887 |
| 86. Afturgjaldan av útlánum v.m. | -10.300 | -11.181 | -881 |
| **Tilsamans** | **-3.000** | **-3.714** | **-714** |

### 4.2.16 Føroyahús í Danmark (stuðulsjáttan) 7.24.1.04

Í fíggjarlógini eru játtaðar 2,7 mió.kr. Ongin meirnýtsla er. Til Føroyahúsið í Keypmannahavn eru goldnar 2.641 t.kr., og til Føroyahúsið í Århus eru 100 t.kr. goldnar.

### 4.2.17 Tiltøk fyri børn og ung (stuðulsjáttan) 7.24.1.05

Í fíggjarlógini er nettojáttanin 0 kr. Játtaðar eru 1,6 mió.kr. í inntøkum og sama í útreiðslum. Inntøkurnar frá P/f Ítróttavedding eru 3.067 t.kr., og 3.045 t.kr. eru goldnar út. Tær verkætlanir og tiltøk, sum í 2017 eru stuðlað við 20 t.kr. ella meira, eru:

*kr.*

| Heiti | |
|---|---|
| Ítróttarsamband Føroya, stuðul til Oyggjaleikir | 250.000 |
| Katrin Bjarnadóttir, stuðul til málmennandi tiltøk í dagstovni og skúla | 160.000 |
| Gitte Klein, stuðul til málmennandi tiltøk (Uppslagsbók til foreldur) | 150.000 |
| Blái Krossur Føroya, verkætlanin “Øll hava rætt til góð barnaár” | 150.000 |
| Felagið Barnabati, verkætlanin “Øll kunnu flyta fjøll” | 135.000 |
| Føroya Stiftsstjórn, stuðul til 500-ára hald fyri Reformatiónina | 135.000 |
| Fróðskaparsetur Føroya/Sjúrður Ravnsfjall, verkætlanin “Forrita á og við teldlum” | 120.000 |
| Norðurlandahúsið, stuðul til Barnafestival 2017 | 100.000 |
| Norðurlandahúsið, stuðul til FMA | 100.000 |
| Føroyska Bíbliufelagið, stuðul til Nýggja Testamenti á gerandisføroyskum | 100.000 |
| Bókadeild Føroya Lærarafelag, stuðul til faldara um málmenning | 95.000 |
| Sundsá, stuðul til at gera telduspøl og appir, ið kunnu menna tað føroyska málið | 90.000 |
| Rúna V. Højgaard, stuðul til dansiframsýning | 90.000 |
| Vivian Sjóðklett, verkætlanin “Wisdom from the roots” | 80.000 |
| Sissal Maria Rasmussen, stuðul til málmenning (foreldrafrágreiðingar á netinum) | 75.000 |
| Jens Knudsen, stuðul til konsertir við messingljóðførum | 70.000 |
| Klippfisk, stuðul til Filmssummarskúla | 70.000 |
| VILT, verkætlan um ljóðlæru til børn | 70.000 |
| Angela Petersen, stuðul til Barnaprix 2017 | 70.000 |
| Tórshavnar Kommuna, stuðul til sangleik | 60.000 |
| Eivør Management, verkætlanin “Skrímslið – lítla systir mín” | 60.000 |
| Beinta Johannessen, stuðul til blaðútgávu og heimasíðu (Píkasjey) | 50.000 |
| Felagið Javni, stuðul til týðing og útgávu av bók um Karlstadmodellen | 50.000 |
| Tórshavnar Kommuna, stuðul til smáar sangleikir | 50.000 |
| KFUM, stuðul til at menna ungdómsarbeiði | 50.000 |
| Havnar Jazzfelag, stuðul til Vetrarjazz | 50.000 |
| Frida Johannessen, stuðul til Summarskúlan 2017 | 49.000 |
| Norðurlandahúsið, Listaverkætlanin “ON MASS 2017” | 40.000 |
| Berin, stuðul til verkætlan fyri børn og ung | 35.000 |
| Føroya Skótaráð, stuðul til luttøku á skótalegu í Íslandi | 35.000 |
| Ad Astra, stuðul til skeiðið “Kreativur kærleiki” (støðlað) | 30.000 |
| Vár Berghamar Jacobsen, stuðul til barnasjónleikin “Luddi og Lundisa” | 30.000 |
| Kim Simonsen, stuðul til verkætlan á Miðnámi | 30.000 |
| Guðrið Hansdóttir, stuðul til Gentur rokka Føroyar 2017 | 25.000 |
| Føroya Klarinettorkestur, stuðul til verkætlan | 25.000 |
| Karavella Marionett Teatur, stuðul til leikin “Skrímslakrýnika” | 24.000 |
| Marna Olsen, stuðul til listarlig tiltøk fyri børn | 24.000 |
| Føroya Fólkatónleikarafelag, verkætlan fyri børn og ung | 23.000 |
| Marin Malena Jacobsen, stuðul til málmenning við teknmáli | 22.500 |
| Musikkskúlin í Vágum, stuðul til uttanlandaferð | 20.000 |
| Arnold Ludvig, stuðul til Open Mic/Open Stage fyri ung | 20.000 |
| Anný Djurhuus, stuðul til Installatión (Jollyklub) | 20.000 |
| Tórshavnar kommuna, stuðul til Summarnám 2017 | 20.000 |

### 4.2.18 Málráðið (rakstrarjáttan) 7.24.1.07

Í fíggjarlógini eru játtaðar 1,1 mió.kr. Minninýtslan er 15 t.kr.

Í játtanini eru tvær undirkontur. Á undirkontu 20 "Vanligt virksemi" eru játtaðar 1.085 t.kr., harafturat hevur Málráðið fingið 26,5 t.kr. í stuðli frá Mentamálaráðnum til Móðurmálsdagin 2017. Útreiðslurnar eru 1.116 t.kr.

Á undirkontu 21 "Staðarnavnanevndin" eru játtaðar 30 t.kr. Nýttar eru 10 t.kr.

### 4.2.19 Orðabókagerð (stuðulsjáttan) 7.24.1.10

Í fíggjarlógini eru játtaðar 900 t.kr. 142,5 t.kr. eru goldnar Orðabókagrunninum og 757,5 t.kr. eru goldnar Sp/f Sprotanum.

### 4.2.20 Ymiskir studningar (stuðulsjáttan) 7.24.1.13

Játtaðar eru 2,8 mió.kr. Minninýtslan er 46 t.kr. Upprunaliga var játtanin 2,9 mió.kr. Í eyka-játtanarlógini fyri august 2017 varð játtanin lækkað 100 t.kr. Játtanin hevur fleiri undirkontur:

*kr.*

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 01. Útnorðursamstarv | 200.000 | 200.000 | 0 |
| 02. Norrøna felagið | 150.000 | 150.000 | 0 |
| 03. Ungmannafeløg | 350.000 | 350.000 | 0 |
| 04. Stuðul til onnur endamál | 720.000 | 679.446 | 40.554 |
| 05. Listafólkasamband Føroya (LISA) | 380.000 | 380.000 | 0 |
| 06. Stuðul til listafólk | 100.000 | 94.750 | 5.250 |
| 07. Skótarørsla | 400.000 | 400.000 | 0 |
| 08. Farlit | 500.000 | 500.000 | 0 |
| **Tilsamans** | **2.800.000** | **2.754.196** | **45.804** |

### 4.2.21 LOA-grunnurin (stuðulsjáttan) 7.24.1.26

Í fíggjarlógini eru játtaðar 550 t.kr. Minninýtslan er 30 t.kr. Í 2010 varð avtalað millum Føroya landsstýri og Lokale- og Anlægsfonden, at landsstýrið skuldi gjalda 540 t.kr. árliga til grunnin. Frá 2017 er upphæddin broytt til 520 t.kr.

### 4.2.22 Tónleikur, sangur og føroyskur dansur (stuðulsjáttan) 7.24.2.01

Í fíggjarlógini eru játtaðar 2,5 mió.kr. Játtanin hevur tríggjar undirkontur.

*t.kr.*

| Undirkonta | Roknskapur | Játtan |
|---|---|---|
| 01. Tónleikur og sangur | 315 | 315 |
| 02. Føroya Symfoniorkestur | 1.700 | 1.700 |
| 03. Føroyskur dansur | 500 | 500 |
| **Tilsamans** | **2.515** | **2.515** |

Stuðulin til Tónleik og sang er latin til Meginfelag føroysk hornorkestur, 50 t.kr., Aldubáran, 80 t.kr., Felagið føroysk tónaskøld, 20 t.kr., Kórsamband Føroya, 80 t.kr. og Konsertfelagið, 85 t.kr. Stuðulin á undirkontu 03. Føroyskur dansur er goldin Sláið Ring.

### 4.2.23 Filmur (stuðulsjáttan) 7.24.2.03

Í fíggjarlógini eru játtaðar 2 mió.kr. Minninýtslan er 48 t.kr.

Av játtanini eru 624 t.kr. støðlaðar í fíggjarstøðuni sum "skyldur, ið ikki eru endaligar". Í 2015 og 2016 eru støðlaðar ávikavist 205 t.kr. og 581 t.kr. Tilsamans eru 1.205 t.kr. støðlaðar við árslok 2017.

Tá ið talan er um framleiðslustuðul, rindar Mentamálaráðið í fyrsta umfari bert ¾ av stuðlinum út. Síðsti fjórðingurin verður goldin, tá ið verkætlanin er liðug. Støðlingar kunnu eisini verða gjørdar, um ein umsøkjari fær tilsøgn um stuðul til eina nýggja verkætlan, áðrenn hin fyrra er liðug.

### 4.2.24 Mentanargrunnurin (stuðulsjáttan) 7.24.2.04
Í fíggjarlógini eru játtaðar 7,8 mió.kr. Øll upphæddin er goldin út. Játtanin hevur tríggjar undirkontur. Til Mentunargrunnin eru goldnar 6,2 mió.kr., til listafólkalønir 1,1 mió.kr. og til Týðaragrunn landsins 500 t.kr.

### 4.2.25 Leiklist (rakstrarjáttan) 7.24.2.06
Í fíggjarlógini eru játtaðar 6,1 mió.kr. Minninýtslan er 12 t.kr. Í játtanini eru tríggjar undirkontur: 4,7 mió.kr. eru til Tjóðpall Føroya, 750 t.kr. til Meginfelag áhugaleikara Føroya og 650 t.kr. til stuðul til yrkisleiklist.

### 4.2.26 Tjóðleikhús (løgujáttan) 7.24.2.09
Í fíggjarlógini er ongin játtan. 4,5 mió.kr. eru fluttar frá farnum fíggjarárum. Nýttar eru 53 t.kr. og 4,45 mió.kr. eru við C.átekning fluttar til 2018.

Í fíggjarlógini 2011 vórðu játtaðar 5 mió.kr., ætlaðar til at fyrireika bygging av tjóðleikhúsi, finna hóskandi øki, at gera skitsu og detailprosjektera nýggja húsið. Onki varð brúkt av játtanini í 2011, og vórðu tær 5 mió.kr. fluttar til 2012. Eitt túsund krónur vórðu brúktar í 2012 til tímar hjá Landsverk, og 4.999 t.kr. vórðu fluttar til 2013.

Í 2013 vórðu 80 t.kr. brúktar til lønir hjá Landsverk og 22 t.kr. til ferðaútreiðslur uttanlands.

Í 2014 vórðu 4.846 t.kr. fluttar fram frá 2013. 119 t.kr. vórðu brúktar, 86 t.kr. í lønum hjá Landsverk og 33 t.kr. til fundarpening o.a.

Í 2015 vórðu 4.727 t.kr. fluttar fram frá 2014. 32 t.kr. vórðu brúktar, 14 t.kr. til lønir til Landsverk og 18 t.kr. til privatan ráðgeva.

Í 2016 vórðu 4.695 t.kr. fluttar fram frá 2015. 185 t.kr. vórðu brúktar, 83 t.kr. til lønir hjá Landsverk og 102 t.kr. til ferðaútreiðslur uttanlands.

Í 2017 vórðu 4.510 t.kr. fluttar fram frá 2016. 53 t.kr. vórðu brúktar til lønir hjá Landsverk.

Samanumtikið ber til at siga, at av teimum 5 mió.kr., sum vórðu játtaðar í fíggjarlógini 2011, eru 4,45 við átekning fluttar til 2018. Restin, góð hálv millión krónur, er hesi sjey árini stórt sæð nýtt til løntímar hjá Landsverk, ferðaútreiðslur og fundarpening.

### 4.2.27 Norðurlandahúsið (stuðulsjáttan) 7.24.2.10
Í fíggjarlógini eru játtaðar 1,7 mió.kr. Upphæddin er goldin Norðurlandahúsinum.

### 4.2.28 Heiðursgávur til mentafólk (stuðulsjáttan) 7.24.2.13
Í fíggjarlógini eru játtaðar 500 t.kr. Minninýtslan er 5 t.kr. Mentanarvirðisløn landsins, 150 t.kr., varð latin Barbaru í Gongini. Heiðursgáva landsins, 75 t.kr., varð latin Frits Johannesen. Virðisløn til ungt listarfólk, 50 t.kr., varð latin Konni Kass. Afturat tí varð sømdarpeningur uppá 20 t.kr. latin til: Oddvør Johansen, Hanus Johansen, Zacharias Heinesen, Alexandur Kristiansen, Róa Reynagarð, Óla Petersen, Bárð Jákupsson, Guðrið Poulsen, Trónd Patursson, Hanus Kamban og Katrina Ottarsdóttir.

### 4.2.29 Søvn landsins (rakstrarjáttan) 7.24.3.03
Í fíggjarlógini eru játtaðar 29,8 mió.kr. Minninýtslan er 537 t.kr. Játtanin hevur tríggjar undirkontur.

*t.kr.*

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Vanligt virksemi | 28.353 | 28.283 | 70 |
| 21. Koltursætlanin | 1.450 | 957 | 493 |
| 40. Inntøkufíggjað virksemi | 0 | 26 | -26 |
| **Tilsamans** | **29.803** | **29.266** | **537** |

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at høvuðsorsøkin til minninýtsluna er, at virksemið hevur verið minni á undirkontu 21 "Koltursætlanin". Færri íløgur eru gjørdar í musealu skipanina í Koltri, enn roknað varð við, t.d. íløgur, umvælingar og nýbyggingar. Hesar íløgur eru tí útsettar til 2018 og 2019. Peningurin til íløgurnar er serstudningur úr Búnaðargrunninum (5 mió.kr. yvir 5 ár), ætlaður at fyriskipa og menna eina antikvariska serskipan í Koltri.

### 4.2.30 Søvn landsins (stuðulsjáttan) 7.24.3.06

Í fíggjarlógini eru játtaðar 7,6 mió.kr. Minninýtslan er 301 t.kr. Talan er um høvuðskontu, sum hevur fleiri undirkontur.

*t.kr.*

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 01. Bygdasøvn | 2.462 | 2.197 | 265 |
| 02. Fólkabókasøvn | 3.887 | 3.883 | 4 |
| 04. Listasøvn | 120 | 120 | 0 |
| 05. Sjósavn | 284 | 284 | 0 |
| 06. Mentanarsøgulig skip | 850 | 818 | 32 |
| **Tilsamans** | **7.603** | **7.302** | **301** |

Sambært landsstýrismanningum er orsøkin til minninýtsluna í høvuðsheitum, at minninýtsla er á játtanini til bygdasøvn. Stuðulin til bygdasøvn verður goldin afturút sambært góðkendum roknskapi, og bygdasøvnini brúktu minni, enn tey høvdu fingið góðkenning til.

Stuðulin til listasøvn er goldin til Listasavnið á Sandi, Norðoya Listafelag og Skálan við Skálá í Vági, sum hava fingið 40 t.kr. í part.

Av játtanini til mentanarsøgulig skip eru 264 t.kr. goldnar Westward Ho og 40 t.kr. eru støðlaðar sum stuðul til sluppina. Grunnurin Dragin hevur fingið 96 t.kr., Jóhanna TG 326 205 t.kr., Thorshavn 117 t.kr., og P/f Útferðir hevur fingið 136 t.kr.

### 4.2.31 Hvalastøðin við Áir (løgujáttan) 7.24.3.15

Í fíggjarlógini er 1 mió.kr. játtað. Minninýtslan er 2 t.kr. Brúktar eru 890 t.kr. til timburarbeiði, og restin til projektering, orkukeyp o.a.

### 4.2.32 Krígssavn (stuðulsjáttan) 7.24.3.18

Í fíggjarlógini eru játtaðar 200 t.kr. Upphæddin er goldin til Krígssavnið í Vágum.

### 4.2.33 Kirkjubømúrurin (løgujáttan) 7.24.3.23

Í fíggjarlógini eru játtaðar 1,3 mió.kr. Minninýtslan er 20 t.kr. 947 t.kr. eru goldnar til privatar fyritøkur vegna umvælingar og leigu av goymslurúmi. 333 t.kr. eru goldnar Landsverki fyri lønir.

### 4.2.34 Kringvarp Føroya (løgujáttan) 7.24.4.03

Ongin játtan er í 2017. 608 t.kr. eru goldnar út og bókaðar av fíggjarstøðuni, har tær stóðu støðlaðar frá 2016.

### 4.2.35 Kringvarp Føroya (rakstrarjáttan) 7.24.4.06

Í fíggjarlógini eru játtaðar 1,6 mió.kr. í nettoútreiðslum. Meirinntøkan er 119 t.kr. Í játtanini eru fleiri undirkontur.

*t.kr.*

| Undirkonta | | Játtan | | Roknskapur | | Frávik |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 20 | Landsfyritøka | | 0 | | 0 | 0 |
| | *Útreiðslur* | *66.439* | | *72.124* | | |
| | *Inntøkur* | *66.439* | | *72.124* | | |
| 30 | Talgilding av bandasavninum | | 900 | | 892 | 8 |
| 31 | Lýsingarinntøkur | | -2.500 | | -2.611 | 111 |
| **Tilsamans** | | | **-1.600** | | **-1.719** | **119** |

### 4.2.36 Stuðul til framl. av før. loftmiðlatilfari (stuðulsjáttan) 7.24.4.10

Í fíggjarlógini eru játtaðar 585 t.kr. Minninýtslan er 45 t.kr. Peningurin er goldin Kringvarpi Føroya fyri rokningar frá Teknmálstulkatænastuni.

### 4.2.37 Miðlastuðul (stuðulsjáttan) 7.24.4.13

Í fíggjarlógini eru játtaðar 2 mió.kr.

Sambært Miðlastuðulsnevndini eru 40% av játtanini býtt javnt ímillum umsøkjararnar, og 60% av árligu játtanini eru latin sum ein lutfalslig upphædd í prosentum av skjalprógvaðu lønarútreiðslum árið fyri.

Miðlastuðul er í 2017 latin til:

| Móttakari | Kr. |
|---|---:|
| Sp/f Sosialurin | 824.365 |
| Sp/f Dimmalætting | 294.902 |
| Sp/f Norðlýsið | 193.854 |
| Sp/f Knassar (Portal.fo) | 192.898 |
| Sp/f 01.01.2014 (Rás 2) | 186.168 |
| Sp/f 1. oktober 1997 (VP) | 152.514 |
| Sp/f R7 Kringvarp | 136.138 |
| JN.fo | 19.160 |

### 4.2.38 Studningur til Kirkjugrunnin (stuðulsjáttan) 7.24.5.01

Í fíggjarlógini eru játtaðar 9 mió.kr. Upphæddin er goldin Kirkjugrunninum.

### 4.2.39 Føroyskt Kirkjumál (stuðulsjáttan) 7.24.5.04

Í fíggjarlógini eru játtaðar 250 t.kr. Upphæddin er goldin forlagnum Føroyskt Kirkjumál.

### 4.2.40 Ítróttasamband Føroya (stuðulsjáttan) 7.24.6.06

Játtaðar eru 10,5 mió.kr. Upprunaliga var játtanin 9,7 mió.kr. Í eykajáttanarlógini fyri august 2017-5 varð játtanin hækkað 800 t.kr.

Av játtanini eru 8.050 t.kr. goldnar ÍSF og 300 t.kr. ÍSB. Harafturat hevur ÍSF fingið ávikavist 1,3 mió.kr. og 800 t.kr. til altjóða ítróttaluttøku og úrvalsítrótt.

### 4.2.41 Hugasamband Føroya (stuðulsjáttan) 7.24.6.08

Í fíggjarlógini eru játtaðar 1,1 mió.kr. Upphæddin er goldin til Hugasamband Føroya.

# 5 Heilsu- og innlendismál

Yvirlitið niðanfyri vísir meir-/minninýtslu á høvuðskontum undir heilsu- og innlendismálum.

*t.kr.*

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Meir-nýtsla | Minni-nýtsla |
|---|---|---|---|---|
| Heilsu- og innlendismálaráðið (Rakstrarj.) | 15.280 | 14.858 | | 422 |
| Siðseminevndir (Rakstrarj.) | 200 | 100 | | 100 |
| Útreiðslur av vali (Rakstrarj.) | 50 | 0 | | 50 |
| Upplýsing og ráðgeving (Rakstrarj.) | 2.660 | 2.660 | 0 | |
| Tiltøk móti rúsdrekkamisnýtslu (Stuðulsj.) | 1.125 | 1.125 | | 0 |
| Stuðul til feløg (Stuðulsj.) | 200 | 200 | | 0 |
| Koppsetingar (Lógarb. j.) | 3.400 | 3.290 | | 110 |
| Upplýsing um gitnaðarfyribyrging (Lógarb. j.) | 550 | 485 | | 65 |
| Heilsukanningar av barnakonum (Lógarb. j.) | 950 | 949 | | 1 |
| Læknakanningar av børnum (Lógarb. j.) | 850 | 792 | | 58 |
| Heilsutrygd (Rakstrarj.) | 7.371 | 7.364 | | 7 |
| Heilsutrygdarveitingar (Rakstrarj.) | 165.360 | 165.453 | 93 | |
| Kommunulæknaskipanin (Rakstrarj.) | 10.905 | 10.900 | | 5 |
| Útbúgving av yngri læknum (Rakstrarj.) | 7.727 | 7.739 | 12 | |
| Økisheilsuskipanin (Rakstrarj.) | 1.700 | 1.569 | | 131 |
| Apoteksverkið (Rakstrarj.) | 0 | -4.487 | | 4.487 |
| Apoteksverkið (Løguj.) | 0 | 0 | | 0 |
| Ílegusavnið (Rakstrarj.) | 3.535 | 3.535 | | 0 |
| Landssjúkrahúsið (Rakstrarj.) | 631.736 | 641.951 | 10.215 | |
| Medicoteknisk tól (Løguj.) | 9.000 | 8.847 | | 153 |
| Landssjúkrahúsið, útbygging (Løguj.) | 76.062 | 76.062 | | 0 |
| Klaksvíkar sjúkrahús (Rakstrarj.) | 68.672 | 68.951 | 279 | |
| Klaksvíkar sjúkrahús (Løguj.) | 1.500 | 281 | | 1.219 |
| Suðuroyar sjúkrahús (Rakstrarj.) | 61.065 | 60.764 | | 301 |
| Suðuroyar sjúkrahús (Løguj.) | 1.000 | 0 | | 1.000 |
| Serstakur sjúkrahúsheilivágur (Rakstrarj.) | 42.000 | 42.570 | 570 | |
| Umsiting av sjúklingatrygging (Rakstrarj.) | 250 | 298 | 48 | |
| Sjúklingatrygging (Lógarb. j.) | 3.000 | 1.952 | | 1.048 |
| Hvíldarheimið Naina (Rakstrarj.) | 2.176 | 2.176 | | 0 |
| Deildin fyri arbeiðs- og almannaheilsu (Rakstr.j.) | 1.981 | 1.981 | | 0 |
| Viðgerðarstovnurin Heilbrigdi (Rakstrarj.) | 5.960 | 5.721 | | 239 |
| Viðgerðarstovnurin Blákrossheimið (Rakstrarj.) | 5.960 | 5.960 | | 0 |
| Viðgerðarstovnurin Frælsi (Rakstrarj.) | 2.000 | 1.934 | | 66 |
| Gigni - heilsufrøði fyri børn & ung (Rakstrarj.) | 13.331 | 13.106 | | 225 |
| Stuðul til umhvørvisverndartiltøk (Stuðulsj.) | 400 | 368 | | 32 |
| Náttúrufriðingarnevndir (Rakstrarj.) | 500 | 309 | | 191 |
| Spilloljureinsing (Stuðulsj.) | 4.000 | 3.979 | | 21 |
| Lánsafturgjald (Stuðulsj.) | -4.690 | -4.695 | | 5 |
| El-veiting, umsiting (Rakstrarj.) | 0 | 0 | | 0 |
| Ferð á grøna orku (Rakstrarj.) | 2.000 | 1.823 | | 177 |
| El-nevndin (Rakstrarj.) | 186 | 162 | | 24 |
| Stuðul til útoyggjamenning (Stuðulsj.) | 710 | 700 | | 10 |
| Umhvørvisstovan (Rakstrarj.) | 20.389 | 20.387 | | 2 |

## 5.1 Meirnýtsla/frávik

### 5.1.1 Upplýsing og ráðgeving (rakstrarjáttan) 11.20.1.04
Í fíggjarlógini eru játtaðar 2,7 mió.kr. Meirnýtslan er 0,2 t.kr. Játtanin er til at fíggja virksemið hjá Fólkaheilsuráðnum.

### 5.1.2 Heilsutrygdarveitingar (rakstrarjáttan) 11.20.2.03
Í fíggjarlógini eru játtaðar 165,4 mió.kr. Meirnýtslan er 93 t.kr. Sambært landsstýrismanninum er talan vanlig sveigg í útreiðslunum.

### 5.1.3 Útbúgving av yngri læknum (rakstrarjáttan) 11.20.2.05
Í fíggjarlógini eru játtaðar 7,7 mió.kr. Meirnýtslan er 12 t.kr.

### 5.1.4 Landssjúkrahúsið (rakstrarjáttan) 11.20.3.04
Játtaðar eru 631,7 mió.kr. Meirnýtslan er 10,2 mió.kr. Upprunaliga var játtanin 623,7 mió.kr. Í eykajáttanarlógini fyri oktober 2017 varð játtanin hækkað 8 mió.kr. til vanliga virksemið.

Játtanin hevur hesa C.átekning: *"Landsstýriskvinnuni verður heimilað at gera innanhýsis flytingar millum hesa høvuðskontuna og høvuðskonturnar 11.20.3.10. Klaksvíkar sjúkrahús, 22.20.3.15. Suðuroyar sjúkrahús, og 11.20.3.19. Serstakur sjúkrahúsheilivágur."*

*t.kr.*

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Vanligt virksemi | 459.024 | 471.030 | -12.006 |
| 22. Viðgerð uttanlands – LS | 104.499 | 110.322 | -5.823 |
| 23. Viðgerð uttanlands – KS | 9.348 | 2.605 | 6.743 |
| 24. Viðgerð uttanlands – SS | 3.367 | 3.638 | -271 |
| 25. Flutningur og uppihald | 24.330 | 24.833 | -503 |
| 26. Sjúklingahotellið Tórshavn | 19.000 | 19.083 | -83 |
| 27. KT-øki heilsuverksins | 7.168 | 7.088 | 80 |
| 28. Avseting til serlæknar | 5.000 | 4.309 | 691 |
| 40. Inntøkufíggjað virksemi (Vaskarí) | | -957 | 957 |
| **Tilsamans** | **631.736** | **641.951** | **-10.215** |

#### Undirkonta 20. Vanligt virksemi
Meirnýtslan er 12 mió.kr. Í eykajáttanarlógini fyri oktober 2017 varð játtanin hækkað 8 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum var orsøkin til eykajáttanina, at útreiðslurnar til konsulentar vóru munandi hægri enn væntað, serliga av langtíðarsjúku og læknamangli innan ávísar sergreinir, sum skuldu døgndekkast við avloysarum. Útreiðslurnar til konsulentar vóru um 5 mió.kr. hægri, enn roknað var við. Innan føðiøkið vóru serliga nógvar sjúkrameldingar, og vóru útlendskir avloysarar settir í staðin í eina tíð. Meirkostnaður til avloysarar var góðar 3 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum hevur Landssjúkrahúsið tikið soleiðis samanum: *"LS hevur verið og er partvís í eini truplari støðu á leiðslu síðuni. Skiftandi stjórar og depilsleiðslur, sum ikki støðast undir stórum trýsti, bæði fíggjarliga og við nógvum sjúklingum, hava spælt ein stóran leiklut í avbjóðingunum at halda karmar og annars at fáa serlæknar at støðast."*

Landssjúkrahúsið hevur greitt frá fýra høvuðsorsøkum til meirnýtsluna.

*"Serlæknakonsulentar nú árið 2017 er liðugt*
*Útreiðslurnar til konsulentar eru øktar serliga nógv seinastu árini. Í 2016 brúkti Landssjúkrahúsið 5,2 mió.kr. til konsulentar, og talið øktist til 13 mió.kr. í 2017. Tá ið Landssjúkrahúsið fekk játtað 5 mió.kr. í meirjáttan til hesar útreiðslur, var ikki greitt, hvussu støðan fór at vera í 4. ársfjórðingi. Nýtslan til konsulentar er sostatt 3 mió.kr. meiri, enn lagt varð upp fyri. Miðalútreiðslan fyri hvønn konsulent er nærum 100 t.kr. um vikuna.*

*Lønarútgjaldingin fyri 4. ársfjórðing varð munandi hægri enn væntað*
*Nýggju lønarsáttmálarnir kostaðu sjúkrahúsinum 1,9 mió.kr. meiri, enn Landssjúkrahúsið roknaði við. Meginparturin av óvæntaðu meirútreiðslunum stavar frá sáttmálanum við Felagið fyri føroyskar sjúkrarøktarfrøðingar.*

*Tímasaldur hjá starvsfólki omanfyri 40 tímar, umframt fyri ikki hildna 6. feriuviku*
*Rundskrivið frá Fíggjarmálaráðnum um at tíðaravmarka lønir varð dagført í desember 2017, og í tí vóru mannagongdir ásettar fyri at tíðaravmarka tímasaldur vegna áogn hjá starvsfólki fyri tímar omanfyri 40 tímar, umframt fyri ikki hildna 6. feriuviku, ið avtala varð gjørd um.*

*Hjá Landssjúkrahúsinum var upphæddin 4,2 mió.kr., og øll upphæddin er útreiðsluførd í 2017.*

*Desember vaktir í 2017 vóru munandi kostnaðarmiklari enn vaktirnar í 2016*
*Ein grundleggjandi mannagongd er broytt fyri periodisering av lønarútgjaldingum hjá tí almenna. Broytingin hevur stóra ávirkan á gjøld fyri vaktir, ið verða útgoldnar mánaðin eftir. Tað merkir, at lønargjald fyri desember 2017, útgoldið í januar, verður bókað í desember.*

*Landssjúkrahúsið hevði gjørt framrokningar, grundað á vaktarkostnaðin í 2016. Árið 2017 hevur tó verið óvanligt seinasta kvartal, bæði við verkfalli og einari søguligari broyting av sáttmálaviðurskiftunum hjá sjúkrarøktarfrøðingunum. Broytingarnar hava ikki bert havt við sær eina munandi lønarhækking, men eisini at lønarstigin varð uppsettur á heilt nýggjan hátt og ikki kundi samanberast við gamla lønarstigan. Allar broytingarnar komu seint í november, og stundir vóru ikki at endurskoða framrokningarnar av vaktarkostnaðinum fyri desember 2017. Nevnast kann, at ein av avleiðingunum av nýggja lønarstiganum var, at hvør einstakur sjúkrarøktarfrøðingur skuldi manuelt innplaserast av nýggjum í lønarskipanini. Tað arbeiðið var ikki liðugt, fyrr enn desemberlønin skuldi koyrast.*

*Tá ið vaktirnar vórðu gjørdar upp fyri desember 2017, vísti tað seg, at tær kostaðu 2 mió.kr. meira enn somu tíð í 2016. Landssjúkrahúsið metir seg ikki at kunna hava sæð fram til hendan útreiðsluvøksturin í nóg góðari tíð."*

## Undirkonta 22. 23. 24. Viðgerð uttanlands
Minninýtslan fyri hesar konturnar samlað er 549 t.kr.

Gongdin seinastu árini hevur víst, at talið av sjúklingum er vaksandi:

| Talva 1 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Viðgerðaruppihald hjá føroyskum sjúklingum | 2.276 | 2.191 | 2.210 | 2.389 | 2.633 | 2.821 |
| Tal av sjúklingum | 1.337 | 1.351 | 1.306 | 1.388 | 1.515 | 1.590 |
| Index uppihald | 100 | 96 | 97 | 105 | 116 | 124 |
| Index sjúklingar | 100 | 101 | 98 | 104 | 113 | 119 |

| Talva 2 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tal av visiteraðum fylgjarum | 1.409 | 1.473 | 1.350 | 1.410 | 1.481 | 1.692 |
| Index | 100 | 105 | 96 | 100 | 105 | 120 |

Sjúkrahúsverksstjórin hevur greitt frá um óvissu fyri avrokning vegna viðgerð uttanlands:

*"Óvissa um avrokning viðgerð uttanlands 2017*
*Eftir at Sundhedsplatformurin varð implementeraður í Region Hovedstaden, kom ongin avrokning frá viðgerðarstøðunum, orsakað av, at skipanin ikki kundi handfara avrokningina. Ríkissjúkrahúsið (RH), sum hevur nógv tað størstu avrokningina, steðgaði at avrokna 1. november 2016.*

*Harafturat broytti Region Hovedstaden avrokningarhátt, har áður varð avroknað eftir takstum og partvís DRG, til frameftir at avrokna eftir einum DRG-modellið við mark-up. Hendan avrokningarhátt hava hinar regiónirnar implementerað.*

*Avrokningin fyri november og desember 2016 og fyri meginpartin av 2017 byrjaðu ikki at koma fyrr enn eftir 20. november 2017. Avrokningin er tó ikki hægri enn fyri 2016, men óvissa er, um reguleringar fara at koma.*

*Avrokningin hjá regiónunum kunnu síggjast í avrokningardátabankanum, Targit, har tað vísur seg at vera munur á upphæddum í mun til, hvat avroknað er. Avrokningin í Targit vísir seg at vera hægri. RH hevur greitt frá, at hetta stendst av skiftinum til Sundhedsplatformen, og at har liggja dáta, sum skulu krediterast. Harafturat er november og desember 2017 ikki avroknað enn, og ein ákonto rokning er goldin..."*

Heilsu- og innlendismálaráðið hevur eisini kunnað um, at aftaná freistina fyri at ávísa roknskapin 2017, hevur Landssjúkrahúsið kunnað um, at Ríkissjúkrahúsið hevur sent rokning 7 mió.kr., harav 600 t.kr. viðvíkja 2016 og 6,7 mió.kr. viðvíkja *2017.*

Í fótnotu til roknskapin[2] er kunnað um, at *"Heilsumálaráðið hevur 22. mai 2018 boðað frá, at Ríkissjúkrahúsið hevur sent rokning uppá 7 mió.kr., har regulerað verður fyri tað, sum var ov lítið fakturerað fyri fíggjarárini 2016 og 2017. Útreiðslan verður tikin við í roknskapin 2018."*

**Undirkonta 25 Flutningur og uppihald**
Meirnýtslan er 504 t.kr. Bæði talið á sjúklingum og fylgjarum er økt.

**Undirkonta 26 Sjúklingahotellið Tórshavn**
Meirnýtslan er 83 t.kr. Orsøkin er, at inntøkurnar eru 379 t.kr. hægri enn mett, og útreiðslurnar 462 t.kr. hægri enn mett. Vøksturin á gistingum og tørvurin fyri uppihaldi úti í býnum høvdu við sær, at meirnýtsla var, tá ið árið var liðið.

Talið á uppihaldum á sjúklingahotellinum er eisini økt.

| | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Yvirnáttingar, sjúklingahotellið | 22.275 | 27.197 | 30.060 | 29.221 | 32.896 | 36.457 |
| Index | 100 | 122 | 135 | 131 | 148 | 164 |

### 5.1.5 Klaksvíkar sjúkrahús (rakstrarjáttan) 11.20.3.10
Í fíggjarlógini eru játtaðar 68,7 mió.kr. Meirnýtslan er 279 t.kr. Sambært landsstýrismanninum hevur sjúkrahússtjórin greitt frá, at úrslitið ikki kundi gerast neyvari.

### 5.1.6 Serstakur sjúkrahúsheilivágur (rakstrarjáttan) 11.20.3.19
Í fíggjarlógini eru játtaðar 42 mió.kr. Meirnýtslan er 570 t.kr. Sambært landsstýrismanninum var stór óvissa teir seinastu mánaðirnar í 2017, um játtanin fór at halda. Tað er sera trupult at gera metingar fyri játtanina, tí sveiggini í nýtsluni kunnu vera so stór.

*t.kr.*

| | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Roknskapur | 33.199 | 35.930 | 36.586 | 41.501 | 42.188 | 39.862 | 42.570 |

### 5.1.7 Umsiting av sjúklingatrygging (rakstrarjáttan) 11.20.3.23
Í fíggjarlógini eru játtaðar 250 t.kr. Meirnýtslan er 48 t.kr. Sambært landsstýrismanninum var endaliga avrokningin frá Patientforsikringen fyri 2016 88 t.kr., og tað er orsøkin til, at nýtslan fór út um játtanina.

[2] Síða 104 í landsroknskapinum 2017

## 5.2 Minninýtsla/frávik

### 5.2.1 Heilsu- og innlendismálaráðið (rakstrarjáttan) 11.11.1.24
Í fíggjarlógini eru játtaðar 15,3 mió.kr. Minninýtslan er 422 t.kr. Talan er um høvuðskontu við fleiri undirkontum.

*t.kr.*

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Vanligt virksemi | 13.708 | 13.352 | 356 |
| 21. Ráð og nevndir | 180 | 143 | 37 |
| 26. Tilbúgving | 842 | 844 | -2 |
| 27. Verkætlanir | 450 | 437 | 13 |
| 28. Navnanevndin | 100 | 82 | 18 |
| **Tilsamans** | **15.280** | **14.858** | **422** |

Sambært landsstýrismanninum er orsøkin til minninýtsluna, at trý starvsfólk vóru í farloyvi í pørtum av árinum.

### 5.2.2 Vísindasiðseminevndin (rakstrarjáttan) 11.11.1.33
Í fíggjarlógini eru játtaðar 200 t.kr. Minninýtslan er 100 t.kr.

### 5.2.3 Útreiðslur av vali (rakstrarjáttan) 11.14.1.03
Játtaðar eru 50 t.kr. Minninýtslan er 50 t.kr. Upprunaliga var játtanin 1,1 mió.kr. Í eykajáttanarlógini fyri august 2017-5 varð játtanin lækkað 1 mió.kr.

### 5.2.4 Tiltøk móti rúsdrekkamisnýtslu (stuðulsjáttan) 11.20.1.07
Í fíggjarlógini eru játtaðar 1,1 mió.kr. Høvuðskontan hevur tvær undirkontur.

*t.kr.*

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 02. Blái krossur | 325 | 325 | 0 |
| 04. Ambulant viðgerðartilboð til ung | 800 | 800 | 0 |
| **Tilsamans** | **1.125** | **1.125** | **0** |

### 5.2.5 Stuðul til feløg (stuðulsjáttan) 11.20.1.08
Í fíggjarlógini eru játtaðar 200 t.kr. Sambært viðmerkingunum í fíggjarlógini verður stuðulin latin Føroya Pro Vita.

### 5.2.6 Koppsetingar (lógarbundin játtan) 11.20.1.10
Játtaðar eru 3,4 mió.kr. Minninýtslan er 110 t.kr. Upprunaliga var játtanin 2,9 mió.kr. Í eykajáttanarlógini fyri august 2017-5 varð játtanin hækkað 500 t.kr.

### 5.2.7 Læknakanningar av børnum (lógarbundin játtan) 11.20.1.19
Játtaðar eru 850 t.kr. Minninýtslan er 58 t.kr. Upprunaliga var játtanin 750 t.kr. Í eykajáttanarlógini fyri august 2017-5 varð játtanin hækkað 100 t.kr.

### 5.2.8 Heilsutrygd (rakstrarjáttan) 11.20.2.02
Í fíggjarlógini eru játtaðar 7,4 mió.kr. Minninýtslan er 7 t.kr. Játtanin er til umsiting hjá Heilsutrygd, sum umsitur heilsutrygdarveitingarnar, heilsukanningarskipanina, Kommunulæknaskipanina o.a.

Av játtanini eru góðar 1,5 mió.kr. fluttar til TAKS, sum umsitur innkrevjingina av heilsutrygdargjaldinum.

### 5.2.9 Kommunulæknaskipanin (rakstrarjáttan) 11.20.2.04
Játtaðar eru 10,9 mió.kr. Minninýtslan er 5 t.kr. Upprunaliga var játtanin 10,5 mió.kr. Í eykajáttanarlógini fyri august 2017-5 varð játtanin hækkað 450 t.kr.

### 5.2.10 Økisheilsuskipanin (rakstrarjáttan) 11.20.2.06
Í fíggjarlógini eru játtaðar 1,7 mió.kr. Minninýtslan er 131 t.kr.

### 5.2.11 Apoteksverkið (rakstrarjáttan) 11.20.2.08
Í fíggjarlógini er nettoútreiðslujáttanin 0 kr.; 300 mió.kr. í inntøkum og 300 mió.kr. í útreiðslum. Meirinntøkurnar eru 4,5 mió.kr. Býtt á høvuðsslag, vísir landsroknskapurin:

*t.kr.*

| Høvuðsslag | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| Rakstrarútreiðslur | 300.000 | 293.150 | 6.850 |
| Rakstrarinntøkur | -300.000 | -297.709 | -2.291 |
| Flytingarútreiðslur | | 79 | -79 |
| Skattir og flytinntøkur (rentuinntøkur) | | -15 | 15 |
| Flytingar millum almennar myndugleikar | | 8 | -8 |
| **Tilsamans** | **-0** | **-4.487** | **-4.487** |

Landsstýrismaðurin vísir á, at virksemið hjá Apoteksverkinum er fjøllbroytt, og tí er trupult at náa einari ávísari játtan. Orsøkin til frávikið er, at umsetningurin var serliga stórur.

### 5.2.12 Apoteksverkið (løgujáttan) 11.20.2.09
Í fíggjarlógini er ongin játtan. Talan er um verkætlan, sum upprunaliga var gjørd við heimild í verklagslóg, Ll. nr. 43/2012 "um framhaldandi dagføring av heilivágsframleiðsluni hjá apoteksverkinum". Verklagslógin fór úr gildi 30. juni 2014. Við árslok 2014 vórðu 1,1 mió.kr. støðlaðar. Við árslok 2016 vóru 706 t.kr. eftir, sum vórðu støðlaðar/avsettar til rokningar, ið ósemja var um, garantisýn o.a. Í 2017 eru 6 t.kr. goldnar til Landsverk, og við árslok 2017 standa 700 t.kr. eftir í fíggjarstøðuni.

### 5.2.13 Ílegusavnið (rakstrarjáttan) 11.20.2.11
Í fíggjarlógini eru játtaðar 3,5 mió.kr. Minninýtslan er 0 t.kr. Høvuðskontan hevur tríggjar undirkontur.

*t.kr.*

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Vanligt virksemi | 1.535 | 1.535 | 0 |
| 21. Verkætlanin FarGen | 2.000 | 1.989 | 11 |
| 45. Stuðulsfíggjað virksemi | 0 | 11 | -11 |
| **Tilsamans** | **3.535** | **3.535** | **0** |

Á undirkontu 45. Stuðulsfíggjað virksemi eru inntøkurnar 9,3 mió.kr., og útreiðslurnar áleið tað sama.

### 5.2.14 Landssjúkrahúsið, útbygging (løgujáttan) 11.20.3.08
Í fíggjarlógini eru játtaðar 56 mió.kr. Harumframt vórðu 21,2 mió.kr. framfluttar av óbrúktari løgujáttan í 2016. 1,1 mió.kr. er við C.átekning flutt til 2018.

### 5.2.15 Klaksvíkar sjúkrahús (løgujáttan) 11.20.3.11
Í fíggjarlógini eru játtaðar 1,5 mió.kr. til at umvæla og nýgera skaðastovuna, umframt til høvuðsinngongd og tekju til økið, har sjúkrabilarnir standa. Minninýtslan er 1,2 mió.kr. Ongin átekning er um at flyta óbrúkta játtan til seinni fíggjarár.

Sambært landsstýrismanninum er orsøkin til, at játtanin ikki varð brúkt, at tað ikki bar til at fáa handverkarar at gera arbeiðið, tí teir høvdu ov nógv at gera. Tað varð gjørt so nógv, sum til bar, men arbeiðið við høvuðsinngongdina millum sjúkrahúsið og røktarheimið varð ikki sett í verk.

### 5.2.16 Suðuroyar sjúkrahús (rakstrarjáttan) 11.20.3.15

Í fíggjarlógini eru játtaðar 61,1 mió.kr. Minninýtslan er 301 t.kr. Sambært landsstýrismanninum er orsøkin til minninýtsluna, at tað dró nakað út at seta virksemið við pínuviðgerð í verk.

### 5.2.17 Suðuroyar sjúkrahús (løgujáttan) 11.20.3.16

Í fíggjarlógini er 1 mió.kr. játtað til at keypa medicoteknisk tól fyri. Minninýtslan er 1 mió.kr. Ongin átekning er um at flyta óbrúkta játtan til seinni fíggjarár. Sambært landsstýrismanninum rakk játtanin ikki til endamálið, og tí varð hon ikki brúkt.

### 5.2.18 Sjúklingatrygging (lógarbundin játtan) 11.20.3.24

Játtaðar eru 3 mió.kr. Minninýtslan er 1 mió.kr. Upprunaliga játtanin í fíggjarlógini var 1,5 mió.kr. Í eykajáttanarlógini fyri august 2017-5 varð játtanin hækkað 1,5 mió.kr. Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at nú, árið er gjørt upp, sæst, at tað ikki var neyðugt við so høgari meirjáttan. Tað er sera trupult at gera metingar av sjúklingatryggingini, tí sveiggini kunnu vera so stór.

Roknskapartølini fyri 2013-2017:

*t.kr.*

| | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|
| Roknskapur | 205 | 491 | 6.505 | 7.416 | 1.952 |

### 5.2.19 Hvíldarheimið Naina (rakstrarjáttan) 11.20.3.25

Í fíggjarlógini eru játtaðar 2,2 mió.kr. Minninýtslan er 0 kr. Ll. nr. 18/1964 "um raksturin av hvíldarheiminum Naina" ásetir, at *"landskassin letur árliga studning við játtan á fíggjarlógini"*. Írestandi útreiðslur gjalda kommunurnar og Heilsutrygd.

### 5.2.20 Deildin fyri arbeiðs- og almannaheilsu (rakstrarjáttan) 11.20.3.30

Játtaðar eru 2 mió.kr. Minninýtslan er 0 kr. Upprunaliga var játtanin í fíggjarlógini var 1,9 mió.kr. Í eykajáttanarlógini fyri august 2017-5 varð játtanin hækkað 100 t.kr. til at keypa ein serligan frystara, sum kann goyma við 80 kuldastigum.

### 5.2.21 Viðgerðarstovnurin Heilbrigdi (rakstrarjáttan) 11.20.4.02

Í fíggjarlógini eru játtaðar 6 mió.kr. Minninýtslan er 239 t.kr. Sambært landsstýrismanninum hevur leiðslan greitt frá, at játtanin hevur hildið tey seinastu árini, og onki nýtt virksemi ella íløga verður gjørd uttan neyðuga játtan.

### 5.2.22 Gigni - heilsufrøði fyri børn & ung (rakstrarjáttan) 11.21.3.12

Í fíggjarlógini eru játtaðar 13,3 mió.kr. Minninýtslan er 225 t.kr.

### 5.2.23 Stuðul til umhvørvisverndartiltøk (stuðulsjáttan) 11.30.1.01

Í fíggjarlógini eru játtaðar 400 t.kr. Minninýtslan er 32 t.kr.

Tær verkætlanir og tiltøk, sum eru stuðlað í 2017, eru:

*kr.*

| Móttakari/Heiti | |
|---|---|
| Náttúrugripasavnið/Ramsar, Fuglateljing í Mykinesi og keyp av útgerð | 138.098 |
| Havstovan/Ramsar, Fuglateljingar í Skúvoy | 75.000 |
| Umhvørvisstovan/Ramsar, Skeið í rottutýning, fundir, altjóða rapportering, løn, o.a. | 55.056 |
| Føroya Náttúru og Umhvørvisfelag | 50.000 |
| William Simonsen/Skordjór í Skúvoynni og veðurlagsbroytingar | 50.000 |

### 5.2.24 Náttúrufriðingarnevndir (rakstrarjáttan) 11.30.1.07

Í fíggjarlógini eru játtaðar 500 t.kr. Minninýtslan er 191 t.kr. Sambært landsstýrismanninum er orsøkin til minninýtsluna, at tað ikki var so nógv virksemi, sum roknað varð við.

### 5.2.25 Spilloljureinsing (stuðulsjáttan) 11.30.1.10

Í fíggjarlógini eru játtaðar 4 mió.kr. Minninýtslan er 21 t.kr. Landsstýrið hevur við heimild í § 3 í Ll.nr. 75/1992 gjørt avtalu við IRF um at savna inn og reinsa spillolju. Játtanin er til at gjalda IRF fyri hall av hesum arbeiði.

### 5.2.26 Lánsafturgjald (stuðulsjáttan) 11.30.3.01

Í fíggjarlógini eru játtaðar 4,7 mió.kr. í nettoinntøkum. Minninýtslan er 5 t.kr. Talan er um lánsskuld hjá IRF, sum varð umløgd til 20 ára annuitetslán í 1998.

### 5.2.27 El-veiting, umsiting (rakstrarjáttan) 11.32.1.06

Í fíggjarlógini er nettoútreiðslujáttanin 0 kr. Játtaðar eru 2,8 mió.kr. í inntøkum og sama í útreiðslum. Nýttar eru 3,3 mió.kr. Játtanin er til umsiting av elveitingarlógini. Kunngerð um gjald fyri umsitingina av elveitingarlógini ásetir, at allar fyritøkur, sum hava fingið framleiðsluloyvi, skulu rinda eitt árligt gjald til fígging av útreiðslunum. Í 2017 hevur SEV goldið 3.225 t.kr., og Sp/f Røkt hevur goldið 66 t.kr. av umsitingini, sum liggur hjá Umhvørvisstovuni.

### 5.2.28 Ferð á grøna orku (rakstrarjáttan) 11.32.1.10

Í fíggjarlógini eru játtaðar 2 mió.kr. Minninýtslan er 177 t.kr. Sambært landsstýrismanninum vórðu verkætlanir ikki settar í verk fyri alla játtanina. Sum ásett í viðmerkingunum í fíggjarlógini, eru 500 t.kr. nýttar til at keypa orkudepilin á Kambsdali.

### 5.2.29 Stuðul til útoyggjamenning (stuðulsjáttan) 11.37.2.19

Í fíggjarlógini eru játtaðar 710 t.kr. Minninýtslan er 10 t.kr.

Tær verkætlanir og tiltøk, sum er stuðlað í 2017, eru:

| Goldið til: | kr. |
|---|---|
| Útoyggjafelagið, til rakstur av felagnum | 200.000 |
| Símun Gullaksen, til verkætlanina “Kellingagarður í Fugloynni” | 100.000 |
| Fugloyar kommuna, útoyggjastuðul – til at sleppa av við oljutunnur | 65.000 |
| Eyðun Eliassen, til flettingarrúm í Trøllanesi | 50.000 |
| Útoyggjafelagið, til útoyggjamenning | 40.000 |
| Joel Cole, til listaverkstað og gallerí á Kirkju í Fugloy | 40.000 |
| Bjarnafossur, til bátasavnið í Svínoy | 40.000 |
| Skúvoyar Fornminnafelag, til Skúvoyar Bygdasavn, at lýsa fuglaveiðu og bjargarøkt | 39.920 |
| Petur Elibert Danielsen, til at endureisa torvhús úti í Svínoy | 30.000 |
| Jógvan Edmund á Geilini, til upplivingarsetur í Svínoy | 30.000 |
| Jógvan Kristin Olsen, til kafé í Svínoy | 30.000 |
| Símun Gullaksen, til at menna ferða- og tænastuvinnuna í Fugloynni | 20.000 |
| Klaksvíkar kommuna, til busskýli í Mikladali, nevnt “Kappin” | 15.000 |

# 6 Almannamál

Yvirlitið niðanfyri vísir meir-/minninýtslu á høvuðskontum undir almannamálum.

*t.kr.*

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Meir-nýtsla | Minni-nýtsla |
|---|---|---|---|---|
| Javnstøðunevndin (Rakstrarj.) | 419 | 422 | 3 | |
| Almannamálaráðið (Rakstrarj.) | 12.924 | 12.754 | | 170 |
| Kvinnuluttøka í politikki (Rakstrarj.) | 314 | 184 | | 130 |
| Almannaverkið (Rakstrarj.) | 52.624 | 52.515 | | 109 |
| Dugni - skúlin (Rakstrarj.) | 3.732 | 3.720 | | 12 |
| Teknmálstulkatænastan (Stuðulsj.) | 1.310 | 1.310 | | 0 |
| Endurmenning (Rakstrarj.) | 5.468 | 5.262 | | 206 |
| Ráðg. fyri føroyingar í Danmark (Stuðulsj.) | 1.248 | 1.248 | | 0 |
| Stuðul til feløg (Stuðulsj.) | 5.690 | 5.690 | | 0 |
| Stuðul til fyriskipanir fyri heimleys (Stuðulsj.) | 3.950 | 3.950 | | 0 |
| Barnavernd (Lógarb. j.) | 1.810 | 1.656 | | 154 |
| Stuðul til Barnaverndarstovuna (Stuðulsj.) | 500 | 500 | | 0 |
| Einkjubarnastyrkur (Lógarb. j.) | 1.714 | 1.786 | 72 | |
| Barnapeningur veittur í forskoti (Lógarb. j.) | 1.038 | 1.064 | 26 | |
| Stuðul til uppihaldspening (Lógarb. j.) | 2.423 | 2.389 | | 34 |
| Barnaískoyti (Lógarb. j.) | 11.597 | 11.473 | | 124 |
| Familjuískoyti (Lógarb. j.) | 5.350 | 4.827 | | 523 |
| Ættleiðingarstuðul (Lógarb. j.) | 200 | 100 | | 100 |
| Felagið Barnabati (Stuðulsj.) | 450 | 450 | | 0 |
| Dagpeningaskipanin (Lógarb. j.) | 57.621 | 59.506 | 1.885 | |
| Stuðul til feløg teirra, ið bera brek (Stuðulsj.) | 3.732 | 3.732 | | 0 |
| Stuðul til feløg hjá eldri (Stuðulsj.) | 450 | 450 | | 0 |
| Bústovnar o.a. (Løguj.) | 6.106 | 6.106 | | 0 |
| Trivnaðartænastur (Rakstrarj.) | 301.913 | 301.307 | | 606 |
| Lán til ellis- og røktarheim (Stuðulsj.) | -3.868 | -3.878 | | 10 |
| Serflutningsskipan landsins (Stuðulsj.) | 1.137 | 1.105 | | 32 |
| Dugni - endurbúgving (Rakstrarj.) | 6.325 | 6.300 | | 25 |
| Sjóndepilin (Rakstrarj.) | 6.439 | 6.436 | | 3 |
| Vanlig forsorg (Lógarb. j.) | 118.246 | 116.523 | | 1.723 |
| Arbeiðsfremjandi tiltøk (Lógarb. j.) | 74.286 | 68.886 | | 5.400 |
| Fólkapensjón (Lógarb. j.) | 504.852 | 501.870 | | 2.982 |
| Fyritíðarpensjón (Lógarb. j.) | 260.280 | 259.888 | | 392 |
| Viðbót til ávísar pensjónistar (Lógarb. j.) | 26.287 | 26.059 | | 228 |
| Sjúkratrygd (Lógarb. j.) | 220 | 219 | | 1 |

## 6.1 Meirnýtsla/frávik

### 6.1.1 Einkjubarnastyrkur (lógarbundin játtan) 12.21.3.03
Í fíggjarlógini eru játtaðar 1,7 mió.kr. Meirnýtslan er 72 t.kr.

### 6.1.2 Barnapeningur veittur í forskoti (lógarbundin játtan) 12.21.3.04
Í fíggjarlógini er 1 mió.kr. játtað. Meirnýtslan er 26 t.kr. Talan er um eina nettojáttan, sum hevur tvær undirkontur.

*t.kr.*

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 01. Forskotsrindan | 12.208 | 11.139 | 1.069 |
| 02. Innkrevjing av forskotsrindan av barnapeningi | -11.170 | -10.075 | 1.095 |
| **Tilsamans** | **1.038** | **1.064** | **26** |

### 6.1.3 Dagpeningaskipanin (lógarbundin játtan) 12.21.4.01
Játtaðar eru 57,6 mió.kr. Meirnýtslan er 1,9 mió.kr. Upprunaliga var játtanin 58,6 mió.kr. Í eykajáttanarlógini fyri august 2017-5 varð játtanin lækkað 1 mió.kr.

*t.kr.*

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 01. Løntakarar | 60.252 | 62.210 | -1.958 |
| 02. Sjálvstøðug og húsarhaldsfólk | 1.039 | 789 | 250 |
| 04. Gjald fyri læknaváttanir | 930 | 1.004 | -74 |
| 09. Arbeiðsgevarans partur, dagpengar | -4.600 | -4.497 | -103 |
| **Tilsamans** | **57.621** | **59.506** | **-1.885** |

Sambært landstýrismanninum er høvuðsorsøkin til meirnýtsluna, at útreiðslurnar til løntakarar vórðu hægri seinastu 4 mánaðirnar, enn roknað varð við. Vanligar flytingarinntøkur, sum fevna um endurgjald frá tryggingarfeløgum, vóru eisini lægri enn mett.

Orsøkin til meirnýtsluna á undirkontu 04. Gjald fyri læknaváttanir er prísregulering av læknaváttanum fyri tíðarskeiðið 2014 til 2017.

## 6.2 Minninýtsla/frávik

### 6.2.1 Almannamálaráðið (rakstrarjáttan) 12.11.1.26
Í fíggjarlógini eru játtaðar 12,9 mió.kr. Minninýtslan er 170 t.kr. Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fimm undirkontur.

*t.kr.*

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Vanligt virksemi | 10.559 | 10.402 | 157 |
| 21. Ráð og nevndir | 198 | 17 | 181 |
| 25. SSP-samstarv | 400 | 387 | 13 |
| 26. Leigunevndin | 242 | 246 | -4 |
| 27. Verkætlanir Almannamálaráðið. | 1.525 | 1.702 | -177 |
| **Tilsamans** | **12.924** | **12.754** | **170** |

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at orsøkin til meirnýtsluna á undirkontu 27. Verkætlanir eru útreiðslur til ráðstevnu. Vanliga virksemið, sum hevur 157 t.kr. í minninýtslu, hevur fíggjað ein part av ráðstevnuni. Allar útreiðslurnar av ráðstevnuni eru bókaðar á verkætlanina.

Frávikið á undirkontu 21. Ráð og nevndir er m.a. orsakað av minni virksemi enn væntað hjá Markamótsnevndini, og at formaðurin fyri Ráðið fyri brekað fór frá; ongin formaður er settur aftur, tí arbeitt hevur verið við at umskipa ráðið.

### 6.2.2 Kvinnuluttøka í politikki (rakstrarjáttan) 12.11.1.48

Í fíggjarlógini eru játtaðar 314 t.kr. Minninýtslan er 130 t.kr. Sambært landsstýrismanninum er orsøkin, at nevndin ikki hevði so nógv tiltøk í árinum.

### 6.2.3 Almannaverkið (rakstrarjáttan) 12.21.1.02

Í fíggjarlógini eru játtaðar 52,6 mió.kr. Minninýtslan er 109 t.kr. Sambært landsstýrismanninum stavar minninýtslan í høvuðsheitum frá, at inntøkufíggjað virksemi hevði 604 t.kr. í avlopi.

*t.kr.*

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Vanligt virksemi | 45.444 | 45.986 | -542 |
| 21. Hjálpartólamiðstøðin | 7.165 | 7.126 | 39 |
| 24. Fakliga nevndin fyri børn við serligum tørvi | 15 | 7 | 8 |
| 40. Inntøkufíggjað virksemi, Hjálpartólamiðstøðin | 0 | -604 | 604 |
| **Tilsamans** | **52.624** | **52.515** | **109** |

### 6.2.4 Dugni - skúlin (rakstrarjáttan) 12.21.1.08

Játtaðar eru 3,7 mió.kr. Minninýtslan er 12 t.kr. Upprunaliga var játtanin 3,5 mió.kr. Í eykajáttanarlógini fyri august 2017 varð játtanin hækkað 200 t.kr.

### 6.2.5 Teknmálstulkatænastan (stuðulsjáttan) 12.21.1.10

Í fíggjarlógini eru játtaðar 1,3 mió.kr. Stuðulin er latin Teknmálstulkatænastuni, soleiðis sum ásett er í viðmerkingunum í fíggjarlógini.

### 6.2.6 Endurmenning (rakstrarjáttan) 12.21.1.12

Í fíggjarlógini eru játtaðar 5,5 mió.kr. Minninýtslan er 206 t.kr. Sambært landsstýrismanninum er orsøkin, at seint í 2017 fór starvsfólk úr starvi, nýtt starvsfólk varð ikki sett beinanvegin, og ávíst planlagt keypt varð ikki framt.

### 6.2.7 Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark (stuðulsjáttan) 12.21.1.19

Í fíggjarlógini eru játtaðar 1,2 mió.kr. Stuðulin er latin Ráðgevingini fyri føroyingum í Danmark, soleiðis sum ásett er í viðmerkingunum í fíggjarlógini.

### 6.2.8 Stuðul til feløg (stuðulsjáttan) 12.21.1.22

Í fíggjarlógini eru játtaðar 5,7 mió.kr. Játtanin hevur seks undirkontur:

*t.kr.*

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 01. Kreppumiðstøð | 1.290 | 1.290 | 0 |
| 02. Reyði Krossur | 200 | 200 | 0 |
| 06. KRIS | 1.200 | 1.200 | 0 |
| 08. Sorgbólkurin Berin | 800 | 800 | 0 |
| 10. Fountainhúsið | 2.000 | 2.000 | 0 |
| 11. Føroysk teldutala | 200 | 200 | 0 |
| **Tilsamans** | **5.690** | **5.690** | **0** |

### 6.2.9 Stuðul til fyriskipanir fyri heimleys (stuðulsjáttan) 12.21.1.23

Í fíggjarlógini eru játtaðar 4 mió.kr. Sambært viðmerkingunum í fíggjarlógini samstarva Almannaverkið og sjálvbodnir felagsskapir um skipan av serligum bútilboðum. Í 2017 eru 2 mió.kr. goldnar Herbergi Frelsunarhersins í rakstrarstuðli; somuleiðis eru 2 mió.kr. goldnar Bláa Krossi Føroya í rakstrarstuðli til serlig bútilboð.

### 6.2.10 Barnavernd (lógarbundin játtan) 12.21.3.01

Játtaðar eru 1,8 mió.kr. Minninýtslan er 154 t.kr. Upprunaliga var játtanin 1,7 mió.kr. Í eykajáttanarlógini fyri august 2017-5 varð játtanin hækkað 75 t.kr. til advokatumboðan.

*t.kr.*

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 04. Barnavernd | 1.335 | 1.131 | 204 |
| 05. Advokatumboðan | 475 | 525 | -50 |
| **Tilsamans** | **1.810** | **1.656** | **154** |

### 6.2.11 Stuðul til barnaverndarstovuna (stuðulsjáttan) 12.21.3.02

Í fíggjarlógini eru játtaðar 500 t.kr. Játtanin er goldin Barnaverndarstovu Føroya sum stuðul til rakstur av Barnahúsi.

### 6.2.12 Familjuískoyti (lógarbundin játtan) 12.21.3.09

Játtaðar eru 5,4 mió.kr. Minninýtslan er 523 t.kr. Upprunaliga var játtanin 7,8 mió.kr. Í eykajáttanarlógini fyri august 2017 varð játtanin lækkað 2,4 mió.kr.

### 6.2.13 Ættleiðingarstuðul (lógarbundin játtan) 12.21.3.13

Játtaðar eru 200 t.kr. Minninýtslan er 100 kr. Upprunaliga var játtanin 500 t.kr. Í eykajáttanarlógini fyri august 2017-5 varð játtanin lækkað 300 t.kr.

### 6.2.14 Felagið Barnabati (stuðulsjáttan) 12.21.3.16

Í fíggjarlógini eru játtaðar 450 t.kr. Stuðulin er latin Felagnum Barnabata, soleiðis sum ásett er í viðmerkingunum í fíggjarlógini.

### 6.2.15 Stuðul til feløg teirra, ið bera brek (stuðulsjáttan) 12.21.5.01

Í fíggjarlógini eru játtaðar 3,7 mió.kr. Játtanin hevur seks undirkontur:

*t.kr.*

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 01. Deyvafelagið | 932 | 932 | 0 |
| 03. MBF | 1.600 | 1.600 | 0 |
| 05. Hjálpargrunnur fyri óarbeiðsførar fiskimenn | 100 | 100 | 0 |
| 07. Javni | 500 | 500 | 0 |
| 08. Sinnisbati | 400 | 400 | 0 |
| 09. Føroya blindafelag | 200 | 200 | 0 |
| **Tilsamans** | **3.732** | **3.732** | **0** |

### 6.2.16 Stuðul til feløg hjá eldri (stuðulsjáttan) 12.21.5.04

Í fíggjarlógini eru játtaðar 450 t.kr. Sum ásett í viðmerkingunum í fíggjarlógini, er øll upphæddin goldin Landsfelag pensjónistanna.

### 6.2.17 Bústovnar o.a. (løgujáttan) 12.21.6.02

Í fíggjarlógini eru játtaðar 12 mió.kr. Óbrúkt játtan frá árinum frammanundan, 13,9 mió.kr., varð flutt fram, soleiðis at 25,9 mió.kr. vóru at brúka í 2017. Brúktar eru 6,1 mió.kr., og minninýtslan, 19,8 mió.kr., er við átekning flutt til 2018. Sambært landsstýrismanninum er høvuðsorsøkin til minninýtsluna, at seinkingar vóru í sambandi við at nútímansgera óhóskandi bústaðir og at byggja Fjálgalon (stovnur til eldri fólk við sálarsjúku).

### 6.2.18 Trivnaðartænastur (rakstrarjáttan) 12.21.6.09

Játtaðar eru 302 mió.kr. Minninýtslan er 606 t.kr. Upprunaliga var játtanin 299,5 mió.kr. Í eykajáttanarlógini fyri august 2017 varð játtanin hækkað 2,2 mió.kr., og við eykajáttanarlógini fyri august 2017-5 var játtanin aftur hækkað 250 t.kr.

*t.kr.*

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Vanligt virksemi | 284.282 | 286.618 | -2.336 |
| 21. Virksemi uttanlands | 17.631 | 14.689 | 2.942 |
| **Tilsamans** | **301.913** | **301.307** | **606** |

Sambært landsstýrismanninum er orsøkin til minninýtsluna á undirkontu 21. Virksemi uttanlands, at virksemið á § 27 uttanlands varð minni enn upprunaliga mett, at borgari undir § 32 skipanini uttanlands er farin úr skipanini, meðan virksemið í Føroyum hevur verið samsvarandi meir.

### 6.2.19 Lán til ellis- og røktarheim (stuðulsjáttan) 12.21.6.14

Í fíggjarlógini eru játtaðar 3,9 mió.kr. í inntøkum. Meirinntøkurnar eru 10 t.kr. Talan er um afturgjald av rentufríum lánum, sum landskassin veitti kommunum í Suðuroynni og Vágum til at byggja/umvæla ellis- og røktarheim fyri. Játtanin hevur tvær undirkontur.

*t.kr.*

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 01. Lán til ellis- og røktarheim í Vági | -2.666 | -2.666 | 0 |
| 02. Lán til ellis- og røktarheim í Vágum | -1.202 | -1.212 | 10 |
| **Tilsamans** | **-3.868** | **-3.878** | **10** |

### 6.2.20 Serflutningsskipan landsins (stuðulsjáttan) 12.21.6.17

Í fíggjarlógini er 1,1 mió.kr. játtað. Minninýtslan er 32 t.kr. Skipanin virkar í Tórshavnar kommuni, Klaksvíkar kommunu og í Eysturoynni. Sambært landsstýrismanninum er orsøkin til minninýtsluna, at útreiðslurnar av virkseminum í Eysturoynnni vóru minni enn væntað.

### 6.2.21 Vanlig forsorg (lógarbundin játtan) 12.21.7.01

Játtaðar eru 118,2 mió.kr. Minninýtslan er 1,7 mió.kr. Játtanin hevur fleiri undirkontur.

*t.kr.*

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 01. Fyribils hjálp § 9 | 32.071 | 32.477 | -406 |
| 02. Varandi veiting § 13 | 310 | 260 | 50 |
| 03. Stakútreiðslur § 15 | 1.851 | 1.591 | 260 |
| 04. Meirútreiðslur brekað barn § 17 | 14.075 | 14.671 | -596 |
| 06. Hjálparamboð v.m. § 18 | 27.241 | 27.327 | -86 |
| 07. Arbeiðsloysisforsorg § 9,2 | 25.993 | 23.622 | 2.371 |
| 08. Trygdarskipanir § 16 | 10.705 | 9.954 | 751 |
| 09. Hoyritól | 4.400 | 4.721 | -321 |
| 10. Serligur stuðul § 15 a | 1.600 | 1.900 | -300 |
| **Tilsamans** | **118.246** | **116.523** | **1.723** |

Upprunaliga var játtanin 110,7 mió.kr. Í eykajáttanarlógini fyri august 2017-5 varð játtanin hækkað 7,5 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum er høvuðsorsøkin til minninýtsluna, at útreiðslurnar til arbeiðsloysisforsorg halda fram at minka og vóru tær lægri seinnu helvt av árinum enn væntað.

### 6.2.22 Arbeiðsfremjandi tiltøk (lógarbundin játtan) 12.21.7.02

Játtaðar eru 74,3 mió.kr. Minninýtslan er 5,4 mió.kr. Upprunaliga var játtanin 68,7 mió.kr. Í eykajáttanarlógini fyri august 2017-5 varð játtanin hækkað 5,6 mió.kr.

Talan er um høvuðskontu, sum hevur tríggjar undirkontur.

*t.kr.*

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 02. Arbeiðsbúgving | 37.074 | 34.454 | 2.620 |
| 03. Tillagað starv | 22.812 | 21.755 | 1.057 |
| 04. Vart starv | 14.400 | 12.677 | 1.723 |
| **Tilsamans** | **74.286** | **68.886** | **5.400** |

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at orsøkin til, at undirkonta 02. Arbeiðsbúgving hevur 2,6 mió.kr. í minninýtslu, er, at gongdin fyrstu mánaðirnar var tann sama í 2017 sum í 2016, og tí varð væntað, at gongdin seinastu mánaðirnar av 2017 eisini fór at verða tann sama. Útgjaldið seinastu fýra mánaðirnar í 2017 gjørdist 2 mió.kr. minni enn sama tíðarskeið í 2016.

Sambært landsstýrismanninum hevði undirkonta 03. Tillagað starv havt meirnýtslu, men orsakað av afturførdari støðling á umleið 3 mió.kr. hevur kontan minninýtslu. Umbøn um at hækka játtanina 1,7 mió.kr. varð send Fíggjarmálaráðnum 10. november 2017, men hon varð ongantíð løgd fyri Løgtingið.

Minninýtslan á undirkontu 04. Vart starv stavar somuleiðis í høvuðsheitum frá umleið 1,4 mió.kr. í afturførdari støðling.

### 6.2.23 Fólkapensjón (lógarbundin játtan) 12.21.8.01

Játtaðar eru 504,9 mió.kr. Minninýtslan er 3 mió.kr. Upprunaliga var játtanin 496,9 mió.kr. Í eykajáttanarlógini fyri august 2017-5 varð játtanin hækkað 8 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum er orsøkin til minninýtsluna, at útreiðslurnar seinnu helvt av árinum øktust ikki so nógv sum væntað. Umbøn um at lækka játtanina 1,7 mió.kr. varð send Fíggjarmálaráðnum 10. november 2017, men hon varð ongantíð løgd fyri Løgtingið.

### 6.2.24 Fyritíðarpensjón (lógarbundin játtan) 12.21.8.05

Játtaðar eru 260,3 mió.kr. Minninýtslan er 392 t.kr. Upprunaliga var játtanin 263,9 mió.kr. Í eykajáttanarlógini fyri august 2017-5 varð játtanin lækkað 3,6 mió.kr.

Játtanin hevur fleiri undirkontur:

*t.kr.*

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 01. Hægsta fyritíðarpensjón | 166.054 | 166.745 | -691 |
| 02. Miðal fyritíðarpensjón | 61.903 | 61.832 | 71 |
| 03. Lægsta fyritíðarpensjón | 26.985 | 26.637 | 348 |
| 04. Avlamisveiting | 3.973 | 3.656 | 317 |
| 05. Læknaváttanir | 1.365 | 1.018 | 347 |
| **Tilsamans** | **260.280** | **259.888** | **392** |

### 6.2.25 Viðbót til ávísar pensjónistar (lógarbundin játtan) 12.21.8.13

Í fíggjarlógini eru játtaðar 26,3 mió.kr. Minninýtslan er 228 t.kr.

### 6.2.26 Sjúkratrygd (lógarbundin játtan) 12.34.4.04

Játtaðar eru 220 t.kr. Minninýtslan er 1 t.kr. Upprunaliga var játtanin 350 t.kr. Í eykajáttanarlógini fyri august 2017-5 varð játtanin lækkað 130 t.kr.

# 7 Uttanríkis- og vinnumál

Yvirlitið niðanfyri vísir meir-/minninýtslu á høvuðskontum undir uttanríkis- og vinnumálum.

*t.kr.*

| **Høvuðskonta** | **Játtan** | **Roknskapur** | **Meir-nýtsla** | **Minni-nýtsla** |
|---|---|---|---|---|
| Uttanríkis- og vinnumáláráðið (Rakstrarj.) | 20.846 | 19.822 | | 1.024 |
| Sendistovur (Rakstrarj.) | 15.526 | 15.615 | 89 | |
| Millumtjóða samstarv (Stuðulsj.) | 3.250 | 3.206 | | 44 |
| Neyðhjálp (Stuðulsj.) | 4.507 | 4.507 | | 0 |
| Menningarsamstarv (Stuðulsj.) | 1.993 | 1.986 | | 7 |
| Jarðfeingi (Rakstrarj.) | 8.674 | 8.673 | | 1 |
| Gjald fyri seismisk forkanningarloyvi (Stuðulsj.) | -75 | 0 | 75 | |
| Marknaðarf. av landgr. til kolvetnisl. (Rakstrarj.) | 0 | 0 | | 0 |
| Djóralæknatænastur (Rakstrarj.) | 650 | 598 | | 52 |
| Sjóvinnustýrið (Rakstrarj.) | 9.066 | 9.073 | 7 | |
| Havbúnaðarroyndir (Stuðulsj.) | 24.500 | 24.500 | | 0 |
| Fiskasjúkutænastur (Rakstrarj.) | 0 | 0 | | 0 |
| Sáttmálaeftirlit (Rakstrarj.) | 50 | 50 | | 0 |
| Loyvisnevndin (Rakstrarj.) | 186 | 186 | 0 | |
| Brúkaraumboð (Rakstrarj.) | 1.100 | 922 | | 178 |
| Vinnustovnurin (Rakstrarj.) | 6.134 | 5.634 | | 500 |
| Vinnuframi (Stuðulsj.) | 3.200 | 3.200 | | 0 |
| Endurgjald til skipasmíð (Stuðulsj.) | 25.538 | 25.538 | | 0 |
| Íverksetarahúsið í Klaksvík (Stuðulsj.) | 1.100 | 1.100 | | 0 |
| Filmshús (Rakstrarj.) | 1.000 | 982 | | 18 |
| Kolagrevstur (Stuðulsj.) | 700 | 700 | | 0 |
| Rúsdrekkasøla landsins (Rakstrarj.) | -16.848 | -16.951 | | 103 |
| Heilsufrøðiliga starvsstovan (Rakstrarj.) | 15.333 | 15.323 | | 10 |
| Lánsafturgjald (Stuðulsj.) | 0 | -46 | | 46 |
| P/f Visit Faroe Islands (Stuðulsj.) | 13.400 | 13.400 | | 0 |
| Limagjald til NATA (Stuðulsj.) | 500 | 500 | | 0 |
| Marknaðarføra Føroyar (Stuðulsj.) | 2.000 | 1.999 | | 1 |

## 7.1 Meirnýtsla/frávik

### 7.1.1 Sendistovur (rakstrarjáttan) 13.13.1.01

Í fíggjarlógini eru játtaðar 15,5 mió.kr. Meirnýtslan er 89 t.kr. Talan eru um høvuðskontu við fleiri undirkontum.

*t.kr.*

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 21. Sendistova Føroya til Evropasamveldið | 2.635 | 2.665 | -30 |
| 22. Sendistova Føroya til Danmarkar | 3.534 | 3.414 | 120 |
| 23. Sendistova Føroya til Bretlands og Írlands | 2.875 | 2.996 | -121 |
| 24. Sendistova Føroya til Íslands | 2.770 | 2.838 | -68 |
| 25. Sendistova Føroya til Russlands | 2.712 | 2.899 | -187 |
| 30. Marknaðarføra Føroyar | 1.000 | 803 | 197 |
| **Tilsamans** | **15.526** | **15.615** | **-89** |

Sambært landsstýrismanninum er meirnýtslan m.a. hækkaðar lønarútreiðslur og øktar bústaðarútreiðslur í Moskva. Broytingar í gjaldoyrakursum hava eisini ávirkað nýtsluna.

### 7.1.2 Gjald fyri seismisk forkanningarloyvi (stuðulsjáttan) 3.32.1.04

Í fíggjarlógini eru játtaðar 75 t.kr. í inntøkum. Ongin inntøka var í 2017.

### 7.1.3 Sjóvinnustýrið (rakstrarjáttan) 13.35.1.08

Í fíggjarlógini eru játtaðar 9,1 mió.kr. Meirnýtslan er 7 t.kr. Sambært Uttanríkis- og vinnumálaráðnum er orsøkin til meirnýtsluna m.a., at Sjóvinnustýrið hevur avskrivað ógoldin FAS-gjøld fyri 184 t.kr. Málini vórðu send til innheintingar, men niðurstøðan hjá Fútarættinum var, at onki kundi heintast inn, tí feløgini vóru farin á húsagang.

### 7.1.4 Loyvisnevndin (rakstrarjáttan) 13.37.1.08

Í fíggjarlógini eru játtaðar 186 t.kr. Meirnýtslan er 0,2 t.kr. Góðar 84 t.kr. eru goldnar í samsýningum til nevndina og 96 t.kr. fyri umsitingargjald til Rúsdrekkasølu landsins.

## 7.2 Minninýtsla/frávik

### 7.2.1 Uttanríkis- og vinnumálaráðið (rakstrarjáttan) 13.11.1.59

Játtaðar eru 20,8 mió.kr. Minninýtslan er 1 mió.kr. Upprunaliga var játtanin 20 mió.kr. Í eykajáttanarlógini fyri august 2017-5 varð játtanin hækkað 850 t.kr. Talan er um høvuðskontu við fýra undirkontum.

*t.kr.*

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Vanligt virksemi | 19.736 | 19.236 | 500 |
| 21. Marknaðarføring | 610 | 284 | 326 |
| 24. Maritimur tænastudepil | 500 | 313 | 187 |
| 45. Verkætlanir | 0 | -11 | 11 |
| **Tilsamans** | **20.846** | **19.822** | **1.024** |

### 7.2.2 Millumtjóða samstarv (stuðulsjáttan) 13.13.2.04

Í fíggjarlógini eru játtaðar 3,3 mió.kr. Minninýtslan er 44 t.kr. Talan eru um høvuðskontu við fleiri undirkontum.

*t.kr.*

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 01. The Northern Periphery | 870 | 855 | 15 |
| 02. IMO | 50 | 22 | 28 |
| 03. NORA | 250 | 250 | 0 |
| 04. Altjóða veiðifelagsskapir | 1.950 | 1.957 | -7 |
| 05. FAO og UNESCO | 130 | 122 | 8 |
| **Tilsamans** | **3.250** | **3.206** | **44** |

### 7.2.3 Neyðhjálp (stuðulsjáttan) 13.13.3.02
Játtaðar eru 4,5 mió.kr. Upprunaliga var játtanin 4 mió.kr. Í eykajáttanarlógini fyri august 2017-5 varð játtanin hækkað 507 t.kr.

Neyðhjálpin er latin til Reyða Kross, 1,1 mió.kr., World Food Programme, 1,4 mió.kr., og Grønlands Selvstyre, 2 mió.kr. (í.s.v. náttúruvanlukkuna í Nuugaatsiaq).

### 7.2.4 Menningarsamstarv (stuðulsjáttan) 13.13.3.04
Játtaðar eru 2 mió.kr. Minninýtslan er 7 t.kr. Upprunaliga var játtanin 2,5 mió.kr. Í eykajáttanarlógini fyri august 2017-5 varð játtanin lækkað 507 t.kr.

Stuðul er latin til:

| Heiti | kr. |
|---|---:|
| Voluntary Services Overseas | 850.000 |
| Christian Aid | 325.000 |
| Føroyska barnahjálpin | 40.000 |
| Oxfam GB | 500.000 |
| Womankind Worldwide | 270.000 |

### 7.2.5 Jarðfeingi (rakstrarjáttan) 13.32.1.03
Í fíggjarlógini eru játtaðar 8,7 mió.kr. Minninýtslan er 1 t.kr.

Umframt játtanina í fíggjarlógini fekk Jarðfeingi stuðul, 6,2 mió.kr., av Sindri pengum frá høvuðskontu 20.52.3.10 "Aðrar inntøkur".

### 7.2.6 Marknaðarføring av landgrunninum til kolvetnisleiting (rakstrarjáttan) 13.32.1.05
Í fíggjarlógini er nettojáttanin 0 kr.; 950 t.kr. til útreiðslur og sama til inntøkur. Útreiðslurnar eru til verkætlanir, og inntøkurnar eru frá høvuðskontu 20.52.3.10 "Víddargjøld".

### 7.2.7 Djóralæknatænastur (rakstrarjáttan) 13.33.1.04
Í fíggjarlógini eru játtaðar 650 t.kr. Minninýtslan er 52 t.kr. Peningurin er goldin tveimum privatum djóralæknafyritøkum fyri vaktarhald.

### 7.2.8 Havbúnaðarroyndir (stuðulsjáttan) 13.36.1.04
Játtaðar eru 24,5 mió.kr. Upprunaliga játtanin var 9,5 mió.kr. Í fíggjarnevndarskjali í juni 2017 varð játtanin hækkað 6 mió.kr. Í eykajáttanarlóg fyri august 2017-3 varð játtanin hækkað 9 mió.kr. til ábyrgdarpening til P/f Fiskaaling.

Í 2017 eru 15,5 mió.kr. goldnar til Fiskaaling í stuðli, og 9 mió.kr. eru goldnar Fiskaaling sum lán.

### 7.2.9 Fiskasjúkutænastur (rakstrarjáttan) 13.36.1.07
Í fíggjarlógini er nettojáttanin 0 kr. Ongin peningur er brúktur.

Á undirkontu 21 "Basan av fiskasjúkum" eru játtaðar 300 t.kr. í inntøkum og 300 t.kr. í útreiðslum. Sambært viðmerkingunum í fíggjarlógini er ætlanin, at alifeløgini skulu rinda viðlíkahald og menning av einari aliskipan, sum skal nýtast til yvirvøku av hóttandi sjúkum í alivinnuni.

### 7.2.10 Sáttmálaeftirlit (rakstrarjáttan) 13.37.1.07
Í fíggjarlógini eru játtaðar 50 t.kr. Upphæddin er goldin Vinnuframa fyri at umsita endurgjald til skipasmíð. Vinnuframi fær harumframt 50 t.kr. av rakstrarjáttan 13.11.59.21 fyri at umsita Invest.

### 7.2.11 Brúkaraumboð (rakstrarjáttan) 13.37.1.15

Í fíggjarlógini er 1,1 mió.kr. játtað. Minninýtslan er 178 t.kr. Lønarútreiðslurnar vóru um 50 t.kr. lægri enn mett, og endurgjald frá Leigunevndini v.m. var 78 t.kr. hægri enn mett.

### 7.2.12 Vinnustovnurin (rakstrarjáttan) 13.37.1.20

Í fíggjarlógini eru játtaðar 6,1 mió.kr. Minninýtslan er 500 t.kr. Talan eru um høvuðskontu við fleiri undirkontum.

*t.kr.*

| Undirkonta | Játtan | Inntøkur - útreiðslur | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|---|
| 20. Skráseting Føroya | 0 | 4.453 - 4.432 | -21 | 21 |
| 21. Kappingareftirlitið | 1.853 | 0 - 1.849 | 1.849 | 4 |
| 22. Fjarskiftiseftirlitið | 0 | 5.728 - 5.728 | 0 | 0 |
| 23. Tryggingareftirlitið | 0 | 3.806 - 3.806 | 0 | 0 |
| 24. Posteftirlitið | 0 | 24 - 24 | 0 | 0 |
| 25. Útlendingastovan | 4.281 | 0 - 3.806 | 3.806 | 475 |
| **Tilsamans** | **6.134** | **14.011 – 19.645** | **5.634** | **500** |

Útlendingastovan hevur goldið slakar 700 t.kr. minni í lønum, enn ætlað var í játtanini. Útlendingastovan hevur goldið 400 t.kr. til umvæling av bygninginum, sum stovnurin leigar, umframt 117 t.kr. í húsaleigu.

### 7.2.13 Vinnuframagrunnurin (stuðulsjáttan) 13.37.2.02

Í fíggjarlógini eru játtaðar 3,2 mió.kr. Upphæddin er goldin til Vinnuframa.

### 7.2.14 Endurgjald til skipasmíð (stuðulsjáttan) 13.37.2.04

Játtaðar eru 25,5 mió.kr. Onki er goldið út av játtanini, men øll upphæddin er avsett í fíggjarstøðuni til at rinda stuðul til skipasmíð. Upprunaliga var játtanin 2,6 mió.kr. Í eykajáttanarlógini fyri august 2017-4 varð játtanin hækkað 22,1 mió.kr. til skipasmiðjustuðul í sambandi við nýggja havrannsóknarskipið. Í eykajáttanarlógini fyri august 2017-5 varð játtanin eisini hækkað 800 t.kr.

### 7.2.15 Íverksetarahúsið í Klaksvík (stuðulsjáttan) 13.37.2.11

Í fíggjarlógini er 1,1 mió.kr. játtað. Upphæddin er goldin Íverksetarahúsinum í Klaksvík.

### 7.2.16 Filmshús (rakstrarjáttan) 13.37.2.12

Í fíggjarlógini eru játtaðar 1 mió.kr. Minninýtslan er 18 t.kr.

### 7.2.17 Kolagrevstur (stuðulsjáttan) 13.37.2.16

Í fíggjarlógini eru játtaðar 700 t.kr. Upphæddin er goldin Roynds Kolasølu.

### 7.2.18 Rúsdrekkasøla landsins (rakstrarjáttan.) 13.37.3.01

Í fíggjarlógini er nettoinntøkujáttanin 16,8 mió.kr. Nettoinntøkan varð 17 mió.kr.

125 mió.kr. vórðu játtaðar til inntøkur og 108,2 mió.kr. til útreiðslur. Inntøkurnar vórðu 133,3 mió.kr. og útreiðslurnar 116,3 mió.kr.

### 7.2.19 Heilsufrøðiliga starvsstovan (rakstrarjáttan) 13.37.5.04

Í fíggjarlógini eru játtaðar 15,3 mió.kr. Minninýtslan er 10 t.kr.

### 7.2.20 Lánsafturgjald (stuðulsjáttan) 13.37.6.01

Onki er játtað. Talan er um gamla skuld, har samanlagt 46 t.kr. eru goldnar inn ella avskrivaðar.

### 7.2.21 P/f Visit Faroe Islands (stuðulsjáttan) 13.38.5.02
Í fíggjarlógini eru játtaðar 13,4 mió.kr. Upphæddin er goldin P/f Visit Faroe Islands.

### 7.2.22 Limagjald til NATA (stuðulsjáttan) 13.38.5.03
Í fíggjarlógini eru játtaðar 500 t.kr. Upphæddin er goldin North Atlantic Tourism Association.

### 7.2.23 Marknaðarføra Føroyar (stuðulsjáttan) 13.38.5.05
Í fíggjarlógini eru játtaðar 2 mió.kr.

Til marknaðarføring av Føroyum innanlands eru goldnar 1.524 t.kr.

| Stuðul latin til | kr. |
|---|---|
| Ferðavinnan í Suðuroy | 240.000 |
| Visit Vágar | 240.000 |
| Ferðavinnan í Eysturoy | 240.000 |
| Ferðavinnan í Norðoyggjum | 240.000 |
| Felagið Tórshavn | 240.000 |
| Sandoyar sýslu ferðalag | 240.000 |
| Visit Vágar, til kunningardisk í.s.v. ferðavinnu | 84.000 |

Til marknaðarføring av Føroyum uttanlands eru goldnar 475 t.kr.

| Stuðul latin til | kr. |
|---|---|
| Shain Gaini, altjóða ráðstevna NSCMID 2017 | 100.000 |
| Kunningarstovan, ráðstevna – Access Vestnorden | 100.000 |
| P/f Smyril Line, lýsingarátak í Íslandi | 74.000 |
| Sp/f Guðrun & Guðrun, Awareness Rising event í New York | 60.000 |
| Sp/f Marcon, Epilepsiráðstevna | 51.000 |
| Sp/f Hiking, Hiking.fo | 50.000 |
| Tórshavn maraton, Bragdið, lýsingarátak | 20.000 |
| P/f Greengate, lýsingarátak í Norra | 20.000 |

# 8 Samferðslumál

Yvirlitið niðanfyri vísir meir-/minninýtslu á høvuðskontum undir samferðslumálum.

*t.kr.*

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Meir-nýtsla | Minni-nýtsla |
|---|---|---|---|---|
| Landsins ognir (Rakstrarj.) | -908 | -811 | 97 | |
| Umvæling av almennum bygningum (Løguj.) | 21.000 | 21.298 | 298 | |
| Almennir bygningar, søla (Løguj.) | -43.000 | -6.733 | 36.267 | |
| Samferðslumálaráðið (Rakstrarj.) | 4.927 | 4.258 | | 669 |
| Landsins ognir (Løguj.) | 2.000 | 2.015 | 15 | |
| Vanlukkutryggingarráðið (Rakstrarj.) | 0 | 0 | | 0 |
| Umsiting av Vinnusjúkugrunninum (Rakstrarj.) | 0 | 0 | | 0 |
| Landsverk (Rakstrarj.) | 62.135 | 62.466 | 331 | |
| Nýggir landsvegir (Løguj.) | 12.373 | 12.373 | | 0 |
| Havnir (Løguj.) | 4.300 | 4.480 | 180 | |
| Stuðul til infrakervið á útoyggjum (Stuðulsj.) | 700 | 559 | | 141 |
| Stuðul til havnir (Stuðulsj.) | 200 | 113 | | 87 |
| Strandfaraskip landsins (Rakstrarj.) | 147.541 | 147.752 | 211 | |
| Strandfaraskip landsins (Løguj.) | 23.446 | 23.445 | | 1 |
| Tyrlutænastan (Rakstrarj.) | 14.300 | 14.300 | | 0 |
| Vága floghavn (Løguj.) | 0 | 0 | | 0 |
| Flogferðsla (Løguj.) | 0 | 0 | | 0 |
| Stuðul til útoyggjar (Stuðulsj.) | 1.500 | 1.398 | | 102 |
| P/f Eystur- og Sandoyartunlar (Stuðulsj.) | 35.000 | 35.000 | | 0 |
| Akstovan (Rakstrarj.) | -1.000 | -1.109 | | 109 |
| Ráðið fyri ferðslutrygd (Stuðulsj.) | 1.000 | 1.000 | | 0 |
| Semingsmannaskipanin (Rakstrarj.) | 500 | 747 | 247 | |
| Fastur gerðarrættur (Stuðulsj.) | 700 | 700 | | 0 |
| Arbeiðs- og brunaeftirlitið (Rakstrarj.) | 6.239 | 6.216 | | 23 |
| Barsilsskipan (Lógarb. j.) | 0 | 0 | | 0 |
| Umsiting av barsilsskipan (Rakstrarj.) | 0 | 0 | | 0 |

## 8.1 Meirnýtsla/frávik

### 8.1.1 Landsins ognir (rakstrarjáttan) 17.11.1.23

Í fíggjarlógini er játtað nettoinntøka 908 t.kr. Meirnýtslan er 97 t.kr. Talan er um høvuðskontu við fýra undirkontum.

*t.kr.*

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Oljugoymslur o.a. | -1.200 | -1.200 | 0 |
| 21. Húsaleiga og íbúðargjald | 55 | 45 | 10 |
| 22. Leiga av økjum, uppisitaraavgjald o.a. | 17 | 16 | 1 |
| 23. Yvirtiknar ognir | 220 | 328 | -108 |
| **Tilsamans** | **-908** | **-811** | **-97** |

Størsti munur ímillum játtan og nýtslu er á undirkontu 23. Játtaðar eru 2,4 mió.kr. til útreiðslur og 2,2 mió.kr. til inntøkur. Sambært landsroknskapinum gjørdust útreiðslurnar 3,1 mió.kr. og inntøkurnar 2,8 mió.kr.

### 8.1.2 Umvæling av almennum bygningum (løgujáttan) 17.11.1.56

Í fíggjarlógini eru játtaðar 21 mió.kr. Meirnýtslan er 298 t.kr. Sambært landsstýrismanninum er orsøkin, at tá ið gamlir bygningar verða umvældir, er tað tíðum, at komið verður fram á ymisk viðurskifti, sum ikki kann bíðast við, men mugu tey gerast, meðan arbeiðið er í gongd.

### 8.1.3 Almennir bygningar, søla (løgujáttan) 17.11.1.58

Í fíggjarlógini eru játtaðar 43 mió.kr. í inntøkum frá sølu av almennum bygningum í 2017. Minniinntøkan er 36,3 mió.kr. Játtanin til sølu av landsins bygningum er ein fíggjarlig heimild til at kunna selja bygningar hjá landinum.

Sambært Samferðslumálaráðnum eru bygningar landsins 185 í tali, umleið 250.000 fermetrar tilsamans. Í 2017 vórðu 2 bygningar seldir: Kommandørhúsið yviri við Strond fyri 4,4 mió.kr. og ognin á Klaksvíksvegi 60 fyri 2,3 mió.kr.

Landstýrismaðurin hevur víst á, at løgtingsgrannskoðararnir hava áður gjørt vart við, at sølujáttanin á fíggjarlógini eigur at verða veruleikakend. Samferðslumálaráðið skrivar m.a. soleiðis til løgtingsgrannskoðararnar um málið, at:[3] *"Samferðslumálaráðið er samt við løgtingsgrannskoðararnar um, at sølujáttanin á fíggjarlógni eigur at vera veruleikakend, men kann tað verða trupult at meta um..".* Hetta verður grundað soleiðis, at: *"Semja skal vera við avvarðandi landsstýrismenn, sum hava málsræði yvir teirra bygningar, hvørjir bygningar skulu seljast. Tíðarskeiðið, frá tí at arbeitt verður við fíggjarlógaruppskotinum, til endalig avgerð verður tikin um sølu, er nógso drúgt, og kunnu onnur uppskot tá vera frammi."*

*"Landið eigur sum tilskilað nógvar bygningar, men hevur samstundis sera nógv leigumál. Nú nýggur miðnámsskúli verður bygdur við Marknagil, hevur ætlanin verið at selt nakrar av bygningunum, har miðnámsskúlarnir nú húsast. Nú hevur verið umrøtt at brúka bygningarnar til onnur endamál hjá landinum, til dømis til skúlabrúk".*

Landsstýrismaðurin vísir á, at inntøkujáttanin í fíggjarlógini 2018 fyri sølu av bygningum er 30 mió.kr., og at inntøkujáttanin lækkar í íløguætlanini næstu árini.

Sambært landsstýrismanninum er støðan nú soleiðis, at tveir bygningar hjá Tekniska skúla eru seldir higartil í ár (2018) fyri 9,1 mió.kr., og ein er á sølulista. Søla av bygningum verður leysliga mett til 12-14 mió.kr. í 2018.

Samanumtikið heldur landsstýrismaðurin, at ein inntøkujáttan uppá 43 mió.kr. er fullkomiliga órealistisk, og játtanin uppá 30 mió.kr. í 2018 er eisini alt ov høgt sett. Inntøkan seinastu 3 árini hevur verið 5,2 mió.kr. í miðal og verður millum 12 og 14 mió.kr. í 2018.

### 8.1.4 Landsins ognir (løgujáttan) 17.11.1.62

Játtaðar eru 2 mió.kr. Meirnýtslan er 15 t.kr. Upprunaliga var ongin játtan í fíggjarlógini. Í eykajáttanarlógini fyri august 2017 vórðu 2 mió.kr. játtaðar til at keypa nýggja mastur til at seta upp á Sornfelli. Upphædddin er brúkt til at keypa nýggja mastur fyri og til at rudda upp eftir stormskaða.

[3] Svarskriv frá Samferðslumálaráðnum til Løgtingsgrannskoðararnar, dagfest 17. oktober 2016, um uppfylging av grannskoðan av Samferðslumálaráðnum.

### 8.1.5 Landsverk (rakstrarjáttan) 17.38.1.02

Játtaðar eru 62,1 mió.kr. Meirnýtslan er 331 t.kr. Upprunaliga var játtanin 59,8 mió.kr. Í eykajáttanarlógini fyri august 2017-5 varð játtanin hækkað 2,3 mió.kr. Talan er um høvuðskontu við fleiri undirkontum.

*t.kr.*

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Landsverksskrivstovan | 8.185 | 8.027 | 158 |
| 22. Byggi- og bygningsumsiting landsins | 3.400 | 3.454 | -54 |
| 23. Royndarverkætlan við orkusparing í lands. bygn. | 0 | -20 | 20 |
| 30. Landsvegahald | 44.250 | 45.077 | -827 |
| 35. Havnir | 5.145 | 4.878 | 267 |
| 38. Flogferðsla | 1.155 | 1.089 | 66 |
| 40. Inntøkufíggjað virksemi | 0 | -39 | 39 |
| **Tilsamans** | **62.135** | **62.466** | **-331** |

Landsstýrismaðurin vísir á, at (brutto)útreiðslurnar vóru 165 mió.kr., og frávikið í mun til samlaðu útreiðslurnar var bert 0,2%. Á undirkontustøði vóru útreiðslurnar til landsvegahaldið eitt sindur hægri enn játtað. Tað var serliga tí, at vetrarhaldið gjørdist eitt sindur meira umfatandi, enn roknað varð við.

#### Undirkonta 20. Landsverksskrivstovan

Játtanin er til útreiðslur til høvuðsleiðslu, skrivstovu, bókhald og aðrar innanhýsis tænastur. Undirkonta 20 býtt á høvuðsslag:

*t.kr.*

| Høvuðsslag | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| Rakstrarútreiðslur | 9.115 | 17.484 | -8.369 |
| Rakstrarinntøkur | -580 | -1.070 | 490 |
| Flytingar millum almennar myndugleikar | -350 | -8.387 | 8.037 |
| **Tilsamans** | **8.185** | **8.027** | **158** |

#### Undirkonta 22. Byggi- og bygningsumsiting landsins

Játtanin er til at umsita landsins bygningar. Umsitingin fatar bæði um byggi- og viðlíkahalds-uppgávur. Sambært viðmerkingunum í fíggjarlógini verður størsti parturin av útreiðslunum fíggjaður av ymisku løguætlanunum við innanhýsis flytingum.

Undirkonta 22 býtt á høvuðsslag:

*t.kr.*

| Høvuðsslag | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| Rakstrarútreiðslur | 16.780 | 12.295 | 4.485 |
| Rakstrarinntøkur | -100 | -278 | 178 |
| Flytingar millum almennar myndugleikar | -13.280 | -8.563 | -4.717 |
| **Tilsamans** | **3.400** | **3.454** | **-54** |

### Undirkonta 23. Royndarverkætlan við orkusparing í landsins bygningum

Sambært viðmerkingunum í fíggjarlógini var ætlanin í 2016 at fara undir royndarverkætlan um orkusparing í landsins bygningum eftir ESCO leistinum. Verkætlanin varð ikki framd. Aðrir møguleikar fyri hvussu orkusparing og viðlíkahald av landsins bygningum kunnu fíggjast og fremjas verða kannaðir.

Undirkonta 23 býtt á høvuðsslag:

*t.kr.*

| Høvuðsslag | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| Rakstrarútreiðslur | 3.060 | -20 | 3.080 |
| Flytingar millum almennar myndugleikar | -3.060 | 0 | -3.060 |
| **Tilsamans** | **0** | **-20** | **20** |

Roknskapurin á undirkontu 23 býttur á standardroknskaparkontur:

*kr.*

| Standardroknskaparkonta | Roknskapur |
|---|---|
| 1411. Ferðing og flutningur, alment sett - uttanlands | 13.406 |
| 1443. Orkukeyp, maskinur, flutningsútbúnaður o.a., olja, oljuúrdráttir og orka annars | -132.169 |
| 1469. Keyp av vørum annars. | 6.900 |
| 1472. Grannskoðanar-, rokskapa- og løgfrøðiligar tænastur | 6.000 |
| 1479. Keyp av tænastuveitingum annars | 85.520 |
| 7510. Keyps-mvg land | -8.437 |
| 7599. Endurringar av keyps-mvg | 8.437 |
| **Tilsamans** | **-20.343** |

### Undirkonta 30. Landsvegahald

Á undirkontu 30. Landsvegahald eru 10,2 mió.kr. innanhýsis flytingar millum almennar stovnar (inntøkur), harav 5,4 mió.kr. eru vegna “*eftirregulering, ov nógv fakturerað*” frá øðrum deildum hjá Landsverki, eftir at stovnurin hevur broytt roknskaparhátt í 2017 til, at Landsvegahald umvælir og viðlíkaheldur allar maskinur og amboð, ístaðin fyri sum fyrr, at “Inntøkufíggjað virksemi” átti amboð og bilar og leigaði tey út til hinar deildirnar.

Undirkonta 30. Landsvegahald býtt á høvuðsslag:

*t.kr.*

| Høvuðsslag | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| Rakstrarútreiðslur | 47.250 | 52.430 | -5.180 |
| Rakstrarinntøkur | -1.750 | -1.248 | -502 |
| Løguútreiðslur | 0 | -11 | 11 |
| Flytingar millum almennar myndugleikar | -1.250 | -6.093 | 4.843 |
| **Tilsamans** | **44.250** | **45.078** | **-828** |

### Undirkonta 40. Inntøkufíggjað virksemi

Játtanin til inntøkur á undirkontu 40. Inntøkufíggjað virksemi var 72 mió.kr. Undirkonta 40 býtt á høvuðsslag:

*t.kr.*

| Høvuðsslag | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| Rakstrarútreiðslur | 72.000 | 76.017 | -4.017 |
| Rakstrarinntøkur | -72.000 | -81.595 | 9.595 |
| Flytingar millum almennar myndugleikar | | 5.539 | -5.539 |
| **Tilsamans** | **0** | **-39** | **39** |

### 8.1.6 Nýggir landsvegir (løgujáttan) 17.38.1.07

Í fíggjarlógini eru játtaðar 11 mió.kr. netto. 7,6 mió.kr. eru við átekning fluttar frá farnum fíggjarárum. Í eykajáttanarlógini fyri august 2017-5 er játtanin lækkað 3 mió.kr. Nýtslan er 12,4 mió.kr. Minninýtslan 3,3 mió.kr. er við átekning flutt til 2018.

Landsstýrismaðurin vísir á, at Løgtingið hvørt ár játtar pening til vegagerð til fleiri ymiskar verkætlanir. Landsverk heldur seg sum meginreglu til tað, Løgtingið hevur játtað til einstøku verkætlanirnar.

Landsstýrismaðurin vísir eisini á, at Landsvegagerð er ein høvuðskonta, og heimild er at flyta millum einstøku verkætlanirnar, soleiðis at mest fæst burturúr játtanini.

Sambært landsstýrismanninum var játtan og nýtsla til nýggjar landsvegir 2017 býtt soleiðis:

*t.kr.*

| Vegir, verkætlanir | Játtan 2017 | Flutt fram frá 2016 | Eyka-játtan | Játtan í alt 2017 | Nýtsla | Meir/minni-nýtsla |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Innkomuvegurin | 0 | 3.548 | -3.000 | 548 | 601 | -53 |
| Kalsoy, vegir og tunlar | 2.000 | 310 | | 2.310 | 1.650 | 660 |
| Dagf. av brúm og tunlum | 3.000 | 365 | | 3.365 | 3.127 | 238 |
| Ferðsluætlan Vágar | 0 | 777 | | 777 | 1.411 | -634 |
| Trygdartiltøk | 5.100 | 586 | | 5.686 | 4.627 | 1.059 |
| Farleið til Dals | 1.000 | 0 | | 1.000 | 179 | 821 |
| Hvalbiartunnilin | 0 | 2.042 | | 2.042 | 778 | 1.264 |
| Søla av løgu | -100 | | | -100 | | -100 |
| **Tilsamans** | **11.000** | **7.628** | **-3.000** | **15.628** | **12.373** | **-3.255** |

Sambært landsstýrismanninum vísir tað seg altíð, at gongdin við nøkrum verkætlanum er øðrvísi enn soleiðis, sum játtanin er lutað sundur á verkætlanir, og hvussu játtað verður yvir fíggjarár. Ofta eru fyrireikingarnar ikki gjørdar lidnar, tá ið játtað verður, og tí verður ein játtan í fyrstu syftu ofta brúkt til aðrar verkætlanir í fíggjarárinum, sum ganga betri og skjótari. Tað er eisini út frá einum samfelagsbúskaparligum sjónarhorni besti háttur at brúka peningin, soleiðis at verkætlanirnar kunnu gerast lidnar uttan steðg, og nyttan tískil fæst skjótari av íløguni.

Játtanin var til 4 høvuðsendamál/verkætlanir í 2017, men við framflytingum av játtanum frá farnum fíggjarárum, samanlagt til 7 høvuðsendamál/verkætlanir. Landsstýrismaðurin greiðir soleiðis frá størru frávikunum:

#### Innkomuvegurin til Tórshavn

Samferðslumálaráðið og Tórshavnar kommuna gjørdu í oktober 2016 eina avtalu um innkomuvegin til Tórshavn. Partarnir hava avtalað, hvørji vegastrekkir, íbindingar og flættingar, ið ávikavist landið og kommunan gera og varða av.

Tá ferðslutrýstið ger tað neyðugt, verður ein tunnil gjørdur á strekkinum frá Villingardalsvegnum og vestureftir til Oyggjarvegin, har landið og Tórshavnar kommuna fíggja gerð av tunlinum helvt um helvt. Aðrar loysnir hava verið nevndar.

Landsins partur (uttan tunnilin) verður leysliga mettur til at kosta 115 mió.kr. Tunnilsfelagið sjálvt skal fíggja ein part av vegagerðini, og skal grót frá undirsjóvartunlinum í størst møguligan mun verða nýtt til vegagerðirnar.

Síðani avtalan varð gjørd, eru ávísar fyrireikingar gjørdar, men høvuðsarbeiðið er ikki rættiliga komið í gongd. Til tess krevst hægri játtan. Talan er um stóra og týðandi verkætlan, har verklagslóg skal gerast.

#### Vegagerð í Kalsoy, vegir og tunlar

2 mió.kr. vóru til verkætlanina. Harumframt vóru 310 t.kr. fluttar fram frá 2016, soleiðis at játtanin samanlagt var 2,3 mió.kr. Nýtslan var 1,65 mió.kr., sum er ein minninýtsla uppá 660 t.kr.

Arbeiðið fevnir um ábøtur og liðugtgerð av vegakervinum í oynni, herímillum eisini tunlar, sum ongantíð eru gjørdir lidnir, og at dagføra vegakervið sum eina heild. Peningur hevur verið játtaður til endamálið seinastu 20 árini (1998 til 2018).

Í 2017 er nakað av asfaltering gjørd bæði í Mikladali og Syðradali, umframt at ljós eru sett upp bæði í Ritudalstunlinum og í Villingardalstunlinum. Onnur smærri arbeiðir eru eisini framd. Onkrar smærri seinkingar vóru.

### Ferðsluætlan Vágar

Í tíðarskeiðinum 2014 til 2017 eru 8,9 mió.kr. brúktar til ymiskar ferðsluverkætlanir í Vágum. Ongin játtan var til endamálið í 2017, men vóru 777 t.kr. fluttar fram frá 2016. Nýtslan var 1,4 mió.kr. Játtanin í 2017 var brúkt til eina rundkoyring í Sandavági, sum nú er liðug.

### Trygdartiltøk, ábøtur og umvælingar

5,1 mió.kr. vóru til trygdartiltøk, ábøtur og umvælingar í 2017. Harumframt vóru 586 t.kr. fluttar frá 2016, soleiðis at játtanin samanlagt var 5,7 mió.kr. Nýtslan var 4,6 mió.kr., sum er ein minninýtsla uppá 1 mió.kr.

Játtanin varð brúkt til 7 verkætlanir kring alt landið, umframt fleiri smávegis arbeiði. Flestu verkætlanirnar gingu sum ætlað. Tað kann vera trupult at leggja øll arbeiði so nágreiniliga til rættis, soleiðis at øll játtanin verður brúkt hvørt einstakt ár.

### Farleið til Dals, tryggja verandi veg

1 mió.kr. var játtað til farleið til Dals. Nýtslan var 179 t.kr., og var minninýtslan 821 t.kr. Játtanin varð brúkt til at tryggja vegin fyri leyst grót oman fyri farleiðina til Dals.

### Hvalbiartunnilin

Ongin játtan var til Hvalbiartunnilin, men 2 mió.kr. vóru fluttar frá 2016. Nýtslan var 778 t.kr. Játtanin varð brúkt til framhaldandi at fyrireika Hvalbiartunnilin.

19. desember 2017 varð semja gjørd um endaligu linjuføringina til Hvalbiartunnilin. Verklagslóg um Hvalbiartunnil við tilhoyrandi vegum varð samtykt í apríl í ár (2018), og var tástaðni grundarlag fyri at gera endaligu fyrireikingarnar. Prosjekteringin og allar fyrireikingar verða lidnar í 2018. Ætlanin er at bjóða arbeiðið at gera tunnilin út, soleiðis at tað kann byrja í 2019.

## 8.1.7 Havnir (løgujáttan) 17.38.1.14

Játtanin til havnir er 4,3 mió.kr. Meirnýtslan er 180 t.kr. Upprunaliga var játtanin 3,1 mió.kr. Í august 2017 varð játtanin við fíggjarnevndarskjali hækkað 1,2 mió.kr.

*t.kr.*

| Verkætlanir | Játtan 2017 | Eykajáttan | Játtan í alt | Nýtsla | Avlop |
|---|---|---|---|---|---|
| Havnir í Svínoy | 900 | 0 | 900 | 900 | 0 |
| Smáábøtur | 2.200 | 0 | 2.200 | 1.834 | 366 |
| Rudding av innsigl. Skopun | 0 | 1.200 | 1.200 | 1.746 | -546 |
| **Tilsamans** | **3.100** | **1.200** | **4.300** | **4.480** | **-180** |

### Havnin í Svínoy

Landsstýrismaðurin hevur kunnað um, at verkætlanin snýr seg um at gera ein skráa til akfarsflutning við lendingina í Svínoy fyri at bøta um lendingarviðurskiftini á oynni. Orsakað av illveðri dró arbeiðið út í 2017. Eftir ætlan verður verkætlanin liðug í 2018.

### Rudding av innsiglingini í Skopun

Sambært landsstýrismanninum varð arbeiðið at rudda innsiglingina til Skopunar havn meira umfatandi enn roknað við frammanundan, og tessvegna nakað dýrari.

### 8.1.8 Strandfaraskip landsins (rakstrarjáttan) 17.38.2.01

Í fíggjarlógini eru játtaðar 147,5 mió.kr. Meirnýtslan er 211 t.kr. Strandferðslan er ein landsfyritøka. Játtaðu inntøkurnar vóru 62 mió.kr. Inntøkurnar sambært roknskapinum vóru 67,4 mió.kr. Útreiðslurnar vóru samsvarandi størri.

Játtanin til Strandfaraskip landsins býtt á høvuðsslag:

*t.kr.*

| Høvuðsslag | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| Rakstrarútreiðslur | 209.541 | 215.482 | -5.941 |
| Rakstrarinntøkur | -62.000 | -67.372 | 5.372 |
| Flytingarútreiðslur | 0 | 295 | -295 |
| Flytingar millum almennar myndugleikar | 0 | -653 | 653 |
| **Tilsamans** | **147.541** | **147.752** | **-211** |

### 8.1.9 Semingsmannaskipanin (rakstrarjáttan) 17.39.1.01

Í fíggjarlógini eru játtaðar 500 t.kr. Meirnýtslan er 247 t.kr. Sambært landsstýrismanninum fór Pedagogfelagið í verkfall í desember 2017, og gjørdi Semingsstovnurin fleiri semingsroyndir millum partarnar seinast í árinum. Tað kostaði 394 t.kr.

## 8.2 Minninýtsla/frávik

### 8.2.1 Samferðslumálaráðið (rakstrarjáttan) 17.11.1.60

Í fíggjarlógini eru játtaðar 4,9 mió.kr. Minninýtslan er 669 t.kr. Landsstýrismaðurin hevur kunnað um, at lønarútreiðslurnar vóru lægri, enn roknað varð við frammanundan, m.a. tí at tvey starvsfólk fóru niður í tíð, onki varð brúkt til samsýningar, og onki nýtt starvsfólk varð sett. Viðvíkjandi keypi av vørum og tænastum var at kalla onki brúkt til løgfrøðiligar tænastur ella serkunnleika. Yvirhøvur varð hildið aftur innan øll øki.

### 8.2.2 Vanlukkutryggingarráðið (rakstrarjáttan) 17.21.1.13

Talan er um eina nettojáttan; játtaðar eru 1,5 mió.kr. í útreiðslum og sama í inntøkum. Sambært roknskapinum eru útreiðslurnar 1,3 mió.kr. og inntøkurnar 1,3 mió.kr.

Tryggingarfeløgini hava rindað 1,2 mió.kr. av inntøkunum.

### 8.2.3 Umsiting av Vinnusjúkugrunninum (rakstrarjáttan) 17.21.1.15

Nettoútreiðslujáttanin er 0 kr. Játtaðar eru 950 t.kr. í inntøkum og sama í útreiðslum Útreiðslurnar eru 601 t.kr. og inntøkurnar 601 t.kr. Inntøkurnar koma frá Vinnusjúkugrunninum.

### 8.2.4 Stuðul til infrakervið á útoyggjum (stuðulsjáttan) 17.38.1.18

Í fíggjarlógini eru játtaðar 700 t.kr. Minninýtslan er 141 t.kr.

Stuðulin er latin til kommunur: Fugloyar kommuna, 199 t.kr., Stóra Dímun, 100 t.kr. umframt 61 t.kr. til liðuggerð av ljósanleggi á tyrlupallinum og Mykines til tangabil, 200 t.kr.

### 8.2.5 Stuðul til havnir (stuðulsjáttan) 17.38.1.21

Játtaðar eru 200 t.kr. Minninýtslan er 87 t.kr. Upprunaliga var ongin játtan. Í eykajáttanarlógini fyri august 2017-5 vórðu 200 t.kr. játtaðar til at meta um kostnaðin og at fyrireika verkætlan, í sambandi við skaða á pierin í Dali.

### 8.2.6 Tyrlutænastan (rakstrarjáttan) 17.38.2.04

Í fíggjarlógini eru játtaðar 14,3 mió.kr. Upphæddin er goldin til Atlantic Airways fyri sáttmála um tyrlutænastu.

### 8.2.7 Vága floghavn (løgujáttan) 17.38.2.09

Í fíggjarlógini eru játtaðar 11 mió.kr. í inntøkum og 11 mió.kr. í útreiðslum. Brúktar eru 10,7 mió.kr. Upphæddin er fyri ognartøku av lendi, sum er latið Vága Floghavn.

### 8.2.8 Flogferðsla (løgujáttan) 17.38.2.13
Ongin játtan er í fíggjarlógini. 21 t.kr. eru brúktar og fluttar av fíggjarstøðuni. Saldan í fíggjarstøðuni er nú -7 t.kr.

### 8.2.9 Stuðul til útoyggjar (stuðulsjáttan) 17.38.2.21
Játtaðar eru 1,5 mió.kr. Minninýtslan er 102 t.kr. Upprunaliga var játtanin 1 mió.kr. Í eykajáttanarlógini fyri august 2017-5 varð játtanin 500 t.kr. Posta hevur fingið 151 t.kr. og Atlantic Airways 580 t.kr. í útjavningarstuðli. Strandferðslan hevur fingið 667 t.kr.

### 8.2.10 P/f Eystur- og Sandoyartunlar (stuðulsjáttan) 17.38.2.25
Í fíggjarlógini eru játtaðar 35 mió.kr. Peningurin er goldin til P/f Eystur- og Sandoyartunlar.

### 8.2.11 Akstovan (rakstrarjáttan) 17.38.4.01
Í fíggjarlógini er nettoinntøkujáttanin 1 mió.kr.; 14,8 mió.kr. í inntøkum og 13,8 mió.kr. í útreiðslum. Inntøkurnar gjørdust 15,9 mió.kr. Minninýtslan er 109 t.kr. netto.

### 8.2.12 Ráðið fyri ferðslutrygd (stuðulsjáttan) 17.38.4.04
Í fíggjarlógini er játtað 1 mió.kr. Upphæddin er goldin Ráðnum fyri ferðslutrygd.

### 8.2.13 Fastur gerðarrættur (stuðulsjáttan) 17.39.1.02
Í fíggjarlógini eru játtaðar 700 t.kr. Upphæddin er goldin Fasta Gerðarrætti.

### 8.2.14 Arbeiðs- og brunaeftirlitið (rakstrarjáttan) 17.39.1.07
Í fíggjarlógini eru játtaðar 6,2 mió.kr. Minninýtslan er 23 t.kr.

### 8.2.15 Barsilsskipan (lógarbundin játtan) 17.39.4.01
Í fíggjarlógini eru játtaðar 114 mió.kr. til inntøkur og 114 mió.kr. til útreiðslur. Inntøkurnar frá Barsilsgrunninum vórðu 122 mió.kr. og útreiðslurnar til barsilsgjøld 122 mió.kr.

### 8.2.16 Umsiting av barsilsskipan (rakstrarjáttan) 17.39.4.04
Í fíggjarlógini eru játtaðar2 mió.kr. í inntøkum og 2 mió.kr. í útreiðslum. Útreiðslurnar vóru 2.050 t.kr. Barsilsgrunnurin rindar útreiðslurnar.

# 9 Fluttar løgujáttanir

Sambært § 13 í Ll. nr. 42/2009 “um landsins játtanarskipan” ber ikki til at flyta játtanir til seinni fíggjarár. Í § 22 er tó ásett, at hóast ásetingina í § 13 kann heimild verða givin við átekning at flyta óbrúktar løgujáttanir til seinni fíggjarár.

Niðanfyri er yvirlit yvir avlop á løgujáttanum, sum við heimild í C.átekningum eru flutt til seinni ár:

*t.kr.*

| **Høvuðskt.** | **Heiti** | **2013** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1.10.1.10 | Nýggjur bygningur til Føroya løgting | - | - | 19.000 | - | - |
| 5.31.1.04 | Tilbúgvingarætlan | - | - | 9.421 | - | - |
| 5.34.3.06 | Nýtt havrannsóknarskip | - | - | - | 9.530 | 2.119 |
| 6.37.5.06 | Granskingarlund | 5.055 | 230 | - | - | - |
| 7.23.3.02 | Studentaskúlin og HF-skeið í Eysturoy | 10.249 | 10.746 | 8.585 | - | - |
| 7.23.3.07 | Tekniski Skúli í Klaksvík | 11.734 | 11.558 | 10.077 | - | - |
| 7.23.3.09 | Skúladepil við Marknagil | 64.866 | 13.853 | 80.163 | 3.890 | 31.270 |
| 7.24.2.09 | Tjóðleikhús | 4.846 | 4.727 | 4.695 | 4.510 | 4.457 |
| 7.24.4.03 | Kringvarp Føroya | 9.361 | 8.328 | - | - | - |
| 11.20.2.09 | Apoteksverkið | 3.517 | - | - | - | - |
| 11.20.3.08 | Landssjúkrahúsið, útbygging | 5.253 | 18.046 | 423 | 21.170 | 1.108 |
| 11.20.3.11 | Klaksvíkar Sjúkrahús | 6.292 | - | - | - | - |
| 12.21.6.02 | Bústovnar o.a. | 37.431 | 24.763 | 18.045 | 13.869 | 19.763 |
| 17.38.1.07 | Nýggir landsvegir | 22.293 | 11.124 | 14.715 | 7.628 | 3.255 |
| 17.38.1.14 | Havnir | 985 | - | 5.347 | - | - |
| 17.38.2.02 | Strandfaraskip landsins | 2.513 | 4.007 | 3.409 | 946 | - |
| **Tilsamans** | | **184.395** | **107.382** | **173.880** | **61.543** | **61.972** |